

# HEILDARÆTLAN

## um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028

LØGMANSSKRIVSTOVAN

**18. mars 2022**

# Heildarætlan:

## Tilmæli um átøk

## at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum

**Bárður á Steig Nielsen**

**løgmaður**

**Jenis av Rana**
**landsstýrismaður**
**í uttanríkis- og mentamálum**

**Kaj Leo Holm Johannesen**
**landsstýrismaður**
**í heilsumálum**

**Sólvit Emilson Nolsø**
**landsstýrismaður**
**í almannamálum**

**latin løgmanni**

**18. mars 2022**

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ........ 1
Formæli ........ 4
Hoyringarpartar, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við ........ 5
Samandráttur ........ 6
Átøkini í tilmælinum – kostnaður og tíðarætlan ........ 8
Fyrsti Partur: Um heildarætlanina og støðulýsing ........ 14
Kapittul 1: Inngangur ........ 14
Arbeiðssetningur ........ 15
Kapittul 2: Um heildarætlanina ........ 16
Kapittul 3: Rúsevni í Føroyum ........ 20
Kapittul 4: Støðulýsing, innflutningur, nýtsla og revsing ........ 22
Innflutningur – Nýggj rúsevni og nýggir hættir at smugla ........ 25
Rúsevnisnýtsla millum ung ........ 25
Harðari revsing í Føroyum ........ 27
Kapittul 5: Fyribyrging í øllum liðum ........ 29
Annar Partur: Átaksøki og tilmæli ........ 32
Kapittul 6: Fyribyrging, fyribyrging, fyribyrging ........ 33
Endurskoða tænastur og stovnar ........ 33
Endurskoðan av barnaverndarøkinum ........ 35
Sernám ........ 37
Gigni – heilsufrøði til børn og ung ........ 39
SSP ........ 40
Tann góða tilgongdin ........ 42
Megna títt lív ........ 43
Trivnaður ........ 44
Trivnaður og skúlaungdómur ........ 45
Flokslæraraskipanin ........ 49
AKT-lærarar ........ 51
Trivnaðarkanningar og átøk at basa happing ........ 53
Skúlaaftran ........ 54
Lopfjølin ........ 56
Ein skipað tilgongd til at varnast mistrivnað og betra um trivnað hjá børnum og ungum ........ 58

Eftirútbúgva, førleikamenna og kunna lærarar, námsfrøðingar og onnur fakfólk um ADHD ............ 62
Undirvísingartilfar um rúsevni og rústrupulleikar, ætlað fólkaskúla og á miðnámi ........................... 64
Neyðtelefonir og hjálpartelefonir hjá Barnabata og øðrum ........................................................ 65
Títt Rúm (fyrr: Øll hava rætt til góð barnaár) ........................................................................ 68
Ættarliðsavbjóðingar (generational problems) ......................................................................... 69
Sunnir felagsskapir ........................................................................................................ 70
Ítróttur ......................................................................................................................... 71
Onnur frítíðartilboð ........................................................................................................ 71
App at finna frítíðarvirksemi og ymisk tilboð um hjálp ........................................................ 73
Ungdómshús og ungdómsklubbar – eitt týdningarmikið tilboð til ungdómin ................................. 74
Eftirskúlatilboð til ung við ADHD ........................................................................................ 77
Foreldraleiklutur og foreldrasamstarv ................................................................................. 78
Familjuhús ..................................................................................................................... 80
Familjudepilin ................................................................................................................. 81
Tvørgeiraligt samstarv ..................................................................................................... 83
Psykiatriskar diagnosur, útgreining, viðgerð og bíðirøðir ......................................................... 85
Bráðfeingis sálarfrøðilig móttøka ....................................................................................... 86
Samskipan og samstarv um diagnosur og viðgerð ................................................................. 86
Dupultdiagnosur og rúsevnisviðgerð ................................................................................... 88
Skipa eitt PSP-samstarv ................................................................................................... 89
Skipa eitt SSP+-samstarv ................................................................................................. 90
Faldara til myndugleikar um nær upplýsingar kunnu gevast víðari ........................................... 92
Kapittul 7: Viðgerð og eftirviðgerð ...................................................................................... 93
Viðgerðartilboð fyri rúsdrekka- ella rúsevnismisnýtslu ............................................................ 93
Blákrossheimið / Blái Krossur Føroya .................................................................................. 93
DAT-ung ........................................................................................................................ 94
Heilbrigdi á Velbastað ...................................................................................................... 94
Viðgerðarstovnurin Frælsi á Eiði ........................................................................................ 95
Hagtøl fyri viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu ........................................................................... 95
Ymiskir trupulleikar og fjøltáttaður viðgerðartørvur – samstarv millum stovnar og skipanir ............. 97
Tilhaldsstað fyri ung við rúsevnistrupulleikum ...................................................................... 97
Viðgerðarstað sum liggur burturfrá ..................................................................................... 99
Ávegishús (Halfway house), Mentorskipan og bústaðartilboð .................................................. 99
Ritalinkafé / heilivágsútflýggjanarskipan ............................................................................ 101

Kapittul 8: Eftirlit ... 104
Eftirlit við viðgerðarstovnum ... 104
Lóggáva um viðgerðarstovnar og góðkenningar ... 104
Marknaeftirlit ... 104
Kapittul 9: Revsifulnaður ... 108
Fongsulsviðurskifti ... 108
Kapittul 10: Vitanargrundarlag – hagtøl, kanningar,skráseting og gransking ... 110
Skráseting ... 111
Avbjóðingar í sambandi við skráseting ... 111
Passiv skráseting ... 111
Aktiv skráseting ... 112
Fíggjarligar avleiðingar ... 112
Gransking ... 113
Granskingarverkætlan um leiklutin hjá myndugleikum í málum viðvíkjandi ungum, við samansettum og víðfevndum trupulleikum ... 113
Dátugrunnur um trivnað og menning ... 114
Kapittul 11: Niðurstøða, íverksetan og eftirmeting ... 116
Niðurstøða ... 116
Íverksetan og eftirmeting ... 118
Bókmentalisti ... 120
Fylgiskjøl ... 122
Fylgiskjal 1: Sálarheilsukanning á miðnámsskúlum (Joensen C. & á Lakjuni T. 2021) ... 123
Fylgiskjal 2: Arbeiðsorkan hjá Sernámi býtt uppá arbeiðsbólkar ... 134
Fylgiskjal 3: Lopfjølin – ábyrgd, visitatión og lógargrundarlag ... 135

# Formæli

Seinastu árini hava nógvar ógvusligar søgur verið í fjølmiðlunum vaksandi rúsevnismisnýtslu í Føroyum. Ofta er talan um ung, sum frammanundan hava tað trupult, sum koma út í misnýtslu og kriminella umhvørvið, har hóttanir og ógvusligur harðskapur gerast gerandiskostur. Bæði stovnar og hjálparfelagsskapir kunnu vátta, at so er, og nógv bendir á, at tað tíverri er vorðið alsamt lættari at fáa fatur á rúsevnum í Føroyum.

Rúsevni er nakað av tí mest oyðileggjandi fyri eitt menniskjalív. Tí harmist eg, tá ið eg hoyri, at fleiri ung í føroyska samfelagnum stríðast við rúsevnismisnýtslu.

Tað føroyska samfelagið kann ikki góðtaka, at ung detta niðurímillum. Tí varð arbeiðið við hesari heildarætlan sett í gongd.

Barnarættindasáttmálin hjá ST varð samtyktur fyri 33 árum síðani. Fleiri týðandi altjóða barnarættindaátøk eru sett í verk síðani tað, men enn eru nógvar avbjóðingar eftir. At vera barn í dag, er ikki tað sama, sum tá ið sáttmálin varð skrivaður. Altjóða rák, talgild tøkni og samfelagsligar broytingar við nýggjum fortreytum og krøvum hava havt við sær nýggjar møguleikar og nýggjar avbjóðingar fyri børn og ung.

Nógv ung hava ringa sálarheilsu, og hetta kann økja um vandan fyri rúsmisnýtslu.

Vit skulu duga betur at varnast tekin um mistrivnað, so vit kunnu fyribyrgja, at børn og ung koma í støður, sum økja um vandan fyri rúsevnismisnýtslu.

Vit skulu lofta teimum, sum eru á veg út í trupulleikar, og tey, sum longu hava rústrupulleikar, skulu hava bestu hjálpina.

Tað hevur týdning, at vit finna loysnir, sum hóska seg til føroyska samfelagið, og at vit leggja dent á at fyribyrgja breitt.

Børn og ung hava grundleggjandi rættindi, men tað eru vit vaksnu, sum hava ábyrgdina av at tryggja teimum bestu sømdir. Tað er okkara uppgáva áhaldandi at virka fyri at bøta um kor, uppvøkstur, trivnað og menning hjá børnum í Føroyum.

**Føroyar skulu vera besta og tryggasta staðið at vaksa upp og vera ungur í.**

Bárður á Steig Nielsen

løgmaður



## Hoyringarpartar, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við: [1]

ADHD-Felagið
AKT-felagið
Almannaverkið, Eind 4
Almannaverkið, Eind 10
Argjaskotið
Barnabati
Barnapsykiatriin
Barnaverndarstovan
Blái Krossur
Brámóttøkan
Christian Joensen og Terji á Lakjuni, Miðnám á Kambsd.
DAT, Blái Krossur
DAT og DAT-ung (3 fólk, sum eru í viðgerð)
Foreldrabólkur úr Vágum
Fountain Húsið
Fólkaheilsuráðið
Frid A. Hansen, sálarfrøðingur
Frælsi
Føroya Kommunufelag
Føroya Lærarafelag
Føroya Pedagogfelag
Føroya Politi
Føroyskir Brotsfrøðingar (Kriminologar)
Føroyskir Sálarfrøðingar
Gigni
Glasir
Heilbrigdi
Húsið í Klaksvík
ÍSF
Jóhanna Andreassen (samrøðuamboð)
Jóhannes Miðskarð, Cand. Ped.
Klubb 188
KRIS
Kriminalforsorgin
Kommunufelagið
Kommunulæknarnir (nøkur umboð)
Kommunur í Føroyum (umboð)
Landsapotekarin
Loftið í Vágunum
Lopfjølin
Megna títt lív (MTL)
Miðnám í Kambsdali
Miðnám í Suðuroy
Miðnám í Vestmanna
Náttarlívið (nøkur umboð fyri vinnurekandi)
Náttarravnarnir
Novavi
Næmingaráðið á Glasir
Næmingaráðið á Miðnám á Kambsdali
Næmingaráðið á Miðnám í Vestmanna
Næmingaráðið á Miðnám í Suðuroy
Næmingaráðið á Tekniski Skúli í Klaksvík
Næmingaráðið á Vinnuháskúlanum
Margarinfabrikkin
Psykiatriski depilin
Sernám
Sinnisbati
Skúlaleiðarafelagið
SSP
Staðið í Vestmanna
Súni Poulsen, sálarfrøðingur
TAKS
Tann góða tilgongdin (AV)
Tekniski Skúli í Klaksvík
Tiltøk í Tøkum Tíma (TÍTT)
Títt Rúm, Blái Krossur
Títt Rúm (avvarðandi)
Tóra Petersen, trivnaðarráðgevi á Námi
Tórshavn Boksing – Martin Meng
UDB í Vági
Undirvísingarstýrið
Ungdómshúsið í Kollafirði
Vinnuháskúlin
Yrkisfelagið Miðnám

[1] Yvirlitið er ætlað at lýsa fjølbroytni og vavið av samrøðum. Fyrivarni verður tikið fyri, at okkurt navn ikki er á listanum.

## Samandráttur

Farnu árini eru søgurnar um ung fólk, sum hava rústrupulleikar øktar í tali, eins og vit alsamt oftari hoyra um ymisk politiátøk og kriminalitet, sum hevur samband við rúsevnisumhvørvið.

Løgmaður hevur tí tikið stig til at fáa framleitt hesa heildarætlan, sum skal koma við uppskotum um, hvussu vit kunnu fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum.

Nøgdin av tilfari, sum lýsir rúsevnismisnýtslu í Føroyum og rúsevnisumhvørvið, er sera avmarkað. Tí valdi arbeiðsbólkurin at leggja dent á eina kvalitativa vitanarinnsavning. Arbeiðsbólkurin hevur tí havt sera nógvar fundir og samrøður við eina fjøld av fakfólki og øðrum, sum mett vóru at hava viðkomandi vitan og innlit.

*"Tað ber ikki til at steðga útboðnum av rúsevnum. Tað einasta, sum riggar, er at minka um eftirspurningin við at hjálpa teimum, sum hava brúk fyri hjálp."*
*(ónevndur rúsviðgeri)*

Tað stóð arbeiðsbólkinum skjótt greitt, at besti og munadyggasti hátturin at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu var at leggja dent á fyribyrging í breiðari merking.

Fyribyrgingin, sum arbeiðsbólkurin leggur dent á, snýr seg ikki um rúsevni sum eitt serskilt evni, men heldur um sannroyndina, at rúsevnismisnýtsla í flestu førum hevur røtur í øðrum trupulleikum – t.d. sálarligum ella sosialum.

Arbeiðsbólkurin kemur, við støði í hoyringarfundum, við eini røð av tilmælum. Flestu tilmæli eru til átøk á heilsu-, almanna-, undirvísingar- og mentanarøkinum. Men nøkur tilmæli snúgva seg eisini um t.d. tollvald, dómsvald og revsing.

Høvuðsniðurstøður eru, at vit hava nógv og góð tilboð og nógvar skipanir til at hjálpa teimum, sum hava ymsar avbjóðingar. Men samskipanin millum tilboðini er ikki altíð nóg góð, og tí kann skipanin tykjast stirvin, og tað kann vera møtimikið og trupult at fáa røttu hjálpina. Tí eru nógv dømi um børn og ung, sum antin ikki hava fingið hjálp, ikki fingið røttu hjálpina, ella har hjálpin kemur ov seint til at gera mun.

Um størri orka verður løgd í at menna og samskipa tilboðini til teirra, sum hava sálarligar ella sosialar avbjóðingar, ber til at fyribyrgja nógvum langtíðartrupulleikum og harvið eisini rúsevnistrupulleikum.

Arbeiðsbólkurin hevur nógv tilmæli, sum snúgva seg um trivnað og sunnar felagsskapir. Um tey, sum eru um børn og ung, varnast tekin um mistrivnað tíðliga, og hóskandi tiltøk (ofta smá) vera sett í verk beinanvegin, gerast útlitini betri fyri, at smærri trupulleikar kunnu loysast og ikki sleppa at vaksa seg stórar og gerast verri at loysa. Somuleiðis vístu fleiri hoyringarpartar á, at um børn ella ung eru partur av einum sunnum felagsskapi, so økir hetta um mótstøðuføri.

Arbeiðsbólkurin hevur tí fleiri tilmæli um at førleikamenna fakfólk, amboð og háttaløg at varnast tekin um mistrivnað eins og tilmæli um at stuðla og styrkja møguleikan hjá børnum og ungum at luttaka í sunnum felagsskapum.

Mælt verður eisini til at TAKS fær betri amboð og arbeiðsumstøður til at steðga rúsevnum við landamarkið. Tílík átøk gera tó ikki nóg stóran mun einsamøll.

Til endans mælir arbeiðsbólkurin til, at størri fokus verður lagt á gransking og at fáa dygdargóð hagtøl til vega. Uttan hesi amboð ber ikki til at siga, hvørjar avleiðingar fyriskipanir og tiltøk hava, ella um tey eru fíggjarliga skynsom. Tað er sum at stýra í blindum.

# Átøkini í tilmælinum – kostnaður og tíðarætlan

| Nr. | Átak | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | Tíðar-ætlan | Ábyrgd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fyribyrging** | | | | | | | | | | |
| *Endurskoða tænastur og stovnar* | | | | | | | | | | |
| 1. | Endurskoða barnaverndar-økið | | Fundar-pengar | | | | | | 2023-2024 | AMR |
| 2. | Endurskoða Sernám | 500.000 | | | | | | | 2022-2024 | UMMR |
| 3. | Styrkja og víðka um tilboðini um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung | | | 2. mió | | | | | 2024 | HMR |
| 4. | Endurskoða SSP | Fundar-pengar | | | | | | | 2022-2023 | UMMR |
| 5. | Eftirmeta og víðka Ta góðu tilgongdina | | | | | | | | 2022- | AMR |
| 6. | Økt játtan og víðari heimildir til Megna títt lív | | 1.120.000 | | | | | | 2023 | AMR |
| *Trivnaður* | | | | | | | | | | |
| 7. | Menna trivnaðararbeiði í fólkaskúlanum | | 250.000 | 250.000 | 250.000 | | | | 2023-2025 | UMMR |
| 8. | Menna flokslærara-arbeiði | | 700.000 | 700.000 | 700.000 | | | | 2023-2025 | UMMR |
| 9. | Førleikamenna starvsfólk í Førleikastovuni og trivnaðarátøk | | 350.000 | 350.000 | 350.000 | | | | 2023-2025 | UMMR |
| 10. | Trivnaðar-kanningar | 500.000 | | 500.000 | | 500.000 | | 500.000 | 2022, síðani annað hvørt ár | UMMR |

| Nr. | Átak | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | Tíðar-ætlan | Ábyrgd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. | Skeið um happing fyri lærarar og námsfrøðingar | | | 500.000 | | | | | 2024 og framyvir | UMMR |
| 12. | Fyribyrgja skúlaaftran | eingin eyka kostnað | 100.000 skeið og ráðgeving | 100.000 skeið og ráðgeving | | | | | 2022-2024 | UMMR |
| 13. | Granskingar-ætlan um skúla-aftran | | Eitt ársverk | Eitt ársverk | Eitt ársverk | Eitt ársverk | | | 2023-2027 | Nám |
| 14. | Stovna tilboð, sum líkjast Lopfjølin kring landið | | 950.000 (UMMR) + námsfr. kommun. | 950.000 (UMMR) + námsfr. kommun | 950.000 (UMMR) + námsfr. kommun | | | | 2022-2023 og framyvir | UMMR og kommunur |
| 15. | Skipan, har til ber at varnast mistrivnað fyrr | | | | | | | | 2022-2028 | UMMR |
| 16. | Samrøðu- og samskiftis-amboð | | 150.000 | 150.000 | 150.000 | | | | 2023-2024 | UMMR og kommunur |
| 17. | Verkstovur/ ráðstevnur | | | | | | | | Eftir tørvi | UMMR saman við HMR og AMR |
| 18. | Førleika-menning av fakfólki viðv. ADHD | | 150.000 | 150.000 | 150.000 | | | | 2023 - 2025 | UMMR og kommunur |
| 19. | ADHD partur av læruætlanini fyri lærara og námsfr. útb. | | | | | | | | 2025 | UMMR |
| 20. | Vegleiðingar um ADHD | 50.000 | 50.000 | | | | | | 2022-2023 | UMMR saman við AMR og kommunur |
| 21. | Undirvísingar-tilfar um rúsevni og trupulleikar | | | 100.000 | 100.000 | | | | 2023 - 2026 | UMMR |

| Nr. | Átak | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | Tíðar-ætlan | Ábyrgd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. | Víðka 116 111 so hon svarar alt samdøgrið | | 3. mió. | 3. mió. | 3. mió | 3. mió | 3. mió | 3. mió | 2023 og framyvir | AMR |
| 23. | Skipa HeadSpace - líknandi tilboð | | | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 2024 og framyvir | AMR |
| 24. | Víðka Tú og Eg ráðgevingina til at at hava foreldraráðg. | | | 300.000 | | | | | 2024 | AMR |
| 25. | Telefon-ráðgeving til fakfólk | | | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 100.000 | 2024 | AMR |
| 26. | Endurskoða stuðulsjáttanina til Títt Rúm | | | | | | | | 2024 | HMR |
| 27. | Stuðla og skapa umstøður fyri fjølbroytt fríðarvirk. | | | | | | | | Áhaldandi | Kommun-ur |
| 28. | Menna app viðv. frítíðarvirks og hjálpitilboð | | 500.000 - 1. mió | | | | | | 2023 | Fólka-heilsu-stýrið |
| 29. | Økt játtan til ungdómshús | | | | | | | | 2023 og framyvir | Komm-unur |
| 30. | Víðka tilboðini um fríðarskúlar o.a. | | | | | | | | 2022 | Komm-unur |
| 31 | Samskipandi eind til virksemi í ungd. húsum og klubbum | | | 1.mió | 1. mió | 1.mió | 1. mió | 1. mió | 2023 | Kom-munur saman við UMMR |
| 32. | Styrkja samstørv millum ungd.hús og aðrar partar | | | | | | | | 2023-2024 | Komm-unur |
| 33. | Eftirskúlatilboð til ung við ADHD | | | | 1. mió | | | | 2022-2025 | UMMR |
| *Foreldraleiklutur og foreldrasamstarv* | | | | | | | | | | |
| 34. | Kanna, um til ber at skipa familju-hús | | | | | | | | 2023-2025 | AMR |

| Nr. | Átak | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | Tíðar-ætlan | Ábyrgd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 35. | Kanna familju-deplin | | | | | | | | 2025 | AMR |
| 36 | Kanna praktisk hjálp í heiminum | | | | | | | | 2023-2024 | Komm-unur |
| | *Tvørgeiraligt samstarv* | | | | | | | | | |
| 37. | Yvirlit yvir tænastum og tilboðum | | | | | | | | 2025 | Fólka-heilsu-stýrið |
| 38. | Kanna styttan av bíðitíð til útgreinan og viðgerð... | | | | | | | | 2023 | HMR |
| 39. | Styrkja vitanar-støði og kunningina í.s.v. diagnosur | | | | | | | | 2022-2023 | UMMR, HMR, AMR |
| 40. | Tvørfagligt og tvørgeiraligt samstarv | | | | | | | | Skjótast til ber | AMR, HMR, UMMR |
| 41. | Finna leist so viðgerðartilboð kan skipast til persónar við dupultdiagnosum | | | | | | | | 2023 | HMR |
| 42. | Stovna PSP-samstarv | | um samskipari verður settur kr.250.000 | um samskipari verður settur kr.250.000 | um samskipari verður settur kr.250.000 | um samskipari verður settur kr.250.000 | um samskipari verður settur kr.250.000 | um samskipari verður settur kr.250.000 | 2023 | AMR saman við øðrum |
| 43. | Stovna SSP+ samstarv | | samskipari at saman við PSP kr.250.000 | samskipari at saman við PSP kr.250.000 | samskipari at saman við PSP kr.250.000 | samskipari at saman við PSP kr.250.000 | samskipari at saman við PSP kr.250.000 | samskipari at saman við PSP kr.250.000 | 2023 | AMR saman við øðrum |
| 44. | Faldara og upplýsingar-tiltak um nær myndugleikar kunnu deila upplýsingar | | kr.30.000 | | | | | | 2023 | LMS saman við Dátueft. og politiið |

| Nr. | Átak | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | Tíðar-ætlan | Ábyrgd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Viðgerð og eftirviðgerð** | | | | | | | | | | |
| 45. | Tilhaldsstað fyri ung við rúsevnis-trupulleikum | | | | 1.-5.mió ella meir umframt rakstur | Rakstur | Rakstur | Rakstur | Kanning. arb. byrjar í 2023 | AMR saman við HMR |
| 46. | Viðgerðarstað burturfrá | | | | | | | | Kanning. arb byrjar í 2023 | HMR |
| 47. | Ávegishús<br>(Halfway house) | | | | | | | | Kanning. arb. byrjar í 2024 | HMR saman við øðrum |
| 48. | Mentorskipa | | | | | | | | Kanning. arb. byrjar í 2022 | AMR |
| 49. | Bústaðartilboð til persónar, ið hava verið í rúsevnisviðg. | | | | | | | | Kann helst byrja í 2025 | AMR |
| 50. | Ritalin kafe og útflýggjan | | | | | | | | 2022 | HMR |
| **Eftirlit** | | | | | | | | | | |
| 51. | Profilerings-skipan til TAKS | | 3. mió | | | | | | útbjóða menning. arb. í 2023 | FMR |
| 52. | Dagføring av skannarum hjá TAKS | 400.000 | 400.000 | 400.000 | | | | | 2021-2024 | FMR |
| 53. | Onnur neyðug útgerð til TAKS | 400.000 | | | | | | | Skjótast til ber og síðan eftir tørvi | FMR |
| 54. | Nýtt eftirlitshølið til TAKS við Norrøna og bingju-skannara | | | | | | | | Tá nýggj avgreiðs. høll verður gjørd til Norrøna | FMR, Tórsh. Havn, Smyril Line |
| 55. | Dagføring av eftirlitshølið á flogvøllin | | | | | | | | Skjótast til ber | FMR saman við Vága Flogh |

| Nr. | Átak | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | Tíðar-ætlan | Ábyrgd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vitanargrundarlag – hagtøl, kanningar, skráseting og gransking** | | | | | | | | | | |
| 56. | Betri vitnar-grundarlag | | | | | | | | byrja í 2024 | Fólka-heilsu-stýrið |
| 57. | Granskingar-verkætlan um mál har fleiri myndugl. hava havt ein leiklut | | | | | | | | 2023 - 2024 | Fróðskapar setrið saman við UMMR og AMR |
| 58. | Menning og viðlíkahald av dátugrunn viðv trivna, umstøður, kor og menning hjá børnum og ungum | | Verkætla nin verður fíggja við stuðli úr grunnum, em kostnað verður til at reka dátugr. | | | | | | 2023 og framyvir | AMR saman við Barnabati |

# Fyrsti Partur: Um heildarætlanina og støðulýsing

## Kapittul 1: Inngangur

Seinastu árini hava nógvar søgur verið um rúsevni í føroysku miðlunum. Tað tykist sum um tey verða alsamt léttari at fáa hendur á, og at tað ofta eru ung, sum frammanundan hava tað trupult, sum enda í misnýtslu. Eisini ljóðar, at tað kriminella umhvørvið er vorðið alsamt harðari seinastu árini.

Av tí, at rúsevni eru ólógligar vørur, er torført at siga nakað ítøkiligt um vavið á rúsevnismisnýtsluni. Keyp, søla og nýtsla av rúsevnum fara tí í høvuðsheitum fram í loyndum.

Løgmaður vil, at Føroyar framvegis skulu vera besta og tryggasta staðið at vaksa upp og vera ungur. Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri Løgmansskrivstovuna, Heilsumálaráðið, Almannamálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Føroya Politi og Føroya Kommunufelag var tí biðin um at gera eina hugskotsskrá við møguligum átøkum, sum kundu vera við til at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum. Eitt av átøkunum, sum arbeiðsbólkurin mælti til, var at seta sjøtul á arbeiði at gera eina heildarætlan fyri, hvussu vit í Føroyum kunnu fyribyrgja og tálma rúsevnis-misnýtslu.

Landsstýrið við løgmanni á odda gjørdi av, at munadygg tiltøk skulu setast í verk til tess at basa trupulleikunum við rúsevnum millum ung. Avgjørt varð at seta ein arbeiðsbólk við umboðum fyri Løgmansskrivsstovuna, Heilsumálaráðið, Almannamálaráðið og Uttanríkis- og mentamálaráðið at gera uppskot til heildarætlan um, hvussu vit fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum. Vit vita, at orsakirnar til, at nøkur ung velja at rúsa seg, eru fjøltáttaðar, torgreiddar og víðfevndar. Spurningurin er tí, hvussu vit best lofta ungum, sum eru í ferð við at fáa rúsevnistrupulleikar, og hvussu vit best hjálpa teimum, sum longu hava rúsevnistrupulleikar.

Hendan heildarætlanin er tann fyrsta av sínum slagi og skal skiljast sum ein byrjan. Av tí at rúsøkið er so fjøltáttað og av tí at fleiri myndugleikar og skipanir eru, sum hava ábyrgd og ávirkan á økinum, er heildarætlanin partur av einari tilgongd, sum er ætlað at vara í 6 ár – frá 2022 til 2028.

Tá ið 4 ár eru liðin, eigur heildarætlanin at vera eftirmett, og støða eigur at vera tikin til, um heildarætlanin virkar eftir ætlan, um umstøðurnar eru broyttar, og um tørvur er á at gera tillagingar.

Arbeiðsbólkurin vil nýta høvið at takka øllum teimum, sum hava tikið sær stundir til at tosa við arbeiðsbólkin og geva av síni vitan. Tykkara íkast hevur verið sera virðismikið og varpað ljós á viðurskifti, sum ofta eru goymd og tí alt ov ofta gloymd.

Ein serlig tøkk til tey fýra, sum ávikavist vóru úr Tínum Rúmi (Øll hava rætt til góð barnaár) og í DAT viðgerð. Vit hava stóra virðing fyri tykkara dirvi og tykkara opinleika, og vit eru takksom fyri, at tit vildu siga okkum tykkara søgur.

Somuleiðis vilja vit eisini rætta eina serliga tøkk til næmingaráðsumboðini á miðnámsskúlunum fyri teirra íkast og viðmerkingar.

**Landsstýrisfólkini, sum hava sett arbeiðið í gongd og hava málsøkjaábyrgd, eru:**

Bárður á Steig Nielsen, Løgmaður

Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýriskvinna í almannamálum (til desember 2021)

Sólvit Nolsøe, landsstýrismaður í almannamálum (2022-)

**Hesi hava sitið í arbeiðsbólkinum:**

Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni (formaður)

Katrin Gaard, fulltrúi í Heilsumálaráðnum

Barbara Álvsdóttir Thomsen, fulltrúi í Almannamálaráðnum (Poula Lervig til 1. mai)

Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari í Uttanríkis- og mentamálaráðnum

Leivur Langgaard, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni (skrivari)

## Arbeiðssetningur

Arbeiðssetningurin fyri arbeiðsbólkin var soleiðis orðaður:

**Hvørji átøk kunnu setast skjótt í verk fyri at minka um mongdina av rúsevnum í Føroyum og tálma rúsevnismisnýtslu beint nú, og hvørji langtíðarátøk eiga at setast í verk fyri at fyribyrgja, at børn og ung byrja at nýta rúsevni.**

## Kapittul 2: Um heildarætlanina

Hetta er fyrstu ferð, at farið er undir eina heildarætlan, sum hevur til endamáls at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum. Arbeiðsbólkurin er settur við embætisfólkum, og uttan vegleiðing og hjálp frá nógvum ymiskum fakfólkum og yrkisbólkum hevði ikki borið til at gjørt hesa heildarætlan. Áðrenn átøk verða gjørd við støði í okkara tilmælum, eiga fakfólkini, sum varða av økjunum at fremja eina meiri ítøkiliga viðgerð av tilmælunum.

Heildarætlanin er partur av einari tilgongd, sum arbeiðsbólkurin mælir til verður framd (í fyrstu syftu) í 6 ár – frá 2022 til 2028. Mælt verður til, at heildarætlanin verður endurskoðað í 2026, so metast kann um, hvussu hon roynist, og um tørvur er á tillagingum.

Talan er um eina yvirskipaða heildarætlan, sum vísir á ítøkilig átøk, sum skulu setast í verk komandi 6 árini.

Tað hevur verið trupult hjá arbeiðsbólkinum at finna viðkomandi almenn hagtøl um rúsevnismisnýtslu. Onkrar kanningar eru gjørdar av rúsevnismisnýtslu millum ung, har serliga ESPAD kanningarnar eru væl kendar. Tær eru síðan 1995 gjørdar 4. hvørt ár millum ung, sum fylla 16 ár, tað árið, kanningin verður gjørd. Hetta, at kanningin er gjørd millum 15-16 ára gomul, sigur nakað um júst henda aldursbólkin, men einki um aðrar aldursbólkar. Kanningar á miðnámsskúlum í Føroyum vísa, at atburðurin hjá teimum ungu broytist nógv í hesum árum, og talið á ungum, sum nýta rúsevni fyrstu ferð, serliga veksur um 17-18 ára aldur.[2]

*Kanningar á miðnámsskúlum í Føroyum vísa, at atburðurin hjá teimum ungu broytist nógv í hesum árum, og talið á ungum, sum nýta rúsevni fyrstu ferð, serliga veksur um 17-18 ára aldur*

Frágreiðingin "Når noen må ta regien", har granskarar tosaðu við ung við ringari sálarheilsu í Føroyum, Íslandi og Noregi, vísti á nøkur áhugaverd fyribrigdi. Millum annað varð staðfest, at skiftistíðarskeið og lívsbroytingar, har farið varð úr einari støðu til aðra, høvdu stóra ávirkan, og at møguligir trupulleikar við og av útihýsing og einsemi løgdust afturat og vuksu fyri hvørja broyting.[3] Tey ungu uppliva nógvar stórar lívsbroytingar m.a. í sambandi við skúla- og floksskifti, at gerast vaksin, uppliva kærleika og svik, at skula syrgja fyri sær sjálvum og at fáa tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Hetta eru tískil tíðarskeið, har tey ungu eru serliga viðkvom og tí í serligum vanda fyri at misnýta rúsevni.

Í sambandi við kanningar sum ESPAD, hevur ADHD-felagið víst á, at nógv av teimum, sum hava ADHD, samstundis hava orðblindni, og tí hava trupulleikar við at svara spurningunum í slíkum kanningum. Myndin, sum vit fáa frá ESPAD-kanningunum, er tí kanska ikki heilt eftirfarandi, um fleiri næmingar ikki duga at svara og tí geva tilvildarlig svar ella onki svar. Og sjálvsagt kann hetta eisini vera galdandi fyri aðrar kanningar. Fleiri partar hava somuleiðis víst á, at fólk við ADHD, eru í øktum vanda fyri at fáa eitt misbrúk, serliga um ADHD ikki verður staðfest, so tey kunnu fáa hjálp.

[2] Fylgiskjal X, Christian Joensen og Terji á Lakjuni, 2021

[3] Anvik & Waldahl: Når noen må ta regien, ss.23-24 og 123-124

Hetta kann tí geva eina ábending um, at tølini kunnu vera hægri enn ESPAD-kanningarnar vísa. Aðrar kanningar um rúsevnismisnýtslu millum eldri ung eru fáar, spjaddar og truplar at finna.

Av tí at vísindaliga tilfarið var so avmarkað, bæði í nøgd og vavi, bar ikki til hjá arbeiðsbólkinum at taka støði í tøkum kanningum og hagtølum. Fyri at savna neyðuga vitan um rúsevnisproblematikkin, útbreiðsluna av rúsevnum, rúsevnisviðgerð og ikki minst, hvussu vit best fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í føroyska samfelagnum, varð dentur í staðin lagdur á samrøður við hoyringarpartar.

Fyri at tryggja støðið, valdi arbeiðsbólkurin tí at tosa við nógv ymisk fakfólk, sum arbeiðsbólkurin metti hava kunnleika um rúsevni og fyribyrging, umframt partar, sum kunnu koma við boðum um loysnir. Roynt var eisini so frægt, tað bar til, at fáa lýst málið úr fleiri vinklum.

Arbeiðsbólkurin hevur tí tosað við áleið 75 ymiskar partar, sum eru umboð fyri almennar myndugleikar, felagsskapir og í einstøkum førum privatpersónar. Í onkrum førum hava limir í arbeiðsbólkunum eisini havt meiri óformell uppfylgjandi prát og kjak við hoyringarpartarnar um nøkur av evnunum, og høvið hevur verið at spyrja og svara spurningum.

Fleiri av pørtunum hava harafturat verið so beinasamir, at senda arbeiðsbólkinum viðkomandi tilfar, sum t.d. frágreiðingar, hugskot og hagtøl.

Tilmælini byggja sostatt lutvíst á vitan, sum arbeiðsbólkurin hevur fingið til vega á fundunum og lutvíst á tilfarið, sum er sent arbeiðsbólkinum.

Ein tílíkur arbeiðsháttur er arbeiðskrevjandi, men har eru eisini fleiri fyrimunir við hesum arbeiðshátti. Opnu spurningarnar og samrøðan aftaná gevur meira fjølbroytt svar og eina breiðari og betri heildarmynd av trupulleikanum. Arbeiðshátturin er tí góður, tá ið roynt verður at meta um orsøkir og samanhangir. Vansin er sjálvandi, at grundarlagið verður minni, tí færri persónar vera kannaðir enn við t.d. einari spurnakanning. Hesari avbjóðing hevur arbeiðsbólkurin, sum áður nevnt, roynt at lagt uppfyri við at tosa við nógv ymisk fakfólk, felagsskapir og privatpersónar og at royna at síggja trupulleikin úr øllum sjónarhornum.

Fyri at lýsa ta breiðu myndina, metir arbeiðsbólkurin, at tað hevur stóran týdning at fáa sum mest við av tí, sum partarnar hava sagt. Hetta inniber eisini, at atfinningar móti ymsum stovnum og skipanum eru tiknar við. Av góðum grundum ber ikki til hjá arbeiðsbólkinum at kanna hvørja einstaka útsøgn fyri at fáa at vita, um hald er í atfinningunum. Tað skal tó vera gjørt vart við, at talan er um fakfólk, myndugleikar og felagsskapir við stórari fakligari vitan. Arbeiðsbólkurin metir, at tað hevur stóran týdning at fáa hesar atfinningar við, tí tey siga nakað um støðuna og veikleikar í skipanini – ella hvussu fólk síggja skipanirnar. Samstundis skal hetta síggjast sum ein áheitan um, at avvarðandi stovnar ella ráð kanna málini nærri í samband við eftirmeting ella endurskoðan.

Hátturin, sum arbeiðsbólkurin hevur vald at skipa heildarætlanina er nakað øðrvísi, enn kanska álit flest. Heildarætlanin er býtt upp í styttri og longri lýsandi tekstir, har nakrir so hava eitt ella fleiri tilmæli at enda. Tekstirnir eru í stóran mun eitt náttúruligt úrslit av, at tilgongdin er kvalitativ heldur enn kvantitativ. Hesir lýsandi tekstirnir kunnu fyri nakrar lesarar tykjast óneyðugir, men eru ætlaðir at greiða frá um tey ymisku tilboðini ella partar av ungdómsmentan, sum vit ikki kunnu rokna við, at øll kenna so væl. Tí eru tekstirnir ikki einans frágreiðandi, men skapa eisini ein kontekst fyri tilmælunum og høvuðstankanum um fyribyrging í øllum liðum.

Tað er breið semja millum tey, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við, at besti hátturin at tálma nýtsluni av rúsevni er at fyribyrgja, at nakar byrjar at nýta rúsevni – ella enn betur at fyribyrgja, at fólk koma í eina støðu, har rúsevni tykjast vera ein loysn ella hjálp. Høvuðsdenturin er tí lagdur á fyribyrging í øllum liðum í heildarætlanini.

Í teimum førum, tá persónar longu hava trupulleikar við rúsevnismisnýtslu, hevur tað stóran týdning at møta teimum við virðing og áliti, og at menniskjað aftanfyri misnýtsluna verður sætt og hoyrt. Misnýtsla kemur ikki av ongum, og oftast hava hesir persónar haft truplar umstøður, tunga barlast ella djúptøknar trupulleikar. Við støði í hesi vitan, má hjálpin hugsast sum ein samanhangandi heild. Arbeiðsbólkurin hevur tí roynt at hugsa tilboðini sum hóskandi hjálp í øllum liðum.

Tað er greitt, at nógvar ymiskar skipanir finnast í Føroyum, har fólk kunnu fáa hjálp, bæði tá ið talan er um fyribyrging og um viðgerð. Men spurningurin er, um hesar skipanir virka og samstarva nóg væl. Við hesum spurningi í huga hevur arbeiðsbólkurin tó mett skynsamast at útbyggja og styrkja verandi skipanir, heldur enn at gera nýggjar. Fyritreytin fyri, at hetta skal eydnast, er, at nakrar av hesum skipanum verða eftirmettar og møguliga tillagaðar, og arbeiðsbólkurin heldur, at stórur tørvur er á, at verandi skipanir í nógv størri mun samstarva og samskipa sítt virksemi, og at bindandi avtalur verða gjørdar um tílíkt samstarv. Dentur er lagdur á at finna loysnir, sum hóska til føroyska samfelagið.

Hóast arbeiðsbólkurin í sínum tilmæli leggur størstan dent á at fyribyrgja rúsevnismisnýtslu og á tann hátt ávirka eftirspurningin eftir rúsevnum, so hevur tað eisini stóran týdning at minka um útboðið av rúsevnum so nógv, sum til ber. Hetta kann eitt nú gerast við at geva TAKS betri tól og umstøður til at fremja eftirlit við ferðandi og farmi.

Ein týðandi ávirkan á bæði útboð og eftirspurning í Føroyum er, at føroyingar, sum skulu sita fongsulsrevsing longri enn hálvtannað ár, mugu sita revsingina í Danmark. Umhvørvið í donskum fongslum er sera hart og heilt øðrvísi, enn føroyskir fangar eru vanir við. Millum onnur hava Amnesty Føroyar og Megna Títt Lív funnist at hesum umstøðum. Tá ið føroyingar sita í donskum fongslum, kunnu teir koma í skuld til ymiskar bólkar. Hetta kann føra við sær, at teir noyðast at innflyta og selja rúsevni í Føroyum, tá ið teir koma heimaftur fyri at gjalda skuldina aftur. Harumframt kunnu teir í donsku fongslunum skapa nýggj kriminell sambond.

Sum áður nevnt, er henda heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum. Arbeiðsbólkurin hevur í sínum arbeiði við heildarætlanini saknað dygdargóð hagtøl og granskingargrundaðar kanningar. Av tí at arbeiðsbólkurin ikki hevur kunnað stuðlað arbeiðinum við heildarætlanini við slíkari vitan, hevur verið neyðugt at fáa vitan til vega á annan hátt – t.v.s. við at tosa við nógvar ymiskar partar, sum kunnu hugsast at hava vitan um økið. Tílíkar kanningar og hagtøl eru ein fyritreyt fyri at fáa vitan um medisinsku, sosialu og samfelagsligu avleiðingarnar av rúsevnismisnýtslu. Harafturat eru kanningar og gransking neyðug amboð, um og tá tiltøk skulu leggjast til rættis, setast í verk ella eftirmetast. Finst eitt slíkt vitanargrundarlag ikki, er tað sum at stýra í blindum.

*Kanningar og gransking eru neyðug amboð, um og tá tiltøk skulu leggjast til rættis, setast í verk ella eftirmetast. Finst eitt slíkt vitanargrundarlag ikki, er tað sum at stýra í blindum.*

Arbeiðsbólkurin er fullgreiður um, at ein kostnaður er knýttur at nógvum av tilmælunum. Men kostnaðurin av, at børn og ung ikki fáa røttu hjálpina, er tó nógv størri. Tess longur vit bíða við at veita hjálp og seta átøk í verk, jú størri verður skaðin ella trupulleikarnir, og sannlíkindini fyri, at trupulleikarnir verða varandi og lemjandi økjast. Vandin er, at tey raktu ongantíð fáa útbúgving, gerast partur av arbeiðsmarknaðinum ella fáa trygg bústaðar- og familjuviðurskifti, eins og tey ikki fáa eitt sjálvstøðugt og virkið lív sum vaksin.[4]

[4] Anvik og Waldahl: Når noen må ta regien, s. 124

## Kapittul 3: Rúsevni í Føroyum

Samrøðurnar við hoyringarpartarnar vístu greitt, at vit hava nógv rúsevni í Føroyum, og nøkur fólk hava stórar rústrupulleikar. Neyvt hvussu umfatandi, hetta er, og hvussu nógv rúsevni eru, ber ikki til at siga. Men sum sæst á listanum fremst í tekstinum, eru hoyringarpartarnir í nógvum førum fólk, sum eru soleiðis fyri, at tey síggja og uppliva, hvussu støðan er. Vit gera her eina roynd at lýsa nøkur evni og siga nakrar søgur, sum vit hava fingið í samrøðunum við hoyringarpartarnar, so til ber at skilja, hvat hendir í skuggunum.

Ein kanning á miðnámsskúlunum[5] fyri umleið einum ári síðani vísti, at umleið 25% av næmingunum søgdu seg hava roynt rúsevni, ímeðan meiri enn helvtin hava fingið rúsevni bjóðað. Flestu næmingarnir kendu onkran, sum regluliga nýtti rúsevni.

Arbeiðsbólkurin hevur í fleiri førum fingið at vita, at um tey ungu hava áhuga í at taka rúsevni, so er tað neyvan nakar trupulleiki at fáa fatur í teimum, tí flestu ungu kenna onkran, sum selur, og tey fáa ofta príslistar og lýsingar gjøgnum sosialar miðlar. Arbeiðsbólkurin hevur hoyrt fleiri søgur um, at rúsevni sum t.d. Ritalin og hash eru rættiliga vanlig í veitslum um vikuskifti.

Aftur og aftur verður víst á, at tey ungu, sum fáa veruligar trupulleikar av rúsevnum, eru tey, sum hava annað at dragast við – onkran sálarligan trupulleika, sosialar trupulleikar ella umsorganarsvik. Tað er ikki so vanligt, at tey vælfungerandi og frísku ungu gerast bundin, og at rúsevnini taka vald á teimum. Men tað er ikki altíð lætt at vita, hvør ið ikki hevur tað gott, heldur ikki hjá teimum nærmastu – og vit menniskju eru ikki altíð greið yvir, hvussu vit sjálvi eru fyri. Tí verður slíkt ofta bert sæð afturlítandi. Orsøkirnar til, at tey ungu hava tað trupult, kunnu vera nógvar. Talan kann vera um keðiliga sosiala barlast, men søgur eru eisini um vælvirkandi og fíggjarliga sterkar familjur, sum hava trupult við at fáa neyðugu hjálpina til børn, sum hava trupulleikar.

Geografiskt verður sagt, at rúsevnini eru lættast at fáa fatur á í Havnini, men tey eru allastaðni í Føroyum. Av og á hoyrist um "upplop" har fólk gerast varug við, at nógv ung í ávísum økjum ella bygdum hava rúsevni um hendur, og tá er talan ofta um ung í fólkaskúlaaldri (umleið 15 ár). Eisini hevur verið greitt frá, at nøkur børn í 4.-5. flokki vita, hvussu og hvar tey kunnu fáa fatur á rúsevnum.

Tað verður sagt, at útboðið og fjølbroytni av rúsevnum er vaksið nógv farnu 2-3 árini, og okkurt av hesum rúsevnum tykist verða framleitt í Føroyum. Samstundis siga nøkur frá, at tey vita um fólk, sum hava lumpað seg til ADHD-diagnosu fyri at fáa Ritalin, sum tey so selja við stórum vinningi.

Fleiri hoyringarpartar hava heitt á bólkin um at syrgja fyri, at dentur verður lagdur á sambandið millum rúsevni og ADHD og sálarligar trupulleikar sum heild.

Í náttarlívinum eru nógvar søgur um rúsevni, og fólk, sum starvast í náttarlívinum siga, at á nógvum skeinkistøðum er null-toleransa. Men Náttarravnarnir hava nógvar søgur um ung, sum bera seg løgið at, tí tey eru rúsaði – og tey hava í fleiri førum uppliva óhugnaligar støður, har ung fólk eru um at koma illa fyri. M.a. vísa tey á søgur, har ung óvitandi hava fingið rúsevni. Tey siga, at rúsmynstrini eru broytt nógv seinastu 20 árini, har talan fyrr mest var um rúsdrekka.

Nøkur fólk eru, sum at síggja til megna at stýra síni rúsevnisnýtslu, ella í hvussu er halda henni á einum støði, har hon ikki ávirkar gerandisdagin. Nøkur av hesum fara so í veitslur í vikuskiftum, har

[5] Sí fylgiskjal 1

rúsevni eru uppií. Av tí, at tey megna at hava lønandi størv og hava pening og bústað, hava tey ofta eitt ávíst vald á øðrum, sum nøkur teirra velja at brúka. Har eru nøkur, sum eru komin heilt illa fyri. Arbeiðsbólkurin hevur hoyrt søgur um fólk við rústrupulleikum, sum eru læst føst í heilt óhugnaligum støðum. Fólk, sum ikki hava nakran fastan bústað, men eru noydd at sova hjá vinfólki ella eru noydd at veita kynsligar tænastur fyri at hava eitt stað at búgva. Eisini eru nøkur, sum eru fangaði í ósunnum og harðligum parløgum, tí tey onga aðrastaðni hava at fara.

# Kapittul 4: Støðulýsing, innflutningur, nýtsla og revsing

Fáar almennar upplýsingar og hagtøl eru um rúsevni og rúsevnisnýtslu í Føroyum. Tí var neyðugt at savna inn hesa vitan. Tilfarið, sum liggur til grund fyri hesum arbeiði er tí kvalitativt heldur enn kvantitativt.

Seinastu árini hava nógvar søgur verið í føroysku fjølmiðlunum, sum benda á, at fleiri rúsevni eru í umferð í føroyska samfelagnum enn fyrr, og at tað er lætt á fáa hendur á rúsevnum. Onkrar søgur hava eisini bent á, at tað kriminella umhvørvið í Føroyum er vorðið nógv harðari enn áður, og at partar av kriminella virkseminum er betri skipað enn fyrr.

Tað er tó torført at lýsa vavið á rúsevnismisnýtsluni í Føroyum. Vit vita ikki, hvussu nógv verður innflutt av teimum ymsu sløgunum av rúsevnum, hvør nýtslan er, og hvussu nógv fólk nýta hesi evni. Hetta kemst av, at bæði keyp, søla og nýtsla av rúsevnum eru ólóglig, og av somu orsøk fer hetta fram í loyndum.

Politiið og TAKS hava hagtøl, sum lýsa, hvat slag av rúsevnum hald verður lagt á, og í hvørjum nøgdum. Hagtølini lýsa tó einans nøgdirnar, sum Politiið og TAKS leggja hald á, og ilt er at siga, hvør innflutningurin í veruleikanum er – t.v.s. hvussu nógv sleppur gjøgnum meskarnar. Talan er tí sannlíkt um myrkatøl, sum myndugleikarnir ikki kenna til.

Av tí, at flestu rúsevni eru ólógligar vørur, verða tey smuglað til Føroya. Smuglingarhættirnir eru nógvir og verða býttir í tveir høvuðspartar: persónsflutningur og frakt. Persónsflutningur snýr seg um persónar, sum smugla rúsevni við sær í land, tá teir koma til Føroyar við flogfari ella skipi. Talan er um rúsevni í viðføri ella innvortis. Rúsevni verða eisini send til Føroyar sum frakt við antin skipi ella við flogfari. Hvussu hetta verður goymt, og hvussu rúsevnini verða avhendað í Føroyum, kann vera ymiskt, og smuglararnir tykjast duga væl at finna upp á ráð.

Talva 1 vísir talið av rúsevniseftirlitum, sum TAKS hevur havt í áunum 2018 – 2020, meðan talva 2 vísir nøgdir av rúsevnum, sum TAKS hevur lagt hald á somu ár.

TAKS sær eisini, at persónar koma og geva pengar upp við fráferð. Tá ið ferðafólkini ikki hava eina fullgóða frágreiðing ella skjalfesting um, hvar peningurin stavar frá, fær TAKS illgruna um hvítvasking av pengum. TAKS fráboðar illgrunan til fráboðanarskipanina hjá danska ákæruvaldinum.

TAKS leggur hald á rættiliga stórar upphæddir av peningi í sambandi við eftirlit við ferðafólki á veg av landinum, sum sæst í talvu 3. Farnu 2 árini eru upphæddirnar øktar sera nógv, sum sæst av talvuni. Partur av peninginum, sum hald er lagt á, hevur verið í Evrum og amerikanskum Dollarum. Hetta talar fyri, at rúsevni verða flutt til Føroya uttanum politi og tollvald.




*Talva 1: Tal av rúsevnaeftirlitum millum ferðafólk*

| Rúsevni/ár | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 (jan-okt.) |
|---|---|---|---|---|
| Hash | 8.662 g | 18.165 g | 2.746 g | 11.170 g |
| Syntetiskt Hash | 0 | 0 | 10 g | 0 |
| Amfetamin | 216 g | 983 g | 2 g | 9 g |
| Marijuana | 0 | 0 | 1 g | 1.888 g |
| Kokain | 2 g | 49 g | 40 g | 10 g |
| MDMA | 44 g | 44 g | 4 g | 7 g |
| Frímerkir (LSD) | 178 stk. | 520 stk. | 0 stk. | 0 stk. |
| Ecstasy | 0 | 0 | 50 tablettir | 0 |
| Steroidir | 0 | 0 | 1.100 stk. | 340 stk. |

*Talva 2: Nøgdir av rúsevnum, sum TAKS hevur lagt hald á í 2018 – 2021*




*Talva 3: Peningur tikin við útgangandi eftirliti við ferðafólki*

Politiið metir, at myndugleikarnir einans finna ein lítlan part av teimum evnum, sum verða innflutt, hóast myndugleikarnir leggja stóra orku í at steðga innflutninginum.

Hetta er eisini tað, sum arbeiðsbólkurin hevur fingið at vita frá ymisku hoyringarpørtunum. Tað er breið semja millum hesar um, at nøgdin av rúsevnum er økt, og at rúsevni eru vorðin vanligari millum ein breiðan hóp av ungum. Komið er eisini fram, at tað er lætt at fáa hendur á rúsevnum í Føroyum, og at tað ber til at fáa fatur á nærum øllum sløgum av rúsevnum. Størsti parturin av innfluttu rúsevnunum eru helst í Tórshavn. Harumframt eru øki í landinum, sum hava havt nógv rúsevni í tíðarskeiðum, men rúsevni kunnu fáast allastaðni í landinum. Partarnir, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við, hava greitt frá (eins og søgurnar í miðlunum vísa á), at rúsevnisumhvørvið er vorðið nógv harðari í Føroyum seinastu árini, og nógvar søgur eru um harðskap og skipaðan ágang.

Talva 4 vísir persónar, sum eru ákærdir fyri brot á narkotikalóggávuna í ávikavist bekendtgørelse af anordning for Færøerne om euforiserende stoffer og ásetingum í revsilógini um narkotikabrotsverk.

Anordningsbekendtgørelse for Færøerne om euforiserende stoffer regulerar tey vanligu narkotikabrotsverkini, ímeðan revsilógin regulerar tey meiri álvarsligu narkotikabrotsverkini.




*Talva 4: Persónar ákærdir fyri brot á narkotikalóggávuna (Revsilógin og lov om euforiserende stoffer)*

## Innflutningur – Nýggj rúsevni og nýggir hættir at smugla

Frágreiðingarnar um, hvussu rúsevnini koma til landið, eru ymiskar. Hetta er ein greið ábending um, at einstøk átøk at steðga innflutninginum neyvan gera avgerandi munin, tí talan er um nógvar ymiskar innflutningsmøguleikar, og havøkið er vítt við nógvum kilometrum av strond.

Fyrr hevur ofta verið tosað um smugling við flogfari og ferðamannaskipum. Hesin framferðarháttur verður framvegis nýttur, og tosað hevur verið um "turk"[6] av ávísum rúsevnum í 2020-21, tá ferðafólkaflutningurin við Norrønu og flogførum hevur verið avmarkaður.

Tollmyndugleikarnir megna at steðga einum parti av tí, sum verður sent við posti, og framkomnir skannarar kunnu gera hetta arbeiðið lættari og munadyggari.

Nógv fiskifør koma í føroyskar havnir – bæði føroysk skip og útlendsk skip. Søgur eru um, at rúsevni verða flutt millum lond á henda hátt. Men skipunum nýtist ikki at koma í havn fyri at leggja "farmin" upp, tí lætt er at blaka pakkar út við GPS-arum, leggja boyur á avtalaðum plássi ella senda inn við dronum.

Farmaskip (og Norrøna) flyta eitt alsamt vaksandi tal av bingjum. Tað er ein ómøgulig uppgáva hjá tollvaldinum at kanna hvørja einstaka bingju – og innihaldið í øllum pakkunum og tilfarinum í hvørjari bingju. Tí er hetta helst ein av størstu avbjóðingunum, tí at nøgdirnar kunnu vera stórar.

Samstundis eru umstøðurnar fyri at kanna innflutningin við serliga Norrønu truplar. Økið er sera trongt og illa innrættað, ferðslan er nógv, og tíðin til at gera kanningar er stutt. Harumframt eru ferðafólkini sera sjónlig, tá tey verða tikin til eftirlit, og tað kann tykjast óvirðiligt og hava óhepnar støður við sær.

Søguliga sæð, hevur serliga verið talan um cannabis (hash, marijuana), tá fólk tosaðu um ólóglig rúsevni í Føroyum. Men ein avbjóðing við at finna rúsevni nú á døgum er, at nógv ymisk sløg av rúsevnum eru, og nógv av teimum eru nógv truplari at finna enn cannabis, bæði tí at tey fylla lutfalsliga minni, eru lættari at goyma, og tí tey lukta ikki eins sterkt og cannabis. Harumframt verður ein partur av rúsevnunum innfluttur lógliga, tí talan er um reseptheilivág, sum verður seldur og misnýttur.

## Rúsevnisnýtsla millum ung

Sum áður nevnt, er breið semja millum tey, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við, at rúsevni eru nógv vanligari í Føroyum nú enn fyri fáum árum síðani. Samstundis eru greiðar ábendingar um, at so at siga øll rúsevni kunnu fáast í Føroyum, og at tað er vorðið lættari at fáa fatur á teimum. Nógv ung fáa bjóðað rúsevni hvønn dag m.a. við boðum á snildtelefonini.

Summi gjørdu vart við, at hjá nógvum ungum, yngri enn 18 ár, er lættari at fáa hendur á rúsevnum enn rúsdrekka.

Fleiri hoyringarpartar vísa á, at vit sum samfelag eiga at vera serliga varug við sárbæri hjá teimum ungu. Ung sum hava lágt sjálvsvirði, hava avbjóðingar í familjuni, ikki kenna seg sum part av

[6] Turkur er, tá ov lítið er til av onkrum rúsevni, mest tí at innflutningurin er óstøðugur. Ofta førir hetta við sær, at leitað verður til onnur rúsevni í staðin, ímeðan turkur er.

felagsskapinum í skúla og frítíðarlívi og ung við sálarligum avbjóðingum, ADHD og autismu eru í serligum vanda fyri at koma í óhepnar støður – bæði tá ið talan er um kriminalitet, rúsevni og óheppin val, sum kunnu hava álvarsligar avleiðingar. Nógvar kanningar og frágreiðingar koma til somu niðurstøður.

Rúsevnismisnýtslan byrjar ofta í ungdómsárunum sum liður í ungdómsmentanini og tillagingartil-gongdini frá barni til vaksin. Nøkur royna rúsevni eina ferð, og so er tað liðugt, ímeðan onnur gerast bundin av rúsevnum. Tey ungu, sum hava avbjóðingar, søkja ofta saman í felagsskapi við øðrum ungum, sum eru í líknandi støðu og hava somu hugsanir um seg sjálvan og umverðina. Vandin fyri, at rúsevnisnýtslan veksur ella verður til misnýtslu, er størri í tílíkum umhvørvi, og felagsskapurin og vinarbondini, sum eru knýtt, gera tað tørført at koma burturúr hesum umhvørvinum og misnýtsluni.

Tað er sjáldan ein einføld frágreiðing um, hví nøkur ung og ikki onnur verða bundin av rúsevnum. Orsøkirnar eru ofta fleiri, har samlaðu lívsumstøðurnar hjá tí unga hava avgerandi týdning, sum víst er á omanfyri. Á heimasíðuni hjá danska Almannamálaráðnum[7] verður greitt frá, at umstøður sum bakgrund, relatiónir, avbjóðingar og fíggjarlig og persónlig styrki, hava ávirkan á, hvussu tann ungi megnar at fóta sær í lívinum. Víst verður samstundis á gransking[8], sum sigur, at tað serliga eru hesi viðurskifti, sum eyðkenna støðuna hjá teimum ungu, sum hava rúsevnistrupulleikar:

- Umstøður í uppvøkstrinum, sum eru merktar av eitt nú sviki, skilnaði, strongd og ágangi
- Uppvøkstur í heimi, har nógv rúsevni verður nýtt
- Mistrivnaður og sálarligar avbjóðingar
- Trupulleikar í skúlanum, fakligir og sosialir
- Vinir, sum nýta rúsevni

Ung við ADHD, sum enn ikki hava fingið eina diagnosu, eru ein bólkur av ungum, sum er í øktum vanda fyri at misnýta rúsevni.

Í tilfari hjá danska ADHD-felagnum verður greitt frá, at ADHD er eitt menningarórógv, sum m.a. ávirkar partar av heilanum, sum fata løning og vinning (belønningscenter) soleiðis, at tað skal ein størri ávirkan til, áðrenn persónar við ADHD uppliva kensluna av vinningi og nøgdsemi. Hetta hevur við sær, at tey eru í størri vanda fyri at fáa ymisk sløg av bundinskapi, eitt nú av vedding, spølum, tubbaki, rúsdrekka og rúsevnum. Fólk við ADHD kenna eitt stórt órógv, og hash og rúsdrekka kann tí geva teimum ein ávísan frið. Talan verður tá um eitt slag av sjálvmedisinering.

Sissandi virknaðurin heldur tó ikki á, og skaðiligu árinini kunnu gerast stór og álvarslig. Tess fyrr diagnosur sum ADHD kunnu staðfestast, fyrr ber til at veita hjálp. Og um eitt barn fær staðfest ADHD og fær neyðugu hjálpina og heilivágin, so verður lættari hjá barninum at stýra sær, trívast í skúlanum o.s.fr., og tá er barnið í minni vanda fyri at sjálvmedisinera seinni í lívinum.

Ung við ADHD, sum hava fingið diagnosu, og sum eru sett í medisinska viðgerð, hava tó eisini trupulleikar. Ofta vera tey løgd undir trýst, tí onnur vilja hava fatur á teirra heilivági. Í hesum førum er ofta talan um heilivágin Ritalin, ið hevur høgt virði sum rúsevni. Nógv vilja tí ikki siga frá, at tey hava ADHD, og hetta kann gera tilveruna truplari.

[7] https://socialstyrelsen.dk/unge/eftervaern

[8] Pedersen et al., 2015; Pedersen & Frederiksen, 2012; Pedersen et al., 2009; Ege 2004

Summmi verða tó eisini freistað til at selja nakað av sínum heilivági, tí upphæddirnar, sum kunnu fáast fyri Ritalin, eru stórar.

Vit eiga ikki at undirmeta trupulleikan við óviðgjørdum ADHD, t.v.s. ung sum eldri, sum hava ADHD, men ikki hava fingið nakra hjálp ella ikki eru útgreinað. Kanningar í Danmark vísa, at umleið helvtin av teimum, sum sita dóm í donskum fongslum, hava ADHD.

Tað er munur á ungum gentum og dreingjum, tá tað kemur til rúsevnismisnýtslu. Dreingir eru ofta meira buldrasligir og sjónligir, ímeðan tað ikki er so lætt at leggja til merkis, um gentur hava eitt misbrúk. Genturnar kunnu lættari fáa fatur á rúsevnum uttan álvarsligan kriminalitet. Tær gera t.d. ymiskar tænastur, eisini kynsligar, afturfyri at fáa rúsevni. Dreingirnir eru hinvegin ofta noyddir til at selja rúsevni fyri at fíggja eginnýtslu ella vera partur av einum sokallaðum “tæskehold”.

Heilivágsmisnýtsla er ein týðandi partur av rúsmisnýtsluni og rúsevnisumhvørvinum í Føroyum. Í Føroyum, eins og í øðrum londum, eru fólk, sum av ymsum ávum hava tørv á stórum nøgdum av ávístum heilivági. Men tíverri mugu vit ásanna, at ein partur av hesum heilivági verður seldur á rúsevnismarknaðinum í Føroyum. Ofta er talan um stuldur ella býtishandlar – men við hvørt hevur onkur valt (ella vorðin trýstur til) at selja burturav sínum heilivági. Heilivágurin, sum verður nýttur sum rúsevni, er serliga ADHD-heilivágur, men eisini t.d. pínustillandi ella sissandi heilivágur. At heilivágur hevur eitt brúks- ella søluvirði í rúsevnisumhvørvinum kann vera órógvandi hjá teimum, sum hava tørv á honum. Serliga eru nógvar søgur um fólk við ADHD, sum kenna seg noydd at goyma sín heilivág ella diagnosuna, so tey ikki verða trýst til at selja burturav.

Yvirhøvur brúka ung ofta rúsevni til at megna avbjóðingarnar í lívinum, og tí eru rúsevni ofta ein ábending um aðrar trupulleikar. Í hesum sambandi verður eisini víst á, at tað hevur stóran týdning, at viðgerð í sambandi við rúsevni verður løgd til rættis sum ein heildarviðgerð, har hond verður tikin um samlaðu støðuna hjá tí unga.

## Harðari revsing í Føroyum

Revsingin fyri at innflyta rúsevni til Føroya er vanliga hægri enn í Danmark, hóast lógin um euforiserandi evni er donsk og er sett í gildi í Føroyum við ríkislógartilmæli.

Orsøkin til henda mun er, at mett verður, at sjálvt smáar nøgdir av euforiserandi evnum kunnu hava við sær størri skaðiligar avleiðingar í einum lítlum samfelag enn í einum størri samfelag. Søluprísurin og harvið vinningurin av slíkari sølu er eisini munandi hægri í Føroyum.

Í Danmark ber til at revsa brot á lógina um euforiserandi evni við ávaring, men hesin møguleiki er ikki í Føroyum.

Føroyska revsilógin hevur somu revsirammu fyri hesi brot sum danska revsilógin, men sambært føroyskari rættarsiðvenju verða brotsverkini dømd harðari revsing í Føroyum.

Tað tykist í høvuðsheitum at vera semja millum teir bólkar sum hava tætt samband við fólk við rúsevnistrupulleikum, at revsing í sjálvum sær ikki er besta loysnin, um ætlanin er at fyribyrgja rúsevnismisnýtslu og innflutningi av rúsevnum í Føroyum.

Tað er væl hugsandi, at viðgerðardómar saman við einum mentornetverki høvdu givið betri úrslit – bæði fyri borgaran og samfelagið sum heild – serliga tá ið talan er um smærri rúsevnismál.

## Kapittul 5: Fyribyrging í øllum liðum

Arbeiðsbólkurin leggur dent á, at høvuðstilmælið í høvuðsheitum snýr seg um fyribyrging í øllum liðum. Tí er eisini neyðugt at greiða frá, hvat arbeiðsbólkurin hevur hugsað, tá ið hetta hugtak verður nýtt: "fyribyrging í øllum liðum".

Tíðindaflutningurin og samskiftið í fjølmiðlunum og aðrastaðni um fyribyrging av rúsevnismisnýtslu ber brá av, at hugsað verður fyrst og fremst um eftirlit við føroyska markið, tað uppsporandi arbeiðið hjá politiinum umframt kunning um rúsevni til ungfólk. Sjáldan verður hugt afturum misnýtsluna og spurt, hvørjar orsøkirnar eru til, at eitt menniskja fer at misnýta rúsevni.

Eitt afturvendandi evni á hoyringarfundunum, sum arbeiðsbólkurin hevur havt, er at eftirlit og uppsporing ikki í sjálvum sær fer at fyribyrgja at ung fara at misnýta rúsevni. Politi og tollvald hava gjørt greitt, at tað ikki ber til at steðga øllum innflutningi av rúsevnum. Tí heldur arbeiðsbólkurin tað vera neyðugt at kanna, hvørji onnur átøk kunnu setast í verk fyri at fyribyrgja rúsevnismisnýtslu.

Sera nógvir hoyringarpartar hava víst á, at rúsevnismisnýtslu hongur tætt saman við mistrivnaði, happing, sálarligari óheilsu og umsorganarsvik. Nógv ung royna ymisk rúsevni einaferð ella kanska fleiri ferðir og gerast ikki bundin av hesum. Í teimum førum, tá ið nýtsla av rúsevnum verður til misnýtslu, liggur í allar flestu førum ein søga aftanfyri, sum á onkran hátt snýr seg um mistrivnað.

Fleiri hoyringingarpartar hava víst á, at børn og ung, sum trívast og sum eru partar av sunnum felagsskapum, eru í nógv minni vanda fyri seinni at fara at misnýta rúsevni. Greitt er frá, at fyrr hjálp verður sett inn, um tekin síggjast um mistrivnað, størri er møguleikin fyri at fyribyrgja stórum trupulleikum seinni í lívinum.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er neyðugt, at vit sum samfelag duga betur at síggja tekin um mistrivnað – serliga hjá børnum og ungum – og at vit gera okkurt við støðuna. Tekin um mistrivnað hjá børnum kunnu tó vera sera ymisk, og tekinini kunnu vera smá og ring at fáa eyga í byrjanini, uttan at tey, sum eru um børnini, hava neyðugar førleikar at tulka støðuna. Hetta krevur, at vit geva starvsfólkunum bæði í dagstovnum, skúla og frítíðarlívi amboð og mannagongdir, sum gera tey før fyri at tulka tekinini og at seta hóskandi tiltøk í verk. "Tiltøk í Tøkum Tíma" er eitt tílíkt dømi um skipað amboð og mannagongdir, har familjan verður tikin við sum ein týdningarmikil viðleikari og tilfeingi, og har styrkir og menningarmøguleikar hjá barninum eru í miðdeplinum.

Vit mugu seta inn, so tíðliga sum til ber. Bæði heima og í øllum virksemi fyri børnum og ungum mugu vit leggja dent á trivnað og felagsskap, har virðir hava ein týðandi leiklut – bæði at virða seg sjálvan, onnur, felagsskapin og at velja og síggja munin á góðum og ringum lívsvirðum og vanum. Hetta er lykilin til, at børn og ung kunnu meistra nógvar av teimum avbjóðingum og støðum, sum tey koma í.

Nógvir hoyringarpartar hava eisini víst á, at um eingin hjálp verður veitt, fyrrenn seinni í lívinum, tá ið trupulleikarnar eru vorðnir stórir og víttfevnandi, er nógv verri at geva munadygga hjálp – og átøkini, sum mugu setast í verk, kosta samfelagnum nógv meiri.

Tá ið arbeiðsbólkurin nýtir hugtakið "fyribyrging í øllum liðum", er eisini týdningarmikið at leggja dent á munadygga hjálp, tá ið trupulleikar við rúsevnismisnýtslu eru staðfestir.

Fleiri hoyringarpartar hava víst á, at tilboð vanta til hendan bólk, og betri samstarv kundi verið millum tey tilboðini, sum eru. Hesi menniskju hava tað svárt, og vit eiga at duga betur at síggja menniskjað aftanfyri misnýtsluna heldur enn misnýtsluna sjálva. Hesi menniskju kenna seg sjáldan sædd og hoyrd og verða ofta møtt við misáliti og lítlari virðing.

Hóast tað kanska tykist sjálvsagt, so er sera trupult at motivera menniskju til at taka ímóti hjálp, um tey ikki vera møtt við áliti og virðing. Virðingin má tí vera grundarlagið undir allari hjálp.

Nøkur av teimum, sum arbeiða við útsettum menniskjum hava víst á, at tørvur er á einum staði, har man rúmar menniskjað og rúsevnismisnýtsluna. Tey vísa á, at nógvir misnýtarar liva undir sera hørðum og óvirðiligum korum. Tey mæla tí til, at vit fáa eitt stað, har tað ikki er neyðugt at vera rúsfríur, og har menniskjað verður rúmað í tí støðu, tað er í – eitt slag av friðskjóli. Raksturin kundi verið skipaður av viðgerðarstovnunum í felag, og har hevði borið til varisliga at motivera brúkarnar til at fara í viðgerð.

Í hesum samanhangi hevur eisini verið víst á, at tað hevði verið gott at fingið eitt avrúsingarstað, sum lá burturfrá miðstaðarøkinum. Helst á einari lítlari oyggj, har tað ikki var so lætt at koma í samband við rúsevnisumhvørvið. Hetta stað kundi eisini verið rikið av viðgerðarstovnunum í felag. Síðan kundi brúkarin farið í viðgerð á tí stovni, sum hóskaði honum best.

Tørvur er eisini á einum sonevndum “ávegishúsi” (halfway house) í Føroyum. Eitt ávegishús er eitt stað, sum hjálpir menniskjum víðari út í samfelagið, tá ið rúsevnisviðgerðin á stovni er av.

Menniskju, sum eru avrúsaði, eru í eini sera sárbærari støðu. Ofta hava tey einki netverk, tí gamla netverkið var tengt at rúsevnismisnýtsluni. Tey hava kanska einki arbeiði ella útbúgving og hava tørv á at fóta sær aftur, soleiðis at tey klára at halda seg rúsfrí. Hetta kann eitt ávegishús, hjálpa teimum við.

Tá hugsað verður breitt um fyribyrging, hevur tað eisini týdning, at eftirlitið við føroyska markið er so munadygt sum gjørligt. Tað vil siga, at tollvaldið fær tíðarhóskandi og nøktandi amboð.

Neyðugt er eisini at kunningin um rúsevni til ungfólk er tíðarhóskandi, veruleikakend og uttan ov nógvar lyftar peikifingrar. Kunningin má vera afturvendandi og helst eitt gjøgnumgangandi tema í undirvísingini, og umráðandi er, at lærararnir eru væl fyrireikaðir og hava førleikar at átaka sær uppgávuna.

Fyribyrging og lívsmeistran er besta amboðið at tálma rúsevnismisnýtslu. Okkara tilráðing er, at leggja stóra áherðslu á eitt gott barna og ungdómslív sum fyritreyt fyri, at tann ungi fótar sær í lívsins mongu viðurskiftum og spurdómum, sum hann skal taka støðu til. Angist og einsemi er afturvendandi evni millum børn og ung, og tí er so umráðandi, at vit bæði í fólka- og vinnu- og miðnámsskúlum hava førleika at veita næmingunum munadygga hjálp, so børn og ung fóta sær, og at hesi viðurskifti ikki forða teirra menningartilgongd. Er unglingin væl fyri, hevur vinir, er í vælvirkandi felagsskapi og hevur fingið møguleika at mennast bæði fakliga og sosialt í barnaárum, so hevur hann nógv størri møguleikar at velja sær lívsleið bæði við atliti at útbúgving, arbeiði og frítíðarlívi, og hevur ikki sama tørv á at søkja inn í ein rúsheim fyri at megna gerandisdagin. Ungdómurin er okkara grundleggjandi menniskjansliga og samfelagsliga virði og barlast, sum skal ganga á odda um nøkur ár og byggja framtíðarsamfelagið.

Vit eiga harumframt at leggja dent á, at allir samfelagsligir myndugleikar og tænastur hava tilfeingi og virkisumstøður fyri at basa rúsevnistrupulleikanum – miðfyrisiting, løgregla, tollvald, dagstovnar, skúlar og viðgerðarstovnar...

### *Ein gongd leið úr misbrúkinum*

Viðgerðarstovnarnir hava nøkur væl skipaði viðgerðartilboð. Nakrir hoyringarpartar hava greitt frá, at slíkt tilboð ikki er hóskandi hjá øllum rúsmisnýtarum. Serliga torført er at fáa í lag hóskandi viðgerð til tey, sum eru komin sera illa fyri av misnýtsluni, og har talan er um samansettar og torgreiddar trupulleikar.

Um rúsevnisviðgerðin varð hugsað í øllum liðum fyri henda bólk, kundi viðgerðin verið skipað soleiðis:




Nøkur av stigunum í hesi "trappuni" eru partar av tilmælunum frá arbeiðsbólkunum.

# Annar Partur: Átaksøki og tilmæli

Í hesum parti av heildarætlanini greiðir arbeiðsbólkurin frá ymiskum viðurskiftum, økjum og skipanum (m.a. við støði í hoyringarfundum og øðrum tilfari), og kemur so við tilmælum til, hvat átti at verið kannað nærri, og hvørji átøk, arbeiðsbólkurin metir kundu verið gagnlig.

## Tilmælini eru býtt upp í hesi átaksøki:

**Kapittul 6:** **Fyribyrging**

**Kapittul 7:** **Viðgerð/eftirviðgerð**

**Kapittul 8:** **Eftirlit**

**Kapittul 9:** **Revsifulnaður**

**Kapittul 10:** **Vitanargrundarlag – hagtøl, kanningar, skráseting og gransking**

## Kapittul 6: Fyribyrging, fyribyrging, fyribyrging

Høvðusdenturin í hesi heildarætlan verður lagdur á fyribyrging í breiðari merking.

Tað er breið semja millum tey, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við, at besti hátturin at tálma rúsevnismisnýtslu er við at fyribyrgja, at nakar byrjar at nýta rúsevni. At eitt menniskja byrjar at misnýta rúsevnir kemur ikki av sær sjálvum. Vit noyðast at hyggja afturum rúsevnistrupulleikan og síggja menniskjað aftanfyri. Nógv hava sálarligar trupulleikar og ymiskar diagnosur sum ADHD, skizofreni og angist, koma úr heimi við trivnaðartrupulleikum, harðskapi ella umsorganarsviki ella hava aðrar álvarsligar trupulleikar. Rúsevnini verða annaðhvørt nýtt sum sjálvmedisinering ella tí, at man hevur okkurt at flýggja frá.

Eitt eyðkenni við flestu fólkum, sum hava trupulleikar við rúsevnum er, at hóast trupulleikarnir, sum liggja aftan fyri misbrúkið, eru byrjaðir tíðliga, so hava tey ikki fingið hjálpina at viðgera ella handfara hesar trupulleikar og truplu støðurnar.

Sera nógv hava gjørt vart við, at eitt barn ella ein unglingi, sum trívist og er partur av einum sunnum felagsskapi, er í nógv minni vanda fyri at fara at misnýta rúsevni.

Vit hava nógvar skipanir í Føroyum, sum eru ætlaðar at hjálpa, tá ið á stendur. Tíverri hava vit ferð eftir ferð hoyrt um dømi, har persónar ikki fáa ta hjálp, teimum tørvar. Hesin trupulleiki gerst serliga stórur í teimum førum, har persónar hava stórar og samansettar trupulleikar og hava tørv á hjálp frá fleiri skipanum í senn. Sami trupulleiki er, tá ið persónar hava dupultdiagnosur. Tað tykist sum um myndugleikar í hesum førum hava lyndi til at skúgva ábyrgdina yvir á aðrar myndugleikar við tí úrsliti, at persónurin onga hjálp fær og tí dettur niður í millum skipanir.

Arbeiðsbólkurin hevur mett, at vit í minni mun eiga at gera nýggjar skipanir, tí hetta er bæði orku- og tíðarkrevjandi, umframt at tað altíð tekur tíð, til ein nýggj skipan virkar til fulnar.

Átøkini í heildarætlanini leggja heldur dent á at fáa skipanir at arbeiða so væl saman, sum til ber, at fyribyrgja, at nakar dettur í millum skipanirnar. Hetta merkir so, at neyðugt verður at tillaga og umskipa sumt virksemi og nakrar skipanir.

Aðalendamálið við heildarætlanini er tvíbýtt: Í fyrsta lagi er ætlanin at fyribyrgja rúsevnismisnýtslu í øllum liðum og í øðrum lagi at geva munadygga hjálp, tá ið persónurin longu misnýtir rúsevni.

Tað hevur stóran týdning fyri arbeiðsbólkin at undirstrika, at øll fyribyrging og hjálp eigur at verða veitt við virðing og hava tað viðbrekna menniskjað í miðdeplinum. Samskifti í eygnahædd, uttan ov nógvar peikifingrar, og virðingin fyri ungum menniskjum hevur ofta avgerandi týdning, um vit vilja røkka teimum og veita røttu ráðgevingina og upplýsingina.

### Endurskoða tænastur og stovnar

Á hoyringarfundum og í øðrum samskifti hevur arbeiðsbólkurin í fleiri førum hoyrt atfinningar um, hvussu ymiskar tænastur og stovnar virka (har nakrar tykjast álvarsligar). Atfinningarnar mugu takast í álvara, tí tær í flestu førum koma frá fakfólki og fólki við servitan ella framíhjávitan. Fleiri hava víst á, at skipanir og tilboð ov sjáldan verða eftirmett í Føroyum, og at summar skipanir ikki eru lagaðar nóg væl til føroysk viðurskifti.

Av tí at føroyska fyrisitingin er lutfalsliga lítil og ikki hevur óavmarkaða orku, verður ofta hugt til londini rundanum okkum fyri at fáa íblástur, og roynt verður síðan sum best at laga hesar til føroysk viðurskifti. Tíverri tykist tó arbeiðið at laga hesar skipanir til føroysk viðurskifti ikki í nóg stóran mun at taka við sjónarmið og royndir frá teimum, sum skulu brúka tilboðið ella øðrum viðkomandi samstarvspørtum.

Tá so hesar skipanir ella tilboð eru farin at virka, er tíverri ikki altíð at fylgt verður við, um tey virka eftir endamálinum og í tráð við ætlanirnar. Á hoyringarfundunum hevur arbeiðsbólkurin hoyrt dømi um skipanir ella tilboð, sum fáa játtan á fíggjarlógini, uttan at krøv verða sett til avrik og dygd.

Tíverri hevur føroyska fyrisitingin ikki fíggjarliga- ella arbeiðsorku til at eftirmeta og endurskoða í sama mun sum londini rundanum okkum, hóast vit yvirhøvur brúka rættiliga stórar upphæddir til ymsar hjálparskipanir og tilboð í Føroyum. Vandi er tó, um vit ikki við jøvnum millumbilum eftirmeta hesar skipanir fyri at tryggja, at tilboðini eru tíðarhóskandi og røkka endamálinum, so vita vit ikki um góðskan er í lagi, ella um uppgávurnar kanska kundu røkjast betri av øðrum stovnum ella í tættari samstarvi við aðrar skipanir. Spurningurin er tí, um orkan verður rætt nýtt; tí við at gera lutfalsliga bíligar eftirmetingar, kunnu vit møguliga finna stórar sparingar ella batar (effektiviseringar).

Í hesi heildarætlan mælir arbeiðsbólkurin til at eftirmeta og endurskoða ymsar tænastur, skipanir, stovnar og játtanir. Tað hevur stóran týdning at gera greitt, at hetta **ikki** skal síggjast sum kritikkur av starvsfólkum, leiðslum ella góðu ætlanunum, men heldur ein roynd at varpa ljós á, at sumt kann verða betrað, og at vit kunnu og eiga at seta krøv, har vit játta fígging. Hóast ein skipan, at síggja til, virkar væl, so kann ein eftirmeting ella endurskoðan møguliga vísa, at vit kunnu vera effektivari ella gera størri mun við at tillaga ella flyta nøkur ábyrgdarøki millum stovnar.

Eitt fokusøki í slíkum endurskoðanum kann vera, um vit hava skipað "tilboðs-ketuna" rætt. T.d. hevur arbeiðsbólkurin hoyrt fleiri dømi um, at fólk verða send til útgreiningar men fáa onga hjálp, tá ið diagnosan er sett. Ein partur av sama problematikki er, at um onkur hevur ein trupulleika, so eigur hann/hon at verða vístur á røttu hjálpina og tilboð, og ikki sjálv/ur verða noyddur at leita seg fram.

Vit mugu viðurkenna, at tað ikki er lætt at finna røttu javnvágina í arbeiðsorku, tá vit skulu eftirmeta ella gera avrikssáttmálar. Og hetta má metast vera ein stór avbjóðing fyri eitt lítið samfelag, sum tó má loysast so ella so. Ein gongd leið at loysa ein part av hesi avbjóðingini er at seta krøv um og ikki minst **til** ársfrágreiðingar frá teimum stovnum og felagsskapum, sum fáa rakstrarjáttan ella stuðulsjáttan á fíggjarlógini (stjórnarráðini fáa í flestu førum hesar ársfrágreiðingar) – og krevja svar og frágreiðing, tá atfinningar eru frammi (t.d. í miðlunum). Brúkarakanningar ella stakroyndir kunnu eisini geva eina góða ábending um, hvørt endamálið við játtanini verður rokkið.

Tá talan er um at seta krøv til stovnar, tilboð, felagsskapir og onnur, so eiga vit at vera varin við, hvussu hetta verður gjørt. Vit mugu minnast til, at talan er um neyðugar uppgávur, sum verða røktar. Tí kunnu vit ikki seta krøv, sum taka ov nógva orku frá kjarnufunktiónum – her verður serliga hugsað um krøv til skrásetingar og frágreiðingar (um ikki nakað greitt endamál og meirvirði er við hesum). Hinvegin eiga vit at seta krøv, sum kunnu tryggja góðsku og eggja til samstarv og vitanardeiling.

Eftirmetingarnar og endurskoðanirnar, sum arbeiðsbólkurin mælir til, eru sum áður nevnt, úrslit av tí, sum arbeiðsbólkurin hevur fingið at vita á hoyringarfundum. Sum nevnt í partinum "Um heildarætlanina" metir arbeiðsbólkurin, at tað hevur stóran týdning at fáa sum mest við, av tí partarnar hava sagt, tí hetta gevur bestu heildarmyndina. Har er settur rættiliga nógvur kritikkur fram, sum sigur

nakað um veikleikar í skipanini. At arbeiðsbólkurin tekur hetta við, skal síggjast sum ein áheitan um, at avvarðandi stovnar og ráð kanna málini nærri í samband við eftirmeting ella endurskoðan.

## Endurskoðan av barnaverndarøkinum

Børn og ung, sum barnaverndartænasturnar arbeiða við, hava ofta samansettar trupulleikar og eru tí í øktum vanda fyri at fáa rústrupulleikar. Hetta ásannar Barnaverndarstovan eisini, men vísir samstundis á, at barnaverndartænasturnar kring landið hoyra lítið um trupulleikan við rúsevnum, og tí fyllir hetta ikki nógv í teirra arbeiði.

Hinvegin hava ymiskir aðrir hoyringarpartar víst á, at rúsevni eru ein trupulleiki millum annað í samband við uppihald á samdøgursstovnum og í ymsum fyriskipanum.

Fleiri partar hava á hoyringarfundunum víst á, at barnaverndarøkið, eftir teirra fatan, ikki virkar nóg væl, og at tørvur er á broytingum. Talan er um bæði myndugleikar, stovnar, almannagagnligar felagsskapir, áhugafeløg og einstaklingar, sum hava hesa fatan.

Víst verður eisini á, at barnaverndartænasturnar virka sera ymiskt frá øki til øki, har nakrar tykjast virka væl, meðan aðrar rigga minni væl. Somuleiðis verður víst á, at tað er stórur munur á ymsu málsviðgerunum, og hvussu teirra arbeiðslag er. Í sambandi við endurskoðanini av barnaverndarlógini í 2011, varð eisini víst á, at málsviðgerðin ikki var eins í teimum ymisku barnaverndarøkjunum. Hetta er framvegis galdandi sambært teimum hoyringarpørtum, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við.

Fleiri vísa eisini á, at barnaverndirnar koma ov seint inn í málini, soleiðis at trupulleikarnir kunnu gerast størri og fleiri leggjast afturat, áðrenn hjálparfyriskipanir verða settar í verk. Samstundis vísa hoyringarpartarnir á, at einfaldar og ódýrar fyriskipanir, sum t.d. at veita praktiska hjálp í heiminum (onkuntíð nevnt mammuhjálp) og mentorskipanir kunnu gera stóran mun, um sett verður inn tíðliga, áðrenn trupulleikarnir gerast ov stórir.

Í barnaverndarlógini er ásett, at Barnaverndartænastan skal arbeiða tvørfakliga. Gigni vísir á, at tøvur er á einum lág-gáttartilboði í millum Gigna og barnavernd. Her verður hugsað um eitt tilboð, sum styrkir familjuna og mennir foreldraførleikan. Eitt tílíkt tilboð kann gera stóran mun, serliga um hetta verður gjørt tíðliga, áðrenn trupulleikarnir vaksa seg ov stórar.

Eitt, sum ørkymlaði arbeiðsbólkin í samband við hoyringarfundirnar, var, at fleiri hoyringarpartar søgdu frá dømum, har útsett foreldur vórðu hótt við, at børnini fóru at verða tikin frá teimum. Serliga sárt var tað at hoyra, at foreldur, sum ikki hava trygg bústaðarviðurskifti, verða hótt heldur enn hjálpt. Arbeiðsbólkurin mælir til, at hetta verður kannað nærri.

Hóast atfinningarnar omanfyri ikki eru so ítøkiligar, metir arbeiðsbólkurin at tað er týdningarmikið, at tær verða nevndar, tí hetta týðir uppá, at okkurt ikki riggar nóg væl við skipanini.

Arbeiðsbólkurin er greiður yvir, at Almannamálaráðið í løtuni er í ferð við at fremja løgfrøðiligt eftirlit við barnaverndarøkinum. Almannamálaráðið hevur greitt frá, at eftirlitið er víðfevnt og fevnir um flest øll innanhýsis viðurskifti hjá tænastunum. Talan er um kanning av avgerðum, uppfylging av málum, hvussu barnaverndirnar tryggja rættindi hjá børnum og foreldrum, samstarv millum barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting o.m.a. Eftirlitsvitjan fer fram hjá barnaverndartænastunum, har útgreinandi spurningar verða settir. Eisini verður arbeiðið hjá barnaverndartænastunum sum heild

umrøtt, eins og spurt verður til ítøkilig mál. Talan er um rúgvismikið og nágreiniligt tilfar, og fyribils niðurstøður hjá Almannamálaráðnum geva ikki somu mynd av barnaverndarøkinum, sum aðrir partar, ið hava samband við økið, hava.

Eftirlitið fevnir tó ikki um, hvussu onnur uppliva barnaverdarøkið. Tá eftirmeting av barnaverndarøkinum varð gjørd í 2011, harmaðist Almannamálaráðið, at tað ikki hevði borið til at hoyra ymsu samstarvspartarnar og brúkararnar. Hetta sama ger seg galdandi í hesum eftirliti, sum tí heldur ikki fevnir um øll tey viðurskifti, sum aðrir myndugleikar og persónar finnast at.

Hetta metir arbeiðsbólkurin er sera óheppið. Tá ein meting skal gerast av einum so inntrívandi øki sum barnavernd, herðir tað kravið um at hoyra partarnar, sum eru fevndir av ella raktir av hesum skipanum, eins og tey, sum samstarva við ella vísa til barnaverndina. Eitt eftirlit, sum ikki kannar, hvussu onnur uppfata skipanina og samstarvið, kann ikki metast sum eitt fult eftirlit. Málsupplýsing og hoyring av pørtum er ein kjarnuførleiki hjá ráðunum, og ynski er um at lýsa økið til fulnar, er neyðugt at hoyra aðrar partar enn barnaverndartænasturnar sjálvar.

Við eftirmetingin í 2011 reistu barnaverndartænasturnar sjálvar spurningin um, hvørt verandi skipan við barnaverndarnevndum og barnaverndarumsitingum skuldi halda fram, ella um barnaverndarnevndirnar áttu takast av.

Hóast arbeiðsbólkurin, sum endurskoðaði barnaverndarlógina í 2011, metti, at best var at halda fast við verandi skipan við barnavernarnevndum og barnaverndarumsitingum, so metir hesin arbeiðsbólkurin, at tað eigur at vera kannað nærri, um verandi skipan er tann besta, serliga tá havt verður í huga, at okkara land er so lítið.

Í sambandi við eftirmetingina í 2011, varð ásett, at hvørt barnaverndarøki í minsta lagi eigur at hava 3.000 íbúgvar. Mett varð, at við at gera økini størri, fór fakliga støðið eisini at styrkjast.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at kannað verður, um fyrimunir høvdu verið við at leggja øll økini saman í eitt. Av tí at talan er um fjøltáttaðar, torgreiddar og samansettar trupulleikar, er eisini neyðugt, at barnaverndartænasturnar hava fjøltáttaðar førleikar. Í Noregi vísa eitt nú frágreiðingin: "Kompetanseutvikling i barnevernet"[9] og vísindaliga greinin: "Hjelpetiltak i barnevernet – komplekse problemer og usikre virkninger"[10], at neyðugt er at leggja nógv størri dent á gransking av, hvussu ymisk tiltøk virka í tí høpi, sum tey vera framd í eins og tað hevur týdning at leggja dent á fjølbroyttar førleikar, tá ræður um barnavernd, eitt nú persónligar førleikar, samskiftisførleikar, fakligar førleikar, etiskar førleikar og fyrisitingarligar førleikar. Hetta hevði í størri mun borið til í Føroyum, um barnarverndarøkini vórðu løgd saman í eitt øki.

Barnaverndin, og Almannamálaráðið eiga eisini at leggja størri dent á at fremja og brúka gransking sum liður í skipanarliga arbeiðinum og førleikamenningini. Tað eigur at vera ein styrki og fyrimunur fyri øll, um arbeiðið í størri mun varð granskingar- og vitanargrundað. Hetta er nærri viðgjørt í Kapittul 10, har m.a. verður mælt til at fremja eina granskingarætlan um ung við samansettum trupulleikum.

[9] NOU 2009:8

[10] Fontene Forskning 2/2017 s. 45-58 (Fauske, Kvaran, Lichtwarck: Hjelpetiltak i barnevernet

**Tilmæli 1**
**Endurskoða barnaverndarøkið**

- Endamálið við átakinum er at kanna, um barnaverndartænasturnar virka nóg væl, um barnaverndarøkini eiga at leggjast saman í eitt øki, um skipanin við barnaverndarnevndum er tíðarhóskandi, og um barnaverndartænasturnar í nóg stóran mun eru lagaðar til tað føroyska samfelagið.
- Mettur kostnaður: Eftirmetingin í sjálvum sær hevur ikki við sær útreiðslur av týdningi. Átøk, sum koma frá niðurstøðum og tilmælum, kunnu tó í longdini hava við sær útreiðslur.
- Ábyrgdari: Almannamálaráðið (AMR).
- Tíðarætlan: Farið verður undir at endurskoða barnaverndarlógina í 2022/23. Ein granskingar-verkætlan at kanna nøkur mál (m.a. barnaverndarmál), sum ikki eru rætt handfarin, fer í gongd í 2023. Endurskoðanin og granskingarverkætlanin hava so ávirkan á, hvussu økið skal skipast frameftir.

## Sernám

Sernám veitir ráðgeving í sernámsfrøðiligum viðurskiftum til dagstovnar, skúlar og foreldur, sum varða av børnum og ungum.

Sernám hevur eina stóra uppgávu, tí tørvurin á serundirvísing og sálarfrøðiligari ráðgeving og hjálp tykist ikki at minka, men heldur er eftirspurningurin eftir hjálp vaksandi. Serliga er stórur eftir-spurningur eftir hjálp til næmingar, sum hava sálarligt órógv ella trivnaðarligar avbjóðingar og teir næmingar, sum av ymsum orsøkum ikki megna at vera í skúla (skúlaaftran). Harumframt hevur Sernám týðandi uppgávur á øðrum økjum sum t.d. í sambandi við lesitarn, orðblindni, adhd og autismu.

Sernám megnar ikki, sum er, at nøkta allan eftirspurning eftir ráðgeving, sum eisini er fjølbroytt og fevnir um nógv ymisk evni og ymiskar málbólkar. Tað er ein vaksandi trupulleiki, at bíðilistarnir leingjast. Hetta ger, at alsamt fleiri børn og ung verða noydd at bíða eftir tí sernámsfrøðiligu og sálarfrøðiligu tilgongd og hjálp, sum tey hava tørv á.

Avbjóðingin hjá Sernámi snýr seg í høvuðsheitum um, at talið av uppgávum er størri, enn verandi starvsfólkahópur megnar at loysa. Virksemið á Sernámi verður skipað við sernámsfrøðiligum fundum og átaksætlanum. Foreldur kunnu eisini venda sær til Sernám, men fáa tá upplýst, at mannagongdin er, at tey skulu venda sær til skúlan ella stovnin, har barn teirra er. Er talan um børn, sum eru heima ella um smábørn, ið ikki eru farin á dagstovn, er møguleiki hjá barnadeildini, kommunulækna ella heilsufrøðingi at seta seg í samband við Sernám. Til sernámsfundir skulu dagstovnar og skúlar raðfesta, hvat verður umrøtt á sernámsfundum. Hetta merkir, at stovnar og skúlar í nógvum førum mugu avmarka seg til, hvørji mál tey kunnu fáa ráðgeving til á einstaka fundinum. Hini málini mugu stovnar og skúlar loysa innanhýsis ella bíða til næsta fund.

Tað er uppgávan hjá barna- og ungdómspsykiatriini at útgreina børn og ung. Sernám kann ávísa børnum til barna- og ungdómspsykiatriina, men hetta verður einans gjørt sum ein partur av eini tilgongd. Hetta merkir, at Sernám saman við skúla/dagstovni altíð setur átøk í verk fyrst. Tilgongdin

til barna- og ungdómspsykiatri kann tí gerast longri umvegis Sernám. Ávísingar frá Sernámi fara í somu bíðirøð sum ávísingar frá kommunulækna.

Sernám hevur í mong ár umsitið játtanina til serligan tørv í fólkaskúlanum, men henda skipan er broytt soleiðis, at tað er undirvísingarstýrið, sum játtar skúlunum tímar til sernámsfrøðiliga undirvísing og til serligan tørv. Á dagstovnaøkinum eru tað kommunurnar, sum játta dagligga raksturin av dagstovnunum í kommununi, og uppi í hesum er eisini serstøk játtan til serligan tørv.

Seinastu árini hevur Sernám arbeitt við, hvussu verandi játtan og harvið starvsfólkaorka verður brúkt skilagott og munadygt[11]. Arbeitt verður eisini við at betra samstarvið við aðrar skipanir á barna- og ungdómsøkinum. Sernám nýtir umleið somu játtan til ávikavist dagstovna- og fólkaskúlaøkið.

Tú fært ikki eina fullfíggjaða mynd av samlaðu játtanini til serøkið við at eftirkanna, hvussu útreiðslurnar hjá Sernámi eru býttar millum fólkaskúlan og dagstovnaøkið. Játtaðar verða upphæddir gjøgnum aðrar skipanir og á øðrum kontum á fíggjarlógini bæði til fólkaskúlaøkið og til dagstovnaøkið.

Nógvir hoyringarpartar, bæði stovnar og feløg, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við, vísa á, at tað er alneyðugt at eftirkanna sernámsfrøðiliga økið og leiklutin hjá Sernámi, eisini við atliti at, at Sernám átti at havt ein størri leiklut sum greiningar- og viðgerðarstovnur.

Landsstýrismaður í undirvísingarmálum leggur stóran dent á, at sernámsfrøðiliga økið er skipað so væl sum til ber. Hann hevur í skrivligum fyrispurningi í tinginum víst á, at kannað verður, um tað ber til at skipa viðurskiftini øðrvísi, og, um neyðugt er at gera umraðfestingar[12.]

Neyðugt er at greina økið nærri, bæði við atliti at tí stóra tørvi, sum skúlarnir vísa á viðvíkjandi sálarfrøðiligari hjálp til børn og ung og viðvíkjandi sernámsfrøðiligum átøkum sum heild.

Mælt verður tí til, at hetta arbeiðið verður sett í verk beinanvegin. Nógvar ábendingar eru um, at næmingar bíða alt ov leingi eftir at fáa hjálp, og hetta er til stóran bága fyri bæði læring og trivnað eins og møguleikar fyri seinni at fáa sær útbúgving og arbeiði.

Tá næmingar ikki fáa ta hjálp, teimum tørvar og ikki luttaka í góðum sosialum felagsskapi, eru hetta greið vandatekin, sum eisini økja um sannlíkindini fyri rúsevnismisnýtslu seinni í lívinum.

---

[11] Sí fylgiskjal x, talva yvir hvussu arbeiðsorkan hjá Sernám er býtt uppá ymiskar fakbólkar á s.

[12] Svar uppá skrivligan § 52 a fyrispurning til landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum dagfest 6. mai 2021

**Tilmæli 2**
**Endurskoða Sernám**

- Endamálið við endurskoðanini er at lýsa sernámsfrøðiligu skipanina við tí fyri eyga at kanna, um Sernám umframt sernámsfrøðiliga ráðgeving kann átaka sær greiningararbeiði og veita skúlum sernámsfrøðiliga og sálarfrøðiliga hjálp. Ein fyritreyt fyri, at Sernám skal megna at røkja tær fjølbroyttu uppgávurnar, sum stovnurin hevur, er, at Sernám áhaldandi fær umstøður at menna og styrkja servitanina í Sernámi.
- Mettur kostnaður: Partur av eftirmetingini kann verða skipað innanhýsis í samstarvi millum Uttanríkis- og mentamálaráðið (UMMR), Undirvísingarstýrið og Nám. Møgulig kanning og greining verður mett at kosta kr. 500.000.
- Ábyrgdari: Uttanríkis- og mentamálaráðið (UMMR).
- Tíðarætlan: Arbeiðið verður framt í 2022-24.

## Gigni – heilsufrøði til børn og ung

Ásett er í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, at at øll børn skulu fáa tilboð um heilsukanningar frá heilsufrøðingi frá føðing, til undirvísingarskyldan endar. Endamálið við tænastum frá Gigni er fjølbroytt. Tað snýr seg bæði um, at fremja heilsu og fyribyrgja sjúku, at styrkja og menna foreldraførleikan, umframt at trivnaðar- og menningartrupleikar verða avdúkaðir og viðgjørdir skjótast tilber. Tær fyribyrgjandi heilsutænasturnar til børn og ung skulu gera sítt til at tryggja teimum best møguligar fyritreytir fyri einum heilsugóðum uppvøkstri og vaksnamannalívi.

Tilboðið frá Gigni til pinkubarnafamiljur verður skipað við heimavitjan. Hetta hevur við sær, at heilsufrøðingarnir í Gigni eru í eini serligari støðu, tí hetta er einasti fakbólkur, sum kemur í heimið hjá familjum við smábørnum. Í sambandi við heimavitjanina eygleiðir og kannar heilsufrøðingurin barnið og ráðgevur og vegleiðir foreldrini um sálarligu, sosialu og likamligu menningina hjá barninum. Eisini ráðgevur heilsufrøðingurin um foreldraleiklut og -tilknýti. Vísir eygleiðingin ella kanningin, at barnið hevur serligan tørv, kann heilsufrøðingurin veita eyka ráðgeving til familjuna. Eisini ber til at ávísa til ella samstarva við pedagogiskan, sosialan ella læknaligan serkunnleika, um tað er neyðugt.

Gigni hevur greitt frá, at flest allar familjur loyva heilsufrøðingum á heimavitjan, og at tey hava eitt gott samstarv við familjurnar.

Børn, sum eru farin í forskúla, og børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri fáa tilboð um fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningar hjá heilsufrøðingi. Heilsufrøðingurin skal bjóða vegleiðing um heilsu, menning og trivnað. Hesi tilboð verða veitt børnum og ungum á skúlanum, har tey ganga. Hesi tilboðini eru til tey, sum eru í undirvísingarskyldugum aldri, og eru næmingar í 10. flokki, eftirskúlum og miðnámsskúlum tí ikki fevnd av teimum. Hesi kunnu tó í serligum førum fáa tilboð frá Gigni.

Bæði Gigni og fleiri av hoyringspørtunum hava ført fram, at tað hevði verið skilagott um fleiri heilsufrøðingar vóru á skúlunum, og tilboðini frá teimum vóru víðkað til at fevna um enn fleiri øki og til eisini at fevna um miðnámsskúlar. Sum dømi hevur verið ført fram, at tað við hvørt er léttari

hjá børnum og ungum at tosa við ein heilsufrøðing um trupul evni, og heilsufrøðingar hava førleikar at tosa um kenslusamar spurningar. Um fleiri heilsufrøðingar starvast á skúlunum, verður tann fakliga breiddin í skúlunum styrkt. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hoyringspørtunum og heldur, at tað er skilagott at víðka tilboðini hjá Gigni og seta fleiri heilsufrøðingar í starv í skúlunum.

Á hoyringarfundi hevur Gigni víst á, at tørvur er á einum lág-gáttartilboðið ímillum Gigni og Barnavernd, sum kann verða við til at styrkja og menna foreldraleiklutin.

Arbeiðsbólkurin metir, at tá tosað verður um at seta tíðliga inn, hava heilsufrøðingarnir ein kjarnuleiklut. Heilsufrøðingar kunnu síggja tekin um mistrivnað tíðliga, og ofta áðrenn trupulleikar sleppa at vaksa seg stórar. Tað er tí skilagott at styrkja og økja um tilboðini, sum Gigni kann veita barnafamiljum.

Arbeiðsbólkurin heldur, at Gigni kundi luttikið í enn fleiri tvørgeiraligum átøkum, eitt nú saman við Barnaverndini, Almannaverkinum, Psykiatriska deplinum, Barnapykiatriini, Dugna og Fountain-húsinum – serliga tá talan er um hjálp við foreldraførleika ella menningaravbjóðingar.

**Tilmæli 3**
**Styrkja og víðka um tilboðini um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**

- Endamálið er at veita barnafamiljum, børnum og ungum enn betri tilboð um fyribyrgjandi heilsutænastur og harvið viðvirka til fyribyrgja skeivari menning.
- Mettur kostnaður: Umleið kr. 2 milliónir at seta í starv fýra heilsufrøðingar afturat.
- Ábyrgdari: Heilsumálaráðið (HMR).
- Tíðarætlan: 2024

## SSP

SSP er eitt skipað tvørfakligt samstarv millum fakbólkar, ið arbeiða við børnum og ungum. SSP hevur sín uppruna í Danmark, og navnið er ein stytting fyri samstarvsfelagarnar í SSP-samstarvinum, sum eru **S**kúli, **S**osialir myndugleikar og **P**oliti.

SSP samstarvið í Føroyum er skipað við íblástri úr Danmark, men tó skipað nakað øðrvísi enn í Danmark. Tey, sum eru við í SSP samstarvinum í Føroyum, eru Uttanríkis- og mentamálaráðið, Almannamálaráðið, Kommunufelagið og Føroya Politi.[13] Endamálið við SSP-samstarvinum er at savna, samskipa og fremja felags fyriskipanir, sum skulu fyribyrgja kriminaliteti og skaðandi atburð millum børn og ung.

SSP samstarvið varð sett á stovn í Føroyum í 2008. Virkisøkið var upprunaliga kriminalitets-fyribyrgjandi og varð ætlað næmingum í framhaldsdeildini í fólkaskúlanum. Síðani stovnanina er

[13] Heilsumálaráðið var við til at stovna SSP samstarvið í Føroyum, men tók seg úr samstarvinum í 2017.

virkisøkið víðkað. Virkisøkið hjá SSP fevnir nú um øll børn og ung millum 0-18 ár. Á heimasíðuni hjá SSP verður endamálið við samstarvinum lýst soleiðis (www.ssp.fo):

> "Endamálið við SSP-samstarvinum er at byggja upp, brúka og røkja faklig netverk, sum hava eina mennandi ávirkan á gerandisdagin hjá børnum og ungum. Við at skipa fyri mennandi og uppbyggjandi átøkum fyri hesar aldursbólkar, verður eisini slóðað fyri einum góðum barna- og ungdómslívi.
>
> Ásannandi, at lívsførleikar okkara verða mentir í felagsskapi við onnur, verður dentur lagdur á, at øll børn og ung koma upp í part og saman við øðrum fáa treysti og mótstøðuføri, ið so hvørt ger tey til ábyrgdarfullar samfelagsborgarar. Hetta er samstundis besti hátturin at byrgja fyri eini óhepnari kós, sum kann elva til lógarbrot og skaðandi atburð millum børn og ung.
>
> Almenningurin er ein sera týðandi viðspælari hjá SSP-samstarvinum, og eigur virksemið tí eisini at venda sær til foreldur og onnur, ið standa barninum nær."

Hoyringarpartar, sum hava luttikið í arbeiðinum við hesi heildarætlan, hava verið ymiskir á máli um SSP-samstarvið í Føroyum.

Nakrir av hoyringarpørtunum hava latið væl at SSP-samstarvinum, ímeðan fleiri av teimum, sum arbeiða við ungum fólki, halda, at ov nógv fokus er á børn undir skúlaaldur, samstundis sum ov lítil dentur verður lagdur á átøk viðvíkjandi ungum og avbjóðingum teirra.

Fleiri hoyringarpartar hava gjørt vart við, at tey halda, at rúsevni eru ein ov lítil partur í arbeiðinum hjá SSP. Teir mæla til, at í skúlunum eigur SSP at hjálpa til við at leggja størri dent á upplýsingararbeiðið um rúsevni. Yvirhøvur halda nógvir hoyringarpartar, at SSP-samstarvið er ov lítið sjónligt í skúlunum.

Sum dømi um munin millum SSP í Føroyum og Danmark, og hví, tey halda, at SSP í Føroyum ikki raðfestir rætt, nevna hoyringarpartar kanningar um viðurskiftini hjá teimum ungu. Her vísa tey m.a. á sonevnda "Ungeprofilundersøgelsen", sum er ein spurnarkanning millum ung í aldrinum 12-30 ár, ið verður gjørd á hvørjum ári. Henda kanning hevur til endamáls at fáa vitan til vega um trivnað, heilsu, lívsáskoðanir og lívsstøðu hjá ungum umframt at verða við til at styrkja fyribyrgjandi tiltøkini í og millum kommunur. Á henda hátt ber til at fáa neyðuga vitan til vega, um hvørjar avbjóðingar og trupulleikar, tey ungu hava at dragast við. Við støði í hesum ber til at fáa vitan um hvørji tiltøk, tørvur er á at seta í verk til tess at minka um ella basa trupulleikunum hjá teimum ungu.

Fleiri av hoyringspørtunum hava víst á, at tað er ein missur fyri SSP-samstarvið, at heilsufrøðingar ikki luttaka í arbeiðinum, tí heilsufrøðingar starvast bæði á smábarnaøkinum og í skúlunum. Heilsufrøðingar tosa javnan við tey ungu og veita teimum ráðgeving um heilsu og trivnað. Hoyringspartarnir mæla til, at heilsufrøðingar aftur verða partur í SSP-økisbólkunum.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er týdningarmikið at hava eitt skipað samstarv millum viðkomandi myndugleikar, tá ið ræður um fyribyrgjandi átøk, herundir um átøk at fyribyrgja sosialum trupulleikum, rúsevnisnýtslu og at fremja onnur kriminalitetsfyribyrgjandi átøk.

Arbeiðsbólkurin heldur tó, at SSP-samstarvið, sum nú hevur virkað í fleiri enn tíggju ár, átti at vera endurskoðað. Mett eigur at vera um virkisøkið, samskipan, aldursmørk, bygnað, staðseting og samstarvsfelagar. Mælt verður til at seta ein arbeiðsbók at eftirmeta arbeiðið hjá SSP og gera uppskot til møguligar broytingar. Hoyringarpartar hava víst á tørvin á samstarvi við fleiri tilboð og tænastur fyri at betra um vitanargrundarlagið og møguleikan fyri at gera meiri málrættaði átøk.

SSP-samstarvið er eitt samstarv millum myndugleikar. Tá farið verður undir at endurskoða SSP-samstarvið eigur at verða umhugsað, á hvønn hátt SSP møguliga kann samstarva við aðrar samstarvsfelagar t.d. Barnabata, Megna títt lív, DAT-ung og Náttarravnarnar.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at arbeiðið at endurskoða SSP-samstarvið verður lagt til Uttanríkis- og mentamálaráðið, av tí at hetta stjórnarráð umsitur bæði fólka- og miðnámsskúlar og dagstovnaøkið. Mælt verður somuleiðis til, at arbeiðsbólkurin verður settur á heysti í 2022, og at miðað verður eftir at handa landsstýrismanninum í Uttanríkis- og mentamálum frágreiðing við uppskotum og tilmælum á vári 2023. Arbeiðsbólkurin eigur at vera mannaður við umboðum fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Politiið og Kommunufelagið. Hesi kunnu síðani bjóða øðrum við á fund eftir tørvi.

Arbeiðsbólkurin mælir til at skipa tvey nýggj samstørv, SSP+ og PSP. Hesi samstørv verða viðgjørd í partinum um tvørgeiraligt samstarv.

**Tilmæli 4**
**Endurskoða SSP-samstarvið sum heild og koma við uppskotum um møguligar broytingar**

- Endamálið við arbeiðinum er at eftirmeta SSP-samstarvið, endamál og úrslit, tilfeingi og tørv, bygnað, staðseting og samstarvspartar.
- Mettur kostnaður: Arbeiðstíð /-løn hjá teimum, sum manna bólkin.
- Ábyrgdari: UMMR tekur stig til arbeiðið. Aðrir partar eru m.a. Kommunufelagið, AMR og Politiið.
- Tíðarætlan: Arbeiðið kann byrja í 2022, so møguligar tillagingar kunnu verða settar í verk í august 2023.

## Tann góða tilgongdin

Tann góða tilgongdin er ein leistur, sum tryggjar einari familju, sum hevur eitt barn við diagnosu á autismuspektrinum (ella illgruni er um hetta) eina góða og samskipaða tænastu frá tí almenna geiranum. Talan er sostatt um eitt samstarv millum almannaverk, heilsuverk, skúlaverk og kommunur, har Almannaverkið hevur tann samskipandi leiklutin.

Tann góða tilgongdin er skipað soleiðis, at ein netverksfundur verður hildin einaferð um árið í tí mánaðinum, sum barnið fyllir ár. Foreldrini hjá barninum avgera, um fundurin verður hildin, og hvat skal umrøðast. Umboð fyri fleiri geirar luttaka á fundinum, men tó luttekur psykiatriski depilin bert á tí fyrsta fundinum, uttan so at okkurt serligt ger seg galdandi. Onkur nevndi á hoyringarfundi, at ikki allir viðkomandi partar møttu á netverksfundi. Hetta er sjálvsagt harmuligt, men umboð fyri Almannaverkið hevur greitt frá, at hetta ikki er nakar vanligur trupulleiki. Tó kundi verið ynskt, at partarnir tóku størri ábyrgd og ognarskap av skipanini.

Á fyrsta fundinum gera partarnir eina virkisætlan fyri barnið, sum so verður dagførd so hvørt. Á henda hátt vita allir partar, hvør teirra uppgáva er. Onkrir hoyringarpartar hava tó gjørt vart við, at foreldrini ikki altíð megna at halda skil á, hvørji evni eiga at umrøðast. Arbeiðsbólkurin metir, at tað kundi verið

skynsamt, um samskiparin hjá Almannaverkinum, umrøður evnini við foreldrini, áðrenn fundin og soleiðis fær vegleitt foreldrini, um tey ivast í, hvørji evni eiga at tikin fram á netverksfundinum. Hetta skal tó verða gjørt soleiðis, at ætlanin og dynamikkurin í tilgongdini ikki verða ávirkað.

Sambært avtaluni um ta góðu tilgongdina skuldi ein eftirmeting verið gjørd í 2017, og skipanin átti at verið víðkað til aðrar bólkar (sum t.d. ADHD) í 2015. Almannamálaráðið hevur upplýst, at henda eftirmeting verður gjørd fyrst í 2022, og har verður m.a. arbeitt við ætlanunum um, at tann góða tilgongdin eisini eigur at fevna um aðrar bólkar enn autismu t.d. ADHD.

Arbeiðsbólkurin heldur, at høvuðstankarnir aftanfyri tí góðu tilgongdina og mannagongdirnar kunnu brúkast til at gera eitt samskipað tilboð til persónar, sum eru komnir burturúr ella skulu hjálpast burturúr einum misbrúki. Hetta hongur í ávísan mun saman við tilmælunum um at stovna eitt PSP-samstarv (Tilmæli 42) og tilmælið um at skipa viðurskiftini kring børn og ung við diagnosum betur (Tilmæli 39, 40 og 41).

**Tilmæli 5**
**Eftirmeta og víðka Ta Góðu Tilgongdina**

- Endamálið er at tryggja, at TGT virkar eftir ætlan og at gera tær tillagingar, sum verða mettar neyðugar. Hetta fevnir eisini um fyrireikandi arbeiðið at víðka tilboðið, so tað fevnir um aðrar bólkar enn tey við autismu. Ein liður í eftirmetingini eigur at vera at kanna, hvussu tryggjast kann, at tey "røttu" evnini verða umrødd á netverksfundunum. Somuleiðis eigur at verða kannað, hvussu ymsu partarnir kunnu taka størri ábyrgd og ognarskap fyri skipanini.
- Mettur kostnaður: Sjálvt endurskoðanararbeiðið kostar í sjálvum sær einki, men møguligar loysnir kunnu hava kostnað við sær.
- Ábyrgd: AMR.
- Tíðarætlan: Arbeiðið byrjar á heysti 2022.

## Megna títt lív

Megna títt lív (MTL) byrjaði virksemið í 2019. Tilboðið er staðsett í Almannaverkinum, men er eitt tvørgeiraligt átak, sum er skipað sum eitt tilboð til ung við samansettum trupulleikum. Hetta merkir, at denturin verður lagdur á at hjálpa ungum við svárum sosialum ella sálarligum trupulleikum, sum samstundis hava álvarsligar trupulleikar av rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu. Ein kjarnuuppgáva hjá MTL er at vera bindilið millum ungar borgarar og myndugleikar og harvið tryggja sambandið við røttu myndugleikarnar og tilboðini. Á henda hátt verður arbeitt fyri, at borgarin fær mest møguligar ágóðar og hjálp til at megna sítt lív.

MTL roynir at skapa positivar upplivingar, sum eru grundaðar í góðum relatiónum og á góðum fakligum grundvølli. Fyri MTL er tað týdningarmikið, at arbeiðið ikki steðgar upp í stirvnum skipanum ella truplum formalitetum. Nógvir borgarar detta ímillum skipanirnar, tí teir hava samansettar trupulleikar og hava ikki orku ella innlitið til at fáa røttu hjálpina, ella teir verða avvístir, tí trupulleikarnir eru so fjøltáttaðir, at skipanirnar ikki halda seg eiga ábyrgdina.

5 fólk arbeiða við hesum tilboði, og í løtuni hjálpa tey millum 12 og 15 fólkum beinleiðis og ofta. Men netverkið av fólkum, sum fáa hjálp, er umleið 30 fólk. Umboð fyri MTL hava greitt frá, at til ber at víðka um tilboðið. Arbeiðsbólkurin mælir í fleiri førum til átøk, har MTL er náttúrligur samstarvspartur. Millum hesi eru PSP-skipan, SSP+-skipan, tilhaldsstað fyri ung, ávegishús (halfway house), og eitt viðgerðarstað, sum liggur burturfrá, eins og MTL kundi verið ein týðandi samstarvspartur í arbeiðinum at finna hóskandi tilboð og loysnir til ung við dupultdiagnosum. Harumframt hevur umboð fyri MTL greitt frá, at eitt samstarv millum MTL og SSP kundi verið gagnligt, tí SSP hevði fingið betri innlit í støðuni hjá sosialt útsettum ungum misnýtarum, og MTL hevði fingið betri innlit og kanska ávirkan á arbeiðshættir og tilfar hjá SSP. Alt hetta kann hava við sær, at MTL sum frá líður fær tørv á fleiri starvsfólkum.

Á fundi greiddu umboð fyri MTL frá, at millum høvuðstrupulleikarnir, sum tey síggja, eru bústaðarviðurskifti og viðgerð fyri rústrupulleikar. Nógv fólk eru læst í sera truplum og ósunnum sambondum, tí tey ongastaðni hava at fara – og tey hava ongan møguleika at finna sær sín egna bústað. Arbeiðsbólkurin mælir í Kapittul 7 (Tilmæli 45) til, at gera eitt tilhaldsstað (eitt slag av herbergi) fyri ung, og hetta kundi hjálpt nógvum av teimum, sum liva undir ótryggum viðurskiftum – um ikki annað soleiðis, at tey høvdu eitt stað at rýma til, eitt andarúm.

Um ynski er at betra um tilboðið hjá MTL og styrkja innsatsin, hevur MTL størst tørv á fysiskum kørmum – matriklum. Tá MTL byrjaði sum verkætlan, væntaðu nógvir partar, at tað fór at vera ein fyrimunur, um MTL ikki varð bundið at ávísum matrikli. Men av tí, at so nógvir av teirra brúkarum hava ótrygg bústaðarviðurskifti ella eru illa fyri sálarliga og likamliga, kundi hjálpin verið betri, um MTL høvdu nøkur høli (nøkur kømur), sum tey kundu brúka ella leigað frá øðrum pørtum. Ein hægri játtan til MTL hevði tí gjørt størst mun, um hetta kom í lag. Harafturat eigur at verða kannað, um heimildirnar, hvussu MTL kann brúka sína játtan, eru nøktandi og ikki ov avmarkaðar.

**Tilmæli 6**
**Økt játtan og víðari heimildir til Megna títt lív**

- Endamálið við átakinum er, at MTL kann veita fleiri persónum hjálp. MTL hevur royndir at arbeiða við ungum fólkum við samansettum trupulleikum, og ein kjarnuførleiki er at arbeiða tvørtur um geirar og fakmørk. Tørvurin á hesum øki er stórur, og við øktari játtan kundu enn fleiri fólk fingið gagn av tilboðnum hjá MTL. Men størsti tørvurin hjá MTL er hava atgongd til ella kunna leiga fleir høli/bústaðir til brúkararnar.
- Mettur kostnaður: kr. 1.120.000.
- Ábyrgdari: AMR.
- Tíðarætlan: 1. januar 2023.

## Trivnaður

So at siga allir hoyringarpartar, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við, hava lagt dent á, at eitt barn ella unglingi, sum trívist, er í nógv minni vanda fyri at misbrúka rúsevni. Trivnaður er sostatt eitt lyklaorð, tá ið vit tosa um at fyribyrgja rúsevnismisnýtslu í breiðum høpi.

Fólkuheilsuráðið framdi í 2015 eina størri kanning av heilsustøðu føroyinga, sum kallaðist "Hvussu hevur tú tað?" 2200 fólk svaraðu spurningunum, og kanningin vísti, at umleið ein fjórðingur av ungum millum 18 og 29 ár søgdu seg hava ringa sálarliga heilsu. Hetta samsvarar væl við, at nakrir hoyringarpartar hava greitt frá, at alsamt fleiri ung mistrívast og hava trupult við at megna gerandisdagin. Rúsevnini koma aloftast ístaðin fyri okkurt annað – so sum sunn og mennandi sambond og tilknýti.

Onkur hoyringarpartur hevur sagt, at hjá nógvum av teimum, sum fáa álvarsligar trupulleikar seinni í lívinum, bar tað væl til at rokna hetta út 20 ár frammanundan. Henda útsøgn og sannleikin aftan fyri eru ræðandi. Um vit skulu fyribyrgja rúsevnistrupulleikum, mugu vit tí fyribyrgja, at trupulleikarnir íkoma ella sleppa at vaksa seg til eitt støði, sum er lemjandi. Tað vil siga, at vit mugu seta inn tíðliga.

Hetta krevur millum annað, at tey, sum eru um børn og ung, fáa neyðug amboð og førleikar at gerast varug við mistrivnað tíðliga, áðrenn trupulleikarnir gerast ov stórir.

Eisini er neyðugt, at børn og ung hava støð, har tey kunnu venda sær, tá ið tey hava trupulleikar.

Vit mugu í nógv størri mun eggja og játta pening til gransking, soleiðis at vit fáa eina so góða mynd av støðuni, trivnaðinum og avbjóðingunum sum gjørligt. Eisini eiga vit at leggja størri dent á at granska, hvussu ymisk tiltøk virka í tí høpi, sum tey verða framd, serliga tá ið ymiskar fyriskipanir verða settar í verk.

Yvirhøvur mugu vit leggja dent á fyribyrging og trivnað, soleiðis at børn og ung hava eitt trygt umhvørvi.

## Trivnaður og skúlaungdómur

Menning, læring og trivnaður hanga saman. Um barnið ikki mennist og lærir, er skjótt vandi fyri, at útlitini fyri góðum trivnaði versna, og at barnið missir sjálvsvirði og hevur ilt við at kenna seg sum part av flokkinum og finna vinir. Men samanhangurin kann eisini ofta vera øvugtur, so at vantandi trivnaður ella sjálvvirði kann forða fyri góðari læring og menning. Tað er tí av stórum týdningi, at skúlin og foreldrini gera alt tað, tey kunnu, so at børn, ið hava tað trupult, eru partur av felagsskapinum í skúlanum, røkja skúlagongdina og luttaka í frítíðarvirksemi. Tað er sera umráðandi at ansa eftir, at barnið luttekur og ikki kennir seg uttanfyri felagsskapin.

Tað eru so nógv ymisk viðurskifti, sum kunnu vera orsøk til, at børn ikki trívast og byrja at hava fráveru frá skúla og øðrum virksemi. Orsøkirnar kunnu vera sosialar og fakligar avbjóðingar, eisini angist, stúran og hendingar í lívinum hjá barninum og familjuni. Hjúnarskilnaður, sjúka, harðskapur og ymisk trauma kunnu gera, at børn og ung hava trupult at luttaka í einum felagsskapi og knýta vinabond. Harumframt eru tað nøkur, sum hava ymisk menningarórógv, eitt nú ADHD ella autismu, sum ger, at tey hava ilt við at hugsavna seg og luttaka í einum størri felagsskapi. Relatiónir millum næming og lærara og millum næmingar sínámillum hava ávirkan á trivnaðin, og serliga hevur happing stór árin, sum kunnu fylgja næminginum alt lívið. Vánaligur trivnaður, angist og einsemi kunnu hava nógvar avleiðingar og økja um vandan fyri at fáa rúsevnistrupulleikar.

Seinnu árini er rákið vorðið, at vit sum samfelag leggja dent á eina avriksmentan, har einstaklingurin er í miðdeplinum: Tú skalt vera tann besti ella í hópinum við teimum bestu, elituni – bæði í skúla, ítrótti, tónleiki – og harafturat eru fyrimyndir um, hvussu tú skalt síggja út. Ikki øll megna at fylgja

við orsakað av persónligum førleikum, baklandi og fíggjarstøðu, og nøkur orka ikki hesa strembanina, hóast tey kunnu fylgja við. Vit síggja ung, sum eru væl fyri fakliga, sum leggja frá sær, tí tey antin ikki orka ella halda seg ikki megna at at liva upp til avbjóðingarnar og krøvini, sum verða sett í samfelagi og skúla.

Spurningurin er, um ov lítil dentur verður lagdur á felagsskapin, sum vit tosa so nógv um og ynskja at skapa í lívinum hjá børnum og ungum bæði við atliti at skúla, frítíðarlívi og vinum. Her hava vit sum samfelag ein stóran leiklut bæði at skapa umstøður fyri luttøku hjá øllum og at hugsa um, hvørjar fyrimyndir, vit leggja dent á.

---

*Í einum stórum skúla er lættari at detta niðurímillum, at gerast ósjónligur og ikki koma til orðanna. Í teimum smærru skúlunum eru størri sannlíkindi fyri at verða sæddur. (næmingur á miðnámi)*

---

Í Føroyum hevur rákið seinastu árini verið at byggja alsamt størri skúlar og skipa størri eindir. Hetta hevur heilt víst sínar fyrimunir, m.a. tí at umstøðurnar fyri at bjóða fleiri og meiri fjølbroyttar lærugreinar verða betri, og til ber at hava fleiri hentleikar og serútgjørdar skúlastovur. Eisini hevur verið ført fram í hesum sambandi, serliga tá ið talan hevur verið um fólkaskúla, at í einum stórum skúla, hava næmingarnir betri møguleika at finna sín javnlíka enn í einum lítlum skúla, og at í stórum skúlum kunnu lærarar í stóran mun undirvísa í sínum linjulærugreinum, meðan lærarnir í einum lítlum skúla mugu undirvísa í nógvum ymsum lærugreinum. Men stórar eindir hava eisini nakrar vansar við sær, og lítlu skúlarnir hava nakrar avgjørdar styrkir. Næmingar hava greitt arbeiðsbólkinum frá, at í einum stórum skúla er lættari at detta niðurímillum, at gerast ósjónligur og ikki koma til orðanna. Í teimum smærri skúlunum eru størri sannlíkindi fyri at verða sæddur, og átti næmingurin tí skjótari at kunna fingið hjálp, har tað er tørvur á tí.

Næmingaráðini á miðnám og aðrir hoyringarpartar hava greitt frá, at ikki øll trívast í teimum stóru eindunum. Tey siga, at fleiri kenna órógv, tá karmarnir gerast ov stórir, og fólkini í stovuni ov nógv, samstundis sum stóru glasveggirnir gera alt enn størri og meiri opið. Á hoyringarfundunum við m.a. næmingarráðini hoyrdi arbeiðsbólkurin nógvar góðar søgur um og úr smærri skúlunum, sum t.d. miðnám í Vestmanna, Suðuroy og Klaksvík, tí har søgdu næmingarnir seg kenna, at teir vórðu sæddir og lættari kundu byggja upp sterk sambond við hinar næmingarnar og lærararnar.

Tað ber til at læra av royndunum við smærri skúlunum, tá arbeiðið verður skipað í stóru skúlunum. Arbeiðsbólkurin hevur hoyrt nógvar góðar søgur um, hvussu næmingar á Glasi hava havt møguleika at arbeiða í smærri bólkum og serliga, hvussu til ber at leggja ætlanir, so hond kann takast um næmingar, sum hava brúk fyri eitt sindur av eyka stuðli ella umsorgan. Her kunnu vit nevna ADHD-bólkar sum eitt gott dømi.

Fyritreytin fyri at trívast og vera eggjaður til at luttaka í arbeiðinum í skúlanum er at hava nakrar góðar upplivingar. Skúlarnir skulu vera fyri **allar** næmingar, og tí hevur tað stóran týdning at stuðla næmingunum, at leggja merki til teir á ein jaligan hátt og geva teimum rós og tileggjan, har tað er uppiborið. Skúlarnir mugu tryggja fjølbroytni í lærutilgongdum og lærugreinum. Øll hava tørv á at eydnast og duga okkurt væl, og her hava tær kreativu og handaligu lærugreinirnar og ítróttur ein umráðandi leiklut, so at vit kunnu geva einum størri skara av næmingum góðar upplivingar, sum teir

kanska ikki altíð fáa í teimum siðbundnu bókligu lærugreinunum. Nógvar av kreativu lærugreinunum hava ta eyka styrkina, at har sjáldan eru røtt ella skeiv svar ella bert ein rættur máti at loysa uppgávurnar.

Í fólkaskúlaskipanini hava næmingarnir ítrótt øll skúlaárini og handaverk og list í 1.-7. flokki. Handaverk og list fatar um lærugreinarnar handarbeiði, tilevning, smíð, heimkunnleika og sang og tónleik. Handaligu og listaligu lærugreinirnar hava ikki nóg høga raðfesting í verandi tíma- og lærugreinabýti, um vit bera okkum saman við t.d. Danmark og Finnland. Skipanirnar í Føroyum og Danmark eru rættiliga líkar viðvíkjandi kravda undirvísingartímatalinum, meðan kravda undirvísingartímatalið í Finnland er væl lægri. Hóast hetta, so er tímatalið í handaverk og list nógv hægri bæði í Finnlandi og Danmark, og eisini hava næmingarnir í donsku og finsku skúlunum fleiri tímar til rørslu, sum tølini niðanfyri vísa.

| **Evni** | **Føroyar** | **Danmark** | **Finnland** |
|---|---|---|---|
| Handaverk og list | 25 | 32 | 35 |
| Ítróttur | 17 | 21 | 20 |

*Talva 5: Undirvísingartímatal í handaverk og list og ítrótti í 1.-7. flokki. (FO, DK og FI)*

Ein avbjóðing er eisini p-fak skipanin[14], sum nógvir skúlar nýta í handaligu og listarligu lærugreinunum, har avmarkaða tíðin í hvørji lærugrein ger, at næmingarnir ikki fáa hugsavnað seg í einum evni ella fordjúpa seg í einari estetiskari lærutilgongd. Eisini forðar skipanin ofta fyri tvørfakligum samstarvi, tí at tíðarskeiðini í p-fak skipanini eru einar 6 vikur til hvørja lærugrein. Tað krevur áhaldni og djúphugsni at læra nýtt, og tí er vandi fyri, at næmingarnir við hesi skipan ikki koma nógv longri enn til at royna og fáa innlit í lærugreinapartarnar, serliga tí at tað kann ganga eitt heilt ár, til tey aftur fáa høvi at nema við somu lærugreinina, og aftur bara í nakrar fáar vikur.

Næmingarnir í 8. og 9. flokki kunnu í ávísan mun velja handaligar og listarligar lærugreinir, men av tí at kravda tímatalið er høgt, 30 tímar um vikuna, so fellur valið oftast á lærugreinir, sum eru grundarlag fyri upptøku á miðnám, og her eru handaligu og listaligu lærugreinarnar aftur við undirlutan. Hetta ger, at næmingar í alt ov lítlan mun fáa brúkt og ment teirra handaligu og skapandi evni, og hetta er ein bági serliga fyri næmingar, ið ikki eru bókliga sterkir, ella næmingar, sum hava ávísar avbjóðingar. Tað er ein fyrimunur eisini at kunna samskipa bókligar og handverks- og listarligar lærugreinir, tí vit læra á ymsan hátt. Tað er hetta sum Agnes Sipos vísir á í frágreiðingini, The Courage to Change:

[14] P-fak eru lærugreinar sum smíð, heimkunnleiki, handarbeiði, evning.

*...young people are all creative, but they receive constant standardized answers to questions throughout their lives. Therefore, some cannot approach a situation creatively as they become product- and achievement-focused.*[15]

Fólkaskúlalógin byggir á ta holistisku fatanina, at menna heila menniskjað, og tí hevur tað stóran týdning, at handaliga og listaliga økið verður raðfest. Kanningar vísa, at næmingar gjøgnum estetiskar læritilgongdir læra um egna mentan og siðaarv, menna sína sjálvsfatan og fáa eina kenslu av at hoyra til í einum felagsskapi. Tey menna ein kreativan hugsanarhátt, læra at hugsa bæði grundandi og kritiskt, umframt at tey mennast sosialt og kensluliga[16]. Hetta eru alt førleikar sum eru neyðugir fyri at kunna virka og liva í dagsins samfelagi.

Umframt at virka fyri eini meira holistiskari áskoðan á læringina hjá næminginum stuðlar listaliga fakøkið eisini læringini í bókligu lærugreinunum. Kanningar vísa, at skúlar, ið raðfesta handaligu og tónlistarligu lærugreinarnar og fáa tað listaliga rótfest inn í aðrar lærugreinar, klára seg betur í royndum í bókligu lærugreinunum.

*We find that a substantial increase in arts educational experiences has remarkable impacts on students' academic, social and emotional outcomes.*[17]*.*

Tað er týdningarmikið, at børn og ung uppliva kensluna av at eydnast og trívast. Hetta hevur stóra ávirkan á teirra sjálvsvirði og sjálvsfatan. Handaligu og listarligu lærugreinirnar kunnu hava ein stóran leiklut í hesum sambandi og á menningin og trivnaðin hjá næmingum. Næmingar eiga at sleppa at hugsavna seg og hava ávirkan á tilgongd og innihald í tí, tey fáast við. Í Handaverk og list fáa næmingarnir møguleika at nýta hendur og hugflog samstundis og fáa kensluna av at megna og duga. Tað er nógv, sum bendir á, og sum kanningar eisini vísa, at ein næmingur, ið trívist, hevur gott sjálvsvirði og eina góða sjálvskenslu, er í minni vanda fyri at fáa avbjóðingar, sum rústrupulleikar, enn ein næmingur sum ikki trívist og megnar at fylgja við læringini, og hevur eina kenslu av at ikki at røkka til.

Vit mugu viðurkenna, at telda, teldil og snildtelefon spæla ein stóran leiklut í lívinum hjá børnum og ungum. Summi ung hava mestu kontakt við onnur ung á netinum, og bæði børn og ung nýta nógva tíð til telduspøl. Hetta er ein vaksandi avbjóðing, sum bæði foreldur og skúli eiga at vera ansin um, serliga tí at hetta er øðrvísi samskifti og samvera enn tað persónliga sambandið. Men vit mugu vera varin, hvussu vit viðgera hesi viðurskifti, tí hjá nøkrum eru tøknin og talgildi felagsskapurin (t.d. í telduspølum ella sosialum miðlum) besta samskiftisamboð, serliga hjá teimum, sum hava avbjóðingar við at vera í tí stóra felagsskapinum ella hava onkran heilsuligan trupulleika.

---

[15] Sipos, Agnes. The Courage to Change. Apríl 2021.

[16] Road Map for Arts Education the World Conference on Arts Education: Building Creative Capacities for the 21st Century Lisbon, 6-9 March 2006

[17] Daniel H. Bowen, Ph.D. and Brian Kisida, Ph.D. Investigating Causal Effects of Arts Education Experiences: Experimental Evidence from Houston's Arts Access Initiative. Feb 2019.

Sum víst á, er altíð einhvør orsøk til, at næmingar mistrívast. Tað er tó ikki altíð so lætt at fáa eyga á, tí talan kann vera um eina samansetta og torgreidda støðu. Frávera og víkjandi atburður eru í hvussu er vandatekin, sum bæði skúli og foreldur eiga at halda eyga við. Her hevur flokslærarin ein stóran leiklut bæði við atliti at fráboðan um støðuna og samskiftinum við næmingin og foreldrini. Um hond ikki verður tikin um fráveruna og trivnaðin hjá næminginum, kann hetta, tá ein tíð er liðin, føra til, at næmingurin ikki megnar at koma í skúla.

Á fundi við arbeiðsbólkin hava nakrir persónar við rústrupulleikum og avvarðandi nevnt, at ein avgerandi støða í teirra uppvøkstri ella ungdómsárum var, tá tey kendu, at ein lærari sá teirra støðu og tók teirra trupulleikar í álvara. Tí mæltu nøkur teirra til, at lata sálarheilsu og trivnað fylla meiri í undirvísingini og flokstiltøkum, soleiðis at lærarar og heilsufrøðingar regluliga hava høvi til at spyrja og meta um, hvussu næmingarnir hava tað. Tað átti eisini at borið til at lagt størri dent á lívsmeistran sum ein liður í, at næmingarnir kunnu menna sítt sjálvsálit, gera teir búnar til betur at duga at handfara síni viðurskifti og sínar trupulleikar og til at fara víðari út í samfelagið eftir lokna skúlagongd. Hetta er m.a. eitt evni, sum fyllir nógv, tá ið tosað varð við Lopfjølina (ss. 56-58) og ymsar sálarfrøðingar.

Í fólkaskúlanum eru eisini skipanir, serliga flokslæraraskipanin og AKT-læraraskipanin, har serliga verður arbeitt við trivnaði bæði viðvíkjandi einstaka næminginum og flokkinum. Flokslærarin er lærari í flokkinum og hevur dagliga sambandið við næmingarnar, ímeðan AKT er ein ráðgevandi skipan, sum hjálpir til og veitir ráð í trivnaðarmálum.

Trivnaður eigur at hava stórt pláss í undirvísingini, ikki bara sum evni, men at lærarar í allari undirvísing leggja dent á at skapa góða karmar og trivna í flokshølinum.

Trivnaðarráðgevi er settur í Námi, og mælt verður til at menna skipanina víðari. At skipa eitt starv sum trivnaðarráðgevi er ein stórur bati, men við so nógvum avbjóðingum, sum børn og ung hava í dagsins samfelag, so er neyðugt at veita skúlunum amboð og antin, at fólk verður sett afturat, ella at førleikastovurnar fáa fleiri tímar til trivnaðararbeiðið. Skal skipanin eisini fata um miðnám, so er í øllum førum neyðugt við øktari ráðgeving.

**Tilmæli 7**
**Menna trivnaðararbeiðið í fólkaskúlanum**

- Endamálið við átakinum er, at leggja størri orku í trivnaðararbeiðið. Førleikastovurnar eiga at fáa meiri tíð til arbeiðið, umframt at ráðgevingararbeiðið verður styrkt.
- Mettur kostnaður: Hækka játtanina til arbeiðið í førleikastovunum og til trivnaðarráðgeving. Kostnaðurin er umleið kr. 750.000. Stigvís menning í einum trý-ára skeiði.
- Ábyrgdari: UMMR.
- Tíðarætlan: 2023-25.

## Flokslæraraskipanin

Trivnaður kemur ikki av sær sjálvum, men er eitt evni, har øll mugu geva sítt íkast og verja um virðini og felagsskapin. Trivnaður er huglagið í flokkinum, sosiala samveran, arbeiðslagið og fakligu avbjóð-

ingarnar. Fólkaskúlin hevur eina stóra uppgávu, har flokslæraraarbeiði og lærarasamstarv eru týðandi tættir. Flokkar eru ymiskir, men tað eru nøkur grundleggjandi viðurskifti, sum skúlin eigur at leggja seg eftir, m.a. at leggja dent trivnað og á felagsskap í flokkunum, at fyribyrgja og steðga møguligari happing, at næmingarnir føla seg javnsettar og javnvirdar.

Tað eru næmingar, sum hava ymiskt at stríðast við. Tað kann vera menningarórógv, truplar umstøður heima ella í skúlanum, at ansa eftir, at næmingar ikki keða seg, ella føla seg uttan fyri felagsskapin, tí at teir ikki megna at fylgja við í undirvísingini, ikki skilja tað, sum sagt verður og hava tørv á øðrvísi arbeiðsháttum, ella tað kann vera vegna ov lítlar fakligar avbjóðingar. Her eru so ómetaliga nógv viðurskifti, sum kunnu gera seg galdandi, og tí er gott, at næmingarnir hava ein akkerspersón sum flokslæraran,

Ásett er í fólkaskúlalógini, at til hvønn flokk verður settur ein flokslærari at loysa serstakar uppgávur flokkinum viðvíkjandi, og at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um uppgávur flokslærarans.

Flokslærarin fylgir við og hevur eftirlit við arbeiðinum og trivnaðinum bæði hjá einstaka næminginum og flokkinum. Í kunngerðini um flokslæraraarbeiðið eru ásettar meginreglur fyri virkseminum, har flokslærarin hevur ábyrgdina av at samskipa floksins arbeiði og taka hond um trivnaðin hjá einstaka næminginum. Flokslærarin er umboðsfólk floksins í samskiftinum og samstarvinum við leiðslu og lærarar og skal javnan og í minsta lagi 2 ferðir um árið kunna heimini um fakliga førleikan, arbeiðsgongdina og trivnaðin hjá barni teirra.

Flokslærarin hevur skyldu til at boða foreldrum frá, um hann er varugur við, at barn teirra mistrívist ella hevur trupulleikar í skúlanum. Somuleiðis hevur einstaki næmingurin rætt til at fáa ráð og vegleiðing um faklig og trivnaðarlig viðurskifti frá flokslæraranum.

Flokslæraraskipanin er sera týðandi, tí flokslærarin hevur stóran leiklut við atliti at trivnaðararbeiði í flokkinum, lærarasamstarvi, foreldrasamstarvi og kunning til bæði leiðslu og foreldur.

Stór ábyrgd er løgd á flokslæraran, men flokslærarin eigur ongantíð at standa einsamallur í sínum arbeiði. Leiðslan hevur altíð ovastu ábyrgdina í skúlanum og eisini ábyrgdina av at fylgja við.

Flokslærarin hevur flokstoymið at ráðføra seg við, har ein felags fatan og mannagongd verður løgd sum karmur um arbeiðið í flokkinum. Ásett er eisini í fólkaskúlalógini, at á hvørjum floksstigi og í hvørji lærugrein samstarva lærarar og næmingur javnan um at áseta tey mál, roynt verður at náa. Tað áliggur so aftur leiðsluni at tryggja, at flokslærarin og lærarar floksins ráðleggja og fyrireika undirvísingina og skipa arbeiðið í flokkinum, har trivnaður er ein sameindur partur í læringini og atlit verða tikin at tí einstaka og sosiala felagsskapinum í flokkinum.

Tað mest umráðandi er huglagið, tann sosiali trivnaðurin og virðing fyri hvørjum øðrum, og hetta røkkur ofta langt út um skúlans dyr, tí næmingarnir hava ikki bara eitt lív í skúlanum, men bæði heima og í frítíðarlívi. Umráðandi er tí, at heimini verða tikin við i arbeiðið, tí at skúlin megnar ikki alt einsamallur.

Flokslæraraarbeiðið er krevjandi, serliga í flokkum, har avbjóðingar eru bæði trivnaðarliga og fakliga. Neyðugt er tí at menna flokslæraraarbeiðið bæði við fakligari menning og tíð til at røkja arbeiðið.

**Tilmæli 8**
**Átøk verða gjørd at menna flokslæraraarbeiðið í skúlunum. Hetta verður gjørt við at skipa fyri skeiðum, árligum evnisdøgum fyri flokslærarum og at hækka tímajáttanina til flokslæraraarbeiðið.**

- Endamálið við átakinum er styrkja og menna flokslæraraarbeiðið.
- Mettur kostnaður: Umleið kr. 700.000 árliga næstu trý árini til skeið og átøk. Játtanin er m.a. til skeið, sum verða fyriskipaði av ráðgevum í Námi og til tímaniðurskurð til flokslæraraarbeiði.
- Ábyrgdari: UMMR, Undirvísingarstýrið og Nám.
- Tíðarætlan: 2023-25.

## AKT-lærarar

AKT-skipanin er ein ráðgevaskipan, sum er partur av førleikastovunum í skúlunum. AKT er ein stytting av orðunum "Atferð, Kontakt og Trivnaður". AKT-arbeiðið er skipað við íblástri úr donsku AKT-skipanini, og hava Uttanríkis- og mentamálaráðið og Nám eisini samstarvað við danskar útbúgvingarstovnar í sambandi við AKT útbúgvingar, sum eru fyriskipaðar í Føroyum.

AKT-lærarin er knýttur at førleikastovuni, har eitt av arbeiðsøkjunum er at menna eitt næmingalagað og inkluderandi skúlaumhvørvi, har allir næmingar í læringini fáa høvi til at vera virknir í felagsskapinum. Høvuðsuppgávan hjá førleikastovuni er at ráðgeva leiðsluni og at vegleiða lærarum í fakligum-, námsfrøðiligum-, og sernámsfrøðiligum spurningum og í trivnaðarmálum. Knýttir at førleikastovuni eru lærarar við serligari eftirútbúgving sum serlærari, lesivegleiðari, AKT-lærari, orðblindalærari og støddfrøðivegleiðari.

Í sambandi við trivnaðarátøk hevur førleikastovan og serliga AKT-lærarin ein stóran leiklut saman við flokslærarunum og flokstoymunum. AKT-lærarin bæði ráðgevur og leggur lærarum lag á í sambandi við trivnaðararbeiði í flokkinum, har hann m.a. saman við flokslærarunum tosar við flokkar um trivnað, skipar fyri tiltøkum at fremja trivnað og vegleiðir og hjálpir til við at fyribyrgja og steðga happing. Í nógvum skúlum hava AKT-lærarar skipað spælibólkar og gjørt ymisk átøk, sum betra um trivnaðin og skapa eitt inkluderandi umhvørvi í flokkinum við serligum atliti at felagsskapi og at inkludera næmingar, sum ikki trívast.

Ein stórur partur av samskipandi arbeiðinum, tá ið tað snýr seg um næmingar við ymsum avbjóðingunum, liggur hjá førleikastovunum, og við atliti at trivnaði er tað serliga AKT-lærarin, sum í samstarvi við flokslæraran setur átøk í verk. Førleikastovan hevur eisini ávíst samstarv við SSP-ráðgevan, og her er tað ofta AKT- og SSP-lærarin, sum samstarva. Í nøkrum skúlum er tað somu lærarar, sum røkja bæði AKT og SSP-uppgávurnar. Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum segði á sumri í 2021, at AKT-skipanin helst fór at vera eftirmett og endurskoðað í sambandi við, at fólkaskúlalógin eisini verður endurskoðað.[18]

---

[18] Skúlablaðið 1. juni 2021 - http://www.skulabladid.fo/akt-læraraskipanin-roynist-væl

Fleiri hoyringarpartar hava víst á týdningarmikla leiklutin hjá AKT-lærarunum og góða arbeiðið, sum teir gera. Men tíverri strekkir tíðin ikki til, tí á nógvum skúlum hava AKT-lærarar rættiliga fáar tímar til AKT-lærarauppgávurnar, ímeðan restin av arbeiðstíðini fer til vanliga undirvísing. Hetta sama er galdandi fyri hini økini í førleikastovuni. Stórur tørvur er á trivnaðararbeiði í skúlunum, og sum støðan er, so røkkur tímatalið ikki, og tí er trupult at veita hjálp í brádliga íkomnum støðum. Hoyringarpartar hava víst á, at neyðugt er við hægri raðfesting, um AKT-lærarin skal kunna røkja AKT-starvið, har umstøður skulu vera at fremja arbeiðið sambært ásetingunum í kunngerðini. Í kunngerðini er ásett, at arbeiðið hjá AKT-lærararum er at tosa við flokkar um trivnað, skipa fyri tiltøkum at fremja trivnað og fyribyrgja happing í samráð og samstarvi við flokslærarar og flokstoymið. Harumframt skulu teir eygleiða, hvussu samskift verður, og veita vegleiðing í hesum sambandi, at veita vegleiðing og hjálp viðvíkjandi næmingasamrøðum, floksfundum og foreldrafundum, at hava samrøður við einstakar næmingar, bólkar og foreldur, og at gera AKT-virkisætlan saman við lærarum fyri hvønn einstakan næming/flokk við støði í eygleiðing og samrøðum.

Hetta er eitt sera stórt arbeiði, sum ikki er møguligt at fremja við verandi játtanarskipan til førleikastovuna, har AKT er ein partur og hevur ávísa tímajáttan.

AKT-arbeiðið leggur dent á samstarv og viðurkenning, og AKT-lærarar eru eitt bindilið og samstarvsfelagi hjá hinum lærarum, næmingum og foreldrum. Á hoyringarfundi nevndi persónur, sum ofta samstarvaði við skúlar og AKT-lærarar, at hóskandi hevði verið at havt 2-3 ársverk til AKT-arbeiðið á stóru og miðalstóru skúlunum og ½-1 ársverk á smærri skúlum. Eftir at hava tosað við ymisk fakfólk, heldur arbeiðsbólkurin, at tað er neyðugt at raðfesta hetta øki hægri, men ikki í so stóran mun, sum persónurin á hoyringarfundinum mælti til.

**Tilmæli 9**
**Eftirmeta og menna AKT-arbeiðið í skúlunum**

- Endamálið er at økja um trivnaðin og at tryggja skipanir og mannagongdir í skúlunum, so til ber at hjálpa næmingum og flokkum, sum hava tørv á serligum fyriskipanum. AKT-lærarar skulu hava tíð til at samstarva við og ráðgeva lærarum, næmingum og foreldrum. Trivnaðarráðgevin í Námi hevur tikið stig til at samskipa og leggja til rættis samstarvið millum trivnarráðgevan og AKT-lærararnar, og eisini verða fyriskipanir gjørdar í skúlunum, har Nám veitir ráðgeving og íblástur.
- Mettur kostnaður: Mælt verður til, at játtað verður ein millión komandi 3 árini bæði til at førleikamenna starvsfólk í Førleikastovuni og til arbeiðið í sambandi við trivnaðarátøk.
- Ábyrgd: UMMR.
- Tíðarætlan: 2023-25. Arbeiðið verður sett í verk at útbúgva fleiri AKT-lærarar bæði við atliti at skúlaaftran, trivnaarátøkum og til at seta í verk skipanina Tiltøk í tøkum tíma (TÍTT) ella aðra skipan til at varnast mistrivnað og seta átøk í verk.

## Trivnaðarkanningar og átøk at basa happing

Fyribyrging gongur aftur sum ein reyður tráður í samrøðunum, vit hava havt við hoyringarpartar. Í hesum sambandi er eyðsæð, at trivnaður spælir ein stóran leiklut og er ein fyritreyt fyri, at tey ungu velja sunnar felagsskapir og ikki hava tørv á at stimbra seg við rúsevnum fyri at megna lívið og finna vinir. Vit eiga tí at halda eyga við trivnaðinum bæði hjá børnum og ungum, og serliga umráðandi er, at børn á dagstovni og í skúla kenna seg vird og læra at virka í tí felagsskapi, har tey eru. Tað er so skjótt, at eitt barn, sum verður happað ella kennir seg uttan fyri felagsskapin, missir sítt sjálvsvirði og í ringasta føri mót upp á lívið.

Mentamálaráðið hevur í trimum umførum í 2007, 2015 og 2019 skipað fyri kanningum um happing og trivnað í fólkaskúlanum. Fyrsta kanningin snúði seg serliga um at fáa innlit í, hvussu støðan var viðvíkjandi happing, samstundis sum tilmæli varð gjørt um, hvørji átøk áttu at verið sett í verk fyri at fyribyrgja og basa happing. Seinnu kanningarnar hava í størri mun lagt dent á trivnað og at síggja happing sum eitt sosialt fyribrigdi, har áherðsla ikki verður løgd á happaran, men á sosiala samspælið og útihýsan millum næmingar. Eitt tað truplasta hjá einum menniskja er at kenna seg útihýstan, og hetta er ofta støðan sum børn koma í. Tey verða ikki góðkend av hinum og útihýst, so tey sleppa ikki upp í part í spæli og vinaskara. Kanningarnar vísa, at orsøkirnar eru sera ymiskar, og í kanningini frá 2019[19] verður m.a. víst á, at mesta happingin fer fram í fríkorterinum, og tað at flenna, kalla, slatra og útihýsa er mest útbreitt. Somuleiðis er happing á internetinum eisini ein trupulleiki og liggur á leið á sama støði sum í okkara grannalondum.

Í fyrstu kanningini søgdu 15% seg hava upplivað happing. Í 2015 var talið komið niður á 13%, og seinasta kanningin vísir, at tað eru 11%, sum kenna seg happað. Kanningin vísir eisini, at trivnaðurin í fólkaskúlanum er øktur samsvarandi teimum átøkum, sum eru gjørd fyri at menna trivnaðin og basa happing. Í 2015 vóru tað 82% av næmingunum, sum trivust væl, meðan talið í 2019 var 84%.

Fyrireikingar verða gjørdar til at skipa nýggja kanning, sum ætlanin er at fremja í 2022. Talan er í hesum føri um trivnaðarkanning, har happing er ein partur, soleiðis at til ber at samanbera úrslitið við undanfarnu kanningar. Við støði í tilmælum í kanningini og tí kjaki, ið hevur verið eftir kanningarnar, eru fleiri átøk gjørd fyri at basa happing – nøkur, sum Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fyriskipað saman við skúlunum og onnur, ið skúlarnir sjálvir hava framt.

Hóast happingin samanlagt er minkað til 11%, og trivnaðurin hjá næmingunum er øktur, so vísa tølini, at millum ein triðingur og ein helvt av næmingunum kortini uppliva happing á onkran hátt. Hetta eiga vit at taka í álvara og virka fyri, at eitt áhaldandi arbeiði verður gjørt fyri at menna trivnaðin millum børn og ung. Kanningar einsamallar muna ikki nóg mikið, og tí eru átøkini, tilvitanin og tann hjálp, skúlar kunnu fáa til arbeiðið, umráðandi.

Seinastu árini hevur eitt samstarv verið á dagstovnaøkinum, har m.a. Barnabati hevur arbeitt við átakinum Betri vinir (Fri for mobberi), sum millum annað tekur støði í Exbus.dk. Sum er fevnir hetta arbeiðið bara um námsfrøðingar og lærarar, sum arbeiða við børn í aldrinum 0-6 ár. Meira enn helvtin av føroysku dagstovnunum eru partar av hesi tilgongd. Endamáli við hesum trivnaðararbeiði er at menna og stimbra eginleikarnar Umsorgan, Virðing, Tolsemi og Dirvi, sum verður gjørt fyri at útihýsa happing á ein natúrligan hátt.

[19] Happing í fólkaskúlanum - ein spurnakanning

Frá Barnabata hevur arbeiðsbólkurin fingið at vita, at kanningar vísa, at 93% av starvsfólkum á dagstovnaøkinum siga, at happing fer fram á dagstovnunum. Tí er eftirspurningurin eftir “Betri vinir” stórur. Tey siga, at vit annars ikki hava tøl frá skipaðum kanningum um happing og trivnað á dagstovnaøkinum.

Í verkætlanini Betri vinir, hevur Sjúkrakassagrunnurin stuðlað gransking, sum er ætlað at tryggja góðskuna í undirvísingartilfarinum.

Barnabati arbeiðir í løtuni við at gera tilfar, soleiðis at ætlanin Betri vinir eisini kann brúkast í skúlum.

**Tilmæli 10**
**Regluligar trivnaðarkanningar verða gjørdar í dagstovnum, fólka-, og miðnámsskúlum**

- Endamálið við trivnaðarkanningum er at fáa meira og nágreiniliga vitan um trivnað og happing, soleiðis at munandi átøk kunnu setast í verk.
- Mettur kostnaður: Kanningararbeiðið kostar umleið kr. 500.000. Harumframt koma vegleiðing og átøk í skúlunum.
- Ábyrgdari: UMMR og kommunurnar.
- Tíðarætlan: Næsta trivnaðarkanning í fólkaskúlanum verður í 2022-23. Síðani eiga trivnaðarkanningar at gerast við jøvnum millumbili, helst annað hvørt ár í fólkaskúlanum.

**Tilmæli 11**
**Skeið verða fyriskipað fyri lærarum og námsfrøðingum, har dentur verður lagdur á førleikan og tilvitanina at varnast happing og innlit og venjing í amboðum og arbeiðsgongdum at fyribyrgja happing**

- Endamálið við átakinum er at geva lærarum og námsfrøðingum góð amboð og førleikar at varnast og fyribyrgja happing.
- Mettur kostnaður: Í mesta lagi kr. 500.000. At gera tilfar til børn í aldrinum 6-9 ár kostar umleið kr. 250.000, og at førleikamenna lærarar kostar umleið kr. 13.500 fyri hvørt lið við 18-20 persónum. Hetta er, um valt verður at nýta tilfarið “Betri Vinir” .
- Ábyrgdari: UMMR og Nám.
- Tíðarætlan: Fyrireiking í 2022-23, so klárt er at byrja í 2024.

## Skúlaaftran

Tað hevur seinastu árini víst seg, at nakrir næmingar eru burtur frá skúla í longri ella styttri tíðarskeið. Vit hava ikki hagtøl at vísa á, men skúlarnir boða frá, at hetta er ein vaksandi trupulleiki. Økti tørvurin á játtan til sjúkra- og heimaundirvísing vísir eisini, at hesin trupulleiki økist. Talan er í hesum førum ikki um næmingar, sum eru burtur vegna likamliga sjúku ella skaða, men næmingar, sum ikki megna regluligu skúlagongdina og í fleiri førum heldur ikki megna at luttaka í øðrum felagsskapi sum ítrótti, tónleiki ella í einum vinaskara. Næmingurin heldur seg sum oftast fyri seg sjálvan.

Skúlaaftran hevur ikki einans ávirkan á fakligu úrslitini hjá næmingunum og møguleika teirra at lúka 9. floks próvtøkuna, men fráveran hevur eisini stóra ávirkan á trivnað og teirra ungdóms- og vaksnamannalív. Í donsku kanningini "Skolens tomme stole" [20] frá 2020 er eitt yvirlit frá danska Kenslumálaráðnum sum vísir, at næstan helvtin av næmingunum, sum ikki vóru farnir undir eina ungdómsútbúgving eitt ár eftir loknan fólkaskúla, høvdu havt nógva fráveru í 9. flokki. Í somu kanning verður greitt frá, at sambært altjóða gransking, er skúlafrávera eitt vandatekin um sosialar, fíggjarligar og sálarligar trupulleikar seinni í lívinum, umframt at samband er ávíst millum skúla-aftran, arbeiðsloysi, kriminalitet og rúsevnismisnýtslu.[21]

Hetta er ein sera trupul støða hjá næmingunum at koma í, og tað vísir seg at vera ein tung leið at fáa næmingarnar at koma burtur úr støðuni. Teir hava ofta lítið sjálvsvirði, stríðast við angist og útihýsan, og hava ilt við at koma aftur í skúla og luttaka í einum felagsskapi. Tí verður ofta arbeitt við at finna aðrar møguleikar fyri undirvísing enn vanligu floksundirvísingina.

Arbeiði er sett í verk í samstarvi millum Nám, Undirvísingarstýrið, Uttanríkis- og mentamálaráðið og Sernám at gera fyriskipanir, sum skúlanir kunnu nýta í arbeiðinum at fyribyrgja støður, har næmingar ikki megna skúladagin. Økið er greinað viðvíkjandi lógaráseting og ábyrgd, og hvør varðar av fyriskipanum, og hvør hevur ábyrgd og eftirlit við, at fyriskipanir verða settar í verk og fylgdar. Umráðandi er, at skúlarnir fylgja við og varnast, so skjótt sum til ber, tá ið næmingur hevur afturvendandi fráverur. Arbeitt verður við teldutøkari skipan, har henda skráseting er møgulig, og at hon samstundis fráboðar fráveru. Eisini verður arbeitt við amboðum, sum skúlarnir kunnu nýta í arbeiðinum at fyribyrgja støður, har næmingur ikki megnar at koma í skúla og til at hjálpa næmingum, sum eru komnir í hesa støðu. Tað týdningarmesta er at kunna fyribyrgja, at næmingarnir verða so illa fyri, at teir ikki megna skúladagin og felagsskapin.

**Tilmæli 12**
**Halda fram við arbeiðinum at fyribyrgja skúlaaftran og menna trivnað**

- Endamálið við átakinum er at tryggja tvørfakliga arbeiðið at greina økið og menna amboð, sum skúlarnir kunnu brúka í arbeiðinum at fyribyrgja skúlaaftran. Ein partur av hesum arbeiði er at skipa fyri skeiðum og kunningarfundum fyri leiðslu og lærarum, serliga flokslærarum og AKT-lærarum.
- Mettur kostnaður: Umleið kr. 100.000 Samstarvið millum myndugleikar og stovnar, sum er sett í verk, kann halda fram uttan eyka kostnað. Neyðugt er við játtan til skeið og møguliga uttanhýsis ráðgeving.
- Ábyrgdari: UMMR í samstarvi við Undirvísingarstýrið og Nám.
- Tíðarætlan: 2022 til 2024.

[20] 2020, Børns Vilkår og Egmont fonden
[21] https://metodecentret.dk/wp-content/uploads/2018/08/Skolevaegring_litteraturstudie_final.pdf

**Tilmæli 13**
**Skipa granskingarætlan um skúlaaftran**

- Endamálið er at fáa innlit í, hvørja støðu næmingar kunnu vera í og kunnleika um tekin um mistrivnað umframt fakligan førleika at hjálpa næmingum, sum koma í hesa støðu. Hetta er ein av fyritreytunum fyri, at til ber at seta í verk faklig grundað átøk at fyrbyrgja, at næmingar koma í hesa støðu, og hjálpa teimum, sum eru heima, at koma aftur í skúla.
- Mettur kostnaður: Eitt ársverk í 3-4 ár.
- Ábyrgdari: Nám í samstarvi við UMMR.
- Tíðarætlan: 2023-27.

## Lopfjølin

Lopfjølin er skipað sum eitt skúlasamstarv millum Uttanríkis- og mentamálaráðið, Tórshavnar Kommunu, virkishúsið Margarinfabrikkina og Sernám. Talan er um eitt sosialpedagogiskt skúlatilboð fyri næmingar í 7.- 9. flokki, ið hava skúlaaftran. Hesir næmingarnir hava verið burtur frá skúla í eitt longri tíðarskeið, har teir hava fingið sjúkra- og heimaundirvísing, men tað hevur ikki eydnast at fáa teir aftur í skúla og taka 9. floks prógv. Næmingarnir halda seg í flestu førum ikki bara burtur frá skúla, men eisini frá øðrum sosialum felagsskapi. Roynt varð tí at finna eitt stað, sum ikki var skúli, men sum hevði virksemi fyri ungdóm, og sum tey ungu kendu. Samband varð tí tikið við Margarinfabrikkina, har skúlatilboðið so varð staðsett og hevur virkað síðani august 2014. Umhvørvið á Margarinfabrikkini er øðrvísi enn í einum vanligum skúla, og tykist hetta at hava verið ein góð loysn, tí næmingar, sum hava angist, sálarligt órógv, tunglyndi ella aðrar avbjóðingar, eru sera sárbærir, og tilgongdin til undirvísing og sosiala samveru er samstundis rættiliga trupul, tí næmingarnir ofta ikki finna seg til rættis í einum vanligum skúlaflokki.

Endamálið við skúlatilboðnum er, at næmingarnir skulu taka 9. floks prógv og gerast førir fyri at fara víðari í útbúgving ella arbeiði. Eisini er dentur lagdur á, at fáa næminganar aftur í vanliga skúlan, men hetta hevur ikki hepnast í stóran mun. Tó eru fleiri næmingar, sum halda fram í NámX, eftir at teir hava tikið 9. floks prógv. Hetta er helst eisini tí, at í Nám X eru næmingarnir ein stóran part av tíðini í smærri bólkum.

Lopfjølin varð eftirmett skúlaárið 2018-19. Mentamálaráðið skipaði fyri eftirmetingini sum liður í norðurlendska samstarvinum um verkætlanina, Nordisk 0-24 projekt, “Tværsektorielt arbejde for udsatte børn og unge,” har ætlanin var at stovna eitt netsamstarv millum líknandi sernámsfrøðilig skúlatilboð í Norðurlondum. Endamálið við eftirmetingini var fyrst og fremst at fáa staðfest, í hvønn mun málini fyri skúlatilboðið Lopfjølina eru rokkin, og um tað er grundarlag fyri at menna líknandi tilboð aðrastaðni í Føroyum. Niðurstøðurnar eru í høvuðsheitum:

> 22 næmingar hava verið í Lopfjølini, har 89 % hava megnað at fingið eitt fólkaskúlaprógv, men endamálið við, at næmingarnir skulu arbeiða fram ímóti at fara aftur í upprunaskúlan hevur verið ein størri avbjóðing, tá tað bert eru 9 % av næmingunum, sum hava megnað at fara aftur í vanligan skúlaflokk. Samanumtikið kann staðfestast, at virksemið í Lopfjølini hevur havt eina positiva ávirkan á næmingarnar persónliga, sosialt og fakliga. Næmingurin er

mentur so mikið, at bæði hann sjálvur, starvsfólkini í Lopfjølini og foreldrini hava góðar vánir fyri einari gongdari leið við víðari útbúgving og/ella arbeiði eftir lokna gongd í Lopfjølini.

Grundleggjandi tilgongdin hjá lærarum og námsfrøðingum í Lopfjølini hevur í nógvum førum givið næmingunum sjálvsálit og dirvi til skúlan og lívið. Samstarvið og samskiftið innanhýsis í Lopfjølini er ógvuliga gott. Har eru fýra fakfólk í einum toymi, og greiðar linjur eru í skipanini/bygnaðinum. Eisini er tvørgeiraliga samstarvið gott, og tað er skjótt at fáa samband partanna millum. Tað verður tó ført fram, at málsviðgerð hjá Sosialu deild, Sernámi og Barnapsykiatriska deplinum tekur ov langa tíð. Tað er staðfest millum fakfólk í Føroyum (í tráð við tøl úr Danmark), at talið av børnum við skúlaaftran er vaksandi, og at børn við hesum avbjóðingum eru yngri enn upprunaligi málbólkurin, sum er næmingar í 7. – 9. flokki[22].

Í eftirmetingini verður mælt til, at tilboðið heldur fram í Margarinfabrikkini, sum er ein styrki hjá Lopfjølini, tí tey flestu ungu hava lættari við at koma í Margarinfabrikkina enn í ein vanligan skúla. Eisini verður mælt til, at málbólkurin verður víðkaður til at fata um næmingar frá 5. flokki, og at tað skal ikki vera ein treyt, at barnið er ávíst av barnaverndini fyri at koma í Lopfjølina. Næmingurin verður verandi innskrivaður í upprunaskúlanum, og samstarvið millum upprunaskúlan og Lopfjølina skal styrkjast. At enda verður mælt til, at kunnað verður um tilboðið við faldara og heimasíðu, og vitjað verður í størri kommunum at kunna um Lopfjølina. Harumframt eru skipanarlig tilmæli um at lýsa skúlatilboðið, so tað gerst greiðari, hvør ið varðar av hvørjum, hvussu samstarvið skal fara fram tvørgeiraliga, at tímatalið verður hækkað, og størvini verða skipað sum tvey fulltíðar námsfrøðinga-størv og tvey fulltíðar lærarastørv í tráð við verandi næmingatal.

Mælt verður til, at samsvarandi tilboð sum Lopfjølin verða sett á stovn í stóru kommununum kring landið, eisini er møguligt, at smærri kommunur samskipa tilboðini. Hetta er ein skipan, sum hevur víst, at við serligari hjálp í eitt avmarkað tíðarskeið ber til at hjálpa næmingum, sum ikki annars megna skúlagongdina og at luttaka í øðrum sosialum felagsskapi. Í eftirmetingini vísa foreldur eisini á, at eftir at barn teirra er byrjað á Lopfjølini, so er broytingin eyðsýnd bæði persónliga, fakliga og sosialt.

[22] Lopfjølin, Virknaðareftirmeting á vári 2019

**Tilmæli 14**
**Seta á stovn tilboð, sum líkjast Lopfjølini í økjum kring landið**

- Endamálið við átakinum er at hjálpa næmingum í 5.-9. flokki, sum ikki megna skúlagongdina og annan sosialan felagsskap við at seta á stovn tilboð, sum líkjast Lopfjølini í økjum kring landið.
- Mettur kostnaður: Fíggingin til tvey lærarastørv er umleið kr. 950.000. Harumframt rindar kommunan fyri námsfrøðingastørv og hýsir tilboðnum.
- Ábyrgdari: UMMR, Undirvísingarstýrið og kommunurnar/Kommunufelagið.
- Tíðarætlan: Tørvurin verður lýstur í 2022-23, og raðfesting og fyrireikingar gjørdar at seta tilboð í verk frá skúlaárinum 2023-24.

## Ein skipað tilgongd til at varnast mistrivnað og betra um trivnað hjá børnum og ungum

Trivnaður er eitt lyklaorð í arbeiðinum at fyribyrgja rúsevnismisnýtslu. Eitt barn ella ein unglingi, sum trívist, er í nógv minni vanda fyri at fara at misnýta rúsevni. Hetta vísir granskingin greitt[23], og er nevnt fleiri ferðir á fundum við hoyringarpartarnar.

Tess fyrr foreldur, starvsfólk ella onnur varnast, at eitt barn ella unglingi hevur trupulleikar at dragast við, lættari er tað at loysa trupulleikarnar og fyribyrgja, at støðan verður enn verri og trupulleikarnir varandi og óbøtandi. Somuleiðis eru tey samd um, at tað er lættari at fyribyrgja tíðliga, enn at byggja upp aftur, tá skaðarnir eru hendir. Samrøður, sum arbeiðsbólkurin hevur havt við persónar, sum hava ella hava havt rúsevnistrupulleikar og við avvarðandi hjá teimum, stuðla undir hesum.

Hoyringarpartarnir eru samdir um, at tað er týdningarmikið við tvørgeiraligum samstarvi, tá ið tað snýr seg um at varnast mistrivnað og betra um trivnaðin hjá børnum og ungum. Samstundis vísa fleiri teirra á, at tað kann verða ein trupulleiki at samskifta og samstarva tvørturum fakmørk. Fleiri ferðir varð nevnt, at lærarar, námsfrøðingar, heilsufrøðingar, sosialráðgevar, Sernám o.o. nýta ymisk fakhugtøk, og av somu orsøk standast ofta misskiljingar og ógreidleikar í samskiftinum teirra millum.

Hoyringarpartarnir hildu, at tað hevði verið skilagott at fingið felags samskiftis- og samstarvshættir, so tað betur bar til hjá teimum at samstarva tvørtur um fakmørk og geirar. Sum dømi nevndu fleiri teirra, at felags trivnaðar- og samrøðuamboð kundu verið partur av loysnini at fáa í lag samstarv tvørturum fakmørk. Hoyringarpartarnir nevndu eisini, at førleikamenning er neyðug, um fakfólkini skulu arbeiða við trivnaðaramboðum (eisini sum fakligt grundarlag) og fáa eitt greitt og mennandi samskifti við starvsfelagar, foreldur og onnur.

Fleiri fakbólkar og felagsskapir hava somuleiðis nevnt, at nógvir trupulleikar og nógvar misskiljingar kundu verið beind av vegnum, um ráðstevnur og verkstovur vórðu skipaðar um ymisk viðkomandi evni. Hesar kundu verið tvørfakligar, tvørgeiraligar ella fyri einum fakbólki í senn. Men høvuðsendamálið í hesum tiltøkum hevði verið at framt samstarv, tryggjað, at fakbólkarnir skiltu hvør annan, nýttu sama fakmál, kendu virkisøkini hjá hvørjum øðrum o.s.fr. Á henda hátt høvdu tey verið

[23] Ege, P, (2004) Stofmisbrug og Afhængighed hos Ung og Voksne

betur før fyri at vegleitt børnum og ungum og fyribyrgt, at tey “detta millum skipanir” vegna misskiljingar.

Hoyringarpartar hava kunnað um, at tað finnast fleiri háttaløg at varnast og betra um trivna hjá børnum. Sum dømi um slík háttaløg nevndu tey TÍTT (Tiltøk í Tøkum Tíma), samrøðuamboðini, sum vanliga verða brúkt í TÍTT-skipanini og ICDP (International Child Development Program). Tað er ikki einans í Føroyum, at mett verður, at vit hava brúk fyri slíkum háttaløgum. Londini kring okkum hava somuleiðis arbeitt við hesum farnu árini, og tí ber til at leita til tey at finna íblástur.

---

*TÍTT er ein amboðskassi við fleiri amboðum, har trivnaðarskjalið er høvuðsamboðið*

---

*TÍTT (Tiltøk í Tøkum Tíma)*

Nakrir dagstovnar og skúlar í Føroyum nýta amboðið Tiltøk í Tøkum Tíma – stytt TÍTT, til at meta um trivnaðin hjá børnum og ungum, og til at seta í verk neyðug tiltøk til at lofta støðuni, um okkurt er áfatt. Tað er SSP-ráðgevingin, sum hevur tikið stig til at nýta TÍTT-skipanina, sum tekur støði í danska tilfarinum “Tidlig opsporing og indsats”, stytt TOPI.

TÍTT er ætlað at vera eitt einfalt amboð til at síggja barnið, har barnið er.[24] Støðan hjá einstaka barninum verður býtt í tríggjar litir í einum trivnaðarskjali: Grønum, gulum og reyðum. Tá barnið trívist, er støðan grøn. Eru tað hinvegin viðurskifti, sum undra starvsfólkini, verður guli liturin nýttur, og hava tey orsøk at vera stúrin um barnið, kann støðan gerast reyð. Trivnaðarskjalið er eitt amboð at tryggja, at tað einstaka barnið verður sjónligt. Endamálið við at nýta hesar litir er, at møguligir trupulleikar verða loystir so tíðliga, sum til ber. Miðað verður eftir at taka støðuna í álvara, tá barnið er í gulari støðu, og harvið fyribyrgja, at barnið kemur í reyða støðu. Dentur verður lagdur á at síggja styrkir og møguleikar hjá barninum, og leggur skipanin upp til felags undran heldur enn at finna feilir. **Barnið** er ikki trupulleikin.

Samstarvið við foreldrini er ein grundarsteinur undir TÍTT og ein fyritreyt fyri at skilja møgulig tekin um, at barnið ikki trívist nóg væl, at skilja atburðin hjá barninum í samspæli við familju, stovn, skúla ella aðrar partar og at finna møguligar loysnir.

TÍTT er ein amboðskassi við fleiri amboðum, har trivnaðarskjalið er høvuðsamboðið. Av øðrum amboðum kunnu nevnast samrøðufrymil, tvørfakligur frymil, skiftisskjal og skiftisfundur, sum verða brúkt, tá ið eitt barn flytur úr einum stovni í annan t.d. úr barnagarð í skúla. Samstundis er TÍTT eisini ein arbeiðsháttur og ein strukturerað skipan.

Trivnaðarskjalið skal fyllast út 2-3 ferðir um árið. Hetta skapar ein struktur og er við til at økja tilvitanina og felags fakliga refleksión millum starvsfólkini.[25]

Starvsfólkini, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við frá stovnum, sum nýta TÍTT, eru sum heild nøgd við hetta amboð. Mett verður, at trivnaðarskjalið og mannagongdirnar hava styrkt fakliga samskiftið

[24] http://www.bvs.fo/verkaetlanin-titt-fer-nu-av-bakkastokki

[25] Royndarverkætlanin TÍTT – Tiltøk Í Tøkum Tíma – Ein støðulýsing á heysti 2016 s. 13

millum fakbólkar og styrkt førleikarnar hjá starvsfólkum at seta orð á trupulleikar, tá ið samskift verður við foreldur.

Ein skipað tilgongd at varnast mistrivnað og samskiftisamboð kunnu sostatt vera við til at skapa felags hugtøk og betra samskiftið, bæði millum fakbólkar og millum starvsfólk og foreldur. Tílík amboð kunnu eisini gera tað lættari at samskifta við eitt nú Sernám, tí at starvsfólkini eru greiðari um, júst hvør trupulleikin er, og hetta eigur at gera tað lættari og skjótari at fáa røttu hjálpina.[26]

Í síni tilgongd við TÍTT, brúkar SSP ofta amboðini “tann neyðuga samrøðan” og “byrjunarsamrøðan”. Hetta sæst m.a. í arbeiðinum á Strondum, har skúlin saman við Námi hevur valt henda leist.

Tá kannað verður, hvussu hóskandi skipan og amboð kunnu mennast, hevur tað týdning at kanna, hvussu TÍTT hevur hepnast, og hví onkrir partar ikki hava valt at taka TÍTT til sín.

---

*ICDP (International Child Development Program) er ein sálarfrøðilig tilgongd og samskiftisháttur, sum í stóran mun snýr seg um at skapa relatiónir og byggja relatiónsførleikar*

---

*ICDP (International Child Development Program)*

Barnabati nýtir samskiftiskonseptið ICDP í m.a. mentorskipanini og bjóðar undirvísing til serliga námsfrøðingar og lærarar í hesum. ICDP (International Child Development Program) er ein sálarfrøðilig tilgongd og samskiftisháttur, sum í stóran mun snýr seg um at skapa relatiónir og byggja relatiónsførleikar – serliga millum vaksin og børn. Dentur verður lagdur á grundan (reflektión) í samskiftinum og arbeiðinum sum heild.[27]

*Samrøðu- og samstarvsháttarlag í Føroyum*

Við støði í tí, sum hoyringarpartarnir hava ført fram heldur arbeiðsbólkurin, at tað er týdningarmikið at tillaga ella menna eitt samrøðu- og samstarvsháttarlag, so fakfólk verða betur før fyri so tíðliga, sum til ber, at varnast mistrivnað hjá børnum og ungum og kunnu seta hóskandi tiltøk í verk fyri at bøta um trivnaðin hjá teimum. Arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt, hvat háttalag eigur at verða brúk í Føroyum, men tað er týdningarmikið, at háttalagið, sum verður valt hóskar til føroysk viðurskifti. Arbeiðsbólkurin mælir til, at viðkomandi partar, t.v.s. námsfrøðingar, lærarar og heilsufrøðingar luttaka í arbeiðinum at tillaga ella menna eitt samrøðu- og samstarvsháttalag. Orsøkin til, at hesir fakbólkar eru nevndir er, at hesir fakbólkar hava ein lyklaleiklut, tá tosað verður um børn og ung, sum ikki trívast ella hava avbjóðingar. Um til bar at finna eitt felags samskiftis- og trivnaðaramboð, soleiðis at lærarar, námsfrøðingar og heilsufrøðingar kunnu nýta tað, betrast fortreytirnar fyri greiðum og mennandi samskifti millum partarnar. Arbeiðið við at menna hesi amboð og háttaløg kundi verið

[26] Royndarverkætlanin TÍTT – Tiltøk Í Tøkum Tíma – Ein støðulýsing á heysti 2016 s. 16
[27] Til ber at lesa meiri um ICDP her: https://danskcenterfor-icdp.dk/icdp-hvad-er-det/

staðsett í Námi, tí millum kjarnuuppgávurnar og kjarnuførleikarnar hjá Námi eru at menna og stuðla læring og trivnaði.

Seinnu árini hevur hátturin TÍTT verður brúktur í nøkrum dagstovnum og skúlum. Arbeiðsbólkurin heldur, at tilboðið um eitt samrøðu- og samskiftisháttalag eigur at verða víðkað til at fevna um dagstovnaøkið, fólkaskúlan og møguliga eisini miðnám, tí tað er ov avmarkandi bert at veita yngstu børnunum hetta tilboð.

Við at samantvinna trivnaðar- og samrøðukonsept verður ein rættiliga umfatandi førleikamenning og sjálvsmenning framd, so lærarar, námsfrøðingar, heilsufrøðingar og onnur betur skilja og kunnu nýta hugtøkini og arbeiðshættirnar.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt møguleikan, at eitt felags samrøðukonsept verður partur av útbúgvingini hjá lærarum, námsfrøðingum og sjúkrarøktarfrøðingum. Hesar tríggjar útbúgvingar eru allar á Fróðskaparsetrinum, so hetta kundi verið samskipað á ein hátt, so til bar at gagnnýta tilfeingið munadygt.

Á hoyringarfundi greiddi ein persónur frá, at hann var til útgreiningar sum 15-ára gamal, har barnaverndin var við. Men av tí, at persónurin ikki var edrúur, bar ikki til at útgreina trupulleikarnar. Men eingin eggjaði honum til at royna aftur ella at avrúsa seg, hóast talan týðiliga var um sjálvmedisinering. Arbeiðsbólkurin metir, at tiltøkini og førleikamenningin, sum nevnd eru omanfyri, kundu havt minkað um vandan fyri slíkum misskiljingum og mistøkum, tí partarnir høvdu verið greiðari um sín leiklut, og hvussu teir best kundu stuðla og hjálpt hesum unga, sárbæra menniskjanum.

**Tilmæli 15**
**Kanna, um til ber at menna eina skipan, har til ber at varnast mistrivnað tíðliga. Skipanin kann so fevna um dagstovnar, skúla, frítíðarskúla og møguliga miðnám og aðrar viðkomandi stovnar og skipanir**

- Endamálið við átakinum er, at starvsfólk gerast varug við mistrivnað hjá børnum og ungum so tíðliga sum møguligt, soleiðis at øll tey, sum eru rundanum barnið ella unglingin í felag kunnu broyta umstøðurnar ella seta møgulig tiltøk í verk fyri at bøta um trivnaðin.
- Mettur kostnaður: Títt verður verður brúkt í nøkrum dagstovnum og skúlum. Neyðugt er við fígging til vegleiðarar at ráðgeva skúlum og dagstovnum, um ætlanin er at umskipa og menna hesa ella aðra skipan. Hetta krevur samskifti við kommunurnar og Kommunufelagið bæði um samstarv og kostnað.
- Ábyrgdari: UMMR og Nám í samstarv við kommunurnar.
- Tíðarætlan: 2022-2027. Fyrireiking byrjar í 2022, og síðani verða trivnaðar- og samskiftis-amboð stigvíst tikin í nýtslu. Miðað verður eftir, at skipanin í 2028 er tikin í nýtslu í øllum skúlum, dagstovnum og øðrum viðkomandi stovnum/skipanum kring landið. Neyðugt verður, at verkætlanarleiðarar ella ráðgevar verða settir at veita dagstovnum og skúlum ráðgeving, sparring og fakliga menning í arbeiðinum. Ráðgevingin kundi verið skipað í Námi.

**Tilmæli 16**
**Undirvísa fakfólki í samrøðu- og samskiftisamboðum**

- Endamálið er at veita námsfrøðingum, lærarum, heilsufrøðingum og øðrum innlit og førleika at samrøða undrandi/grundandi um trupul evni sínámillum og við foreldur og avvarðandi. Samskiftis- og samrøðuamboðini eiga at verða partur av undirvísingini í lærara-, námsfrøðinga- og sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingunum.
- Mettur kostnaður: kr. 150.000 um árið í trý ár umframt møguligar vikarútreiðslur.
- Ábyrgdari: UMMR og kommunurnar í samstarvi við Nám, sum fyriskipar skeiðini.
- Tíðarætlan: 2023-25.

**Tilmæli 17**
**Skipa regluligar verkstovur ella ráðstevnur um viðkomandi evni sum sálarheilsu, ADHD, Autismu, trauma, vanrøkt, rústrupulleikar fyri ymiskum fakbólkum til tess at menna tvørgeiraliga vitan og felags orðfeingi**

- Endamálið við átakinum er at styrkja felags tilvitið um ymsar støður og trupulleikar og geva heilsufrøðingum, námsfrøðingum, lærarum, sosialráðgevum, sálarfrøðingum og øðrum eitt felags samskiftisstøði at arbeiða frá við felags orðfeingi og hugtøkum.
- Mettur kostnaður: Kann helst skipast innan verandi fíggjarkarmar hjá nevndu fakbólkum. Neyðugt verður at finna ein leist fyri, hvussu slík átøk kunnu skipast í arbeiðs- og undirvísingarætlanunum.
- Ábyrgdari: UMMR saman við HMR og AMR.
- Tíðarætlan: Eftir tørvi.

## Eftirútbúgva, førleikamenna og kunna lærarar, námsfrøðingar og onnur fakfólk um ADHD

ADHD er eitt neuropsykiatriskt menningarórógv, sum kann ávirka fatanarliga, kensluliga og sosiala førleikan. Børn og ung við ADHD kenna seg ofta øðrvísi enn onnur, og eru tí ofta einsamøll og uttanfyri felagsskapin. Hetta hevur við sær, at tey fáa lágt sjálvsvirði. Harafturat hava tey ofta eyka avbjóðingar, sum kunnu versna, um onki verður gjørt, t.d. angist, tunglyndi, atferðartrupulleikar, motoriskar trupulleikar, innlæringstrupulleikar og hábrøgd.

WHO metir, at umleið 5% av øllum børnum hava ADHD. Tíverri finnast ikki hagtøl um hetta í Føroyum.

Flestu børn og ung við ADHD hava tørv á, at umstøður teirra – og serliga skúladagurin – er skipaður soleiðis, at hann er væl lagdur til rættis, so at næmingarnir vita, hvat dagurin inniber og, hvat verður væntað av teimum. Tørvur er tí á fólki, sum hava vitan um og førleikar til at arbeiða við børnum og ungum við ADHD.

Lærarar og námsfrøðingar hava ikki altíð neyðugu grundvitanina um ADHD, og tí gerst gerandis-dagurin hjá hesum børnum og ungum torførari enn neyðugt. Tað er ein sannroynd, at persónar við ADHD ofta hava eina trupla skúlatíð, og nógv teirra kenna seg øðrvísi og hava eitt lágt sjálvsvirði.

Um lærarar og námsfrøðingar ikki hava grundvitan um ADHD, hava teir trupult við bæði at skapa góð sambond við næmingin og foreldur at børnum við ADHD. Neyðugt er at stuðla og rúma foreldrum og skapa eitt virðiligt samskifti, so at samstarvið verður mennandi fyri báðar partar. Hetta er ábyrgdin hjá øllum, sum luttaka í samstarvinum um barnið, so tey vaksnu (foreldur, lærarar og námsfrøðingar) eru týdningarmikið tilfeingi og hjálp hjá hvørjum øðrum í teimum átøkum og skipanum, sum eru neyðugar fyri, at barnið kann trívast og mennast.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at skipað verður fyri skeiðum og eftirútbúgvingum um ADHD fyri lærarum og námsfrøðingum. Eisini eigur at verða umhugsað at bjóða tílík skeið til eitt nú sosialráðgevar og heilsufrøðingar. Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at kunnleiki um og innlit í ADHD verður partur av lærara- og námsfrøðingaútbúgvingini.

ADHD-felagið metir, at tørvur er á eini eftirútbúgving fyri lærarar og námsfrøðingar soleiðis at teir kunnu gerast serligir ADHD-vegleiðarar. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum, og mælir til, at hetta verður kannað nærri. Hugt eigur at verða eftir, hvussu læraraútbúgvin er skipað, tá tað snýr seg um at undirvísa næmingum við ADHD og øðrum avbjóðingum.

Í arbeiðinum at menna vitanargrundarlagið hjá nevndu og øðrum fakbólkum, hevur ADHD-felagið ætlanir um at týða og tillaga nakrar norskar vegleiðingar, sum eru ætlaðar dagstovnum, skúlum og barnaverndartænastum. Við støði í vegleiðingunum ætlar ADHD-felagið at skipa fyri skeiðum, evnisdøgum og kunning. Tá hugsað verður um, hvussu nógv ung hava avbjóðingar við ADHD, metir arbeiðsbólkurin, at hetta ljóðar skilagott, og mælir til at fígging verður játtað til hetta átak.

**Tilmæli 18**
**Førleikamenna fakfólk, sum arbeiða við børnum og ungum við ADHD.**

- Endamálið við átakinum er at førleikamenna og eftirútbúgva lærarar, sum undirvísa børnum og ungum við ADHD, námsfrøðingar og onnur fakfólk, sum tíðum koma í samband við børn og ung við ADHD.
- Mettur kostnaður: Mælt verður til, at Nám fyriskipar skeiðini. Útreiðslur til undirvísarar á skeiðunum og møguligar vikarútreiðslur hjá skúlum og stovnum. Umleið kr. 500.000 í eitt trý-ára skeið.
- Ábyrgdari: UMMR, Sernám og Kommunurnar.
- Tíðarætlan: 2023-25.

**Tilmæli 19**
**Vitan um og førleikar at ráðgeva um ADHD verða partur av undirvísingini í lærara- og námsfrøðingaútbúgvingunum**

- Endamálið við átakinum er, at lærarar og námsfrøðingar sum heild fáa størri vitan og førleikar at arbeiða við børnum og ungum við ADHD.
- Mettur kostnaður: Verður partur av undirvísingini í náms- og sálarfrøði.
- Ábyrgdari: UMMR.
- Tíðarætlan: 2025.

**Tilmæli 20**
**Týða og tillaga tilfar um ADHD til dagstovnar, skúlar og barnavernd**

- Endamálið við átakinum er at økja fakliga kunnleikan um ADHD, soleiðis at børn og foreldur fáa røttu hjálpina, og at hjálpin verður veitt tíðliga.
- Mettur kostnaður: kr. 50.000 um árið í tvey ár.
- Ábyrgdari: UMMR í samstarvi við AMR og kommunurnar.
- Tíðarætlan: Tilfarið verður týtt og tillagað í samstarvi við Nám og framleitt í 2022-23. Síðani skipar Nám í samstarvi við ADHD-felagið fyri skeiðum, verkstovum og aðrari kunning.

## Undirvísingartilfar um rúsevni og rústrupulleikar, ætlað fólkaskúla og á miðnámi

Tá ið arbeiðsbólkurin tosaði við ung á miðnámi, gjørdu fleiri teirra vart við, at tey ikki hildu, at undirvísingin og kunningin um rúsevni og vandarnar av hesum vóru nøktandi. Tey hildu m.a. at nógv av tilfarinum var gamalt, og undirvísingin tí ikki altíð var í trá við ungdómsmentanina nú. Næmingarnir kundu hugsað sær meiri sakliga og faktakenda kunning, har tey fingu greitt at vita, hvat og hvussu – og ikki so nógvar lyftar peikifingrar ella ræðudømi.

Næmingarnir vístu á, at í nógvum førum var undirvísingin í rúsevnum skipað ov seint í skúlatíðini. Tey nevndu dømi um næmingar, sum vóru byrjaðir at selja rúsevni í 8. flokki – og hetta var áðrenn tey høvdu lært nakað um rúsevni í skúlanum.

> *"Katastrofu-retorikkurin hjálpir neyvan teimum, sum einki hava at missa"*
> *(næmingur í miðnámi)*

Arbeiðsbólkurin fekk ta fatan, eftir at hava tosað við tey ungu, at fyribyrgjandi undirvísingin um rúsevni kundi verið betur skipað. Tey ungu vístu á, at tey fingu ein styttri fyrilestur frá einum fyrrverandi misbrúkara, sóu ein film, ella at lærarin undirvísti í ein tíma ella tveir í evninum. Helst hevði úrtøkan verið betri, um undirvísingin um rúsevni byrjaði fyri, var betur skipað, og at tikið varð afturíaftur regluliga. Tey ungu skiltu væl, at rústrupulleikar ikki bara snúðu seg um einstaklingin, og at tí átti frálæran eisini at leggja dent á tryggleika, stuðulsnetverk, og hvør hjálp var at fáa.

Á einum fundi fekk arbeiðsbólkurin at vita frá einum persóni, at hann var byrjaður at rúsa seg sum 13 ára gamal. Hann visti, at hetta helst var eitt sindur vandamikið, men skilti ikki, hvørjar avleiðingarnar vóru. Hevði hann vitað, at rúsevnisnýtslan kundi føra til angist og sálartrupulleikar, hevði tað kanska virkað fyribyrgjandi.

Arbeiðsbólkurin fekk ta fatan, eftir at hava tosað við tey ungu, at fyribyrgjandi undirvísingin um rúsevni ikki er nóg væl skipað, har tey ungu vístu á, at tey fingu ein styttri fyrilestur frá einum fyrrverandi misbrúkara, sóu ein film, ella at lærarin undirvísti í ein tíma ella tveir í evninum. Helst hevði úrtøkan verið betri, um undirvísingin um rúsevni byrjaði fyri, varð betur skipað, og tikið varð afturíaftur regluliga.

Mælt verður til, at undirvísing um rúsevni verður hugsað inn í eina størri heild saman við rúsdrekka, har evni sum lívsmeistran, heilsa, seksualundirvísing, bólkatrýst og at seta mørk eru høvuðsevni. Námsætlanir og undirvísingarvegleiðingar eiga at verða dagførdar, so tær eru í samsvari við hetta. Í løtuni verða nógv av hesum evnum eisini viðgjørd í ymsu lærugreinunum, sum t.d. lívfrøði og føroyskum. Tíð og fígging er sett av til skúlavegleiðing, har hesi evni eisini eiga at vera viðgjørd.

**Tilmæli 21**
**Undirvísingartilfar og skeið um rúsevni og rústrupulleikar**

- Endamálið við átakinum er, at børn og ung fáa fakliga vitan og kunning um rúsevni og rúsdrekka, herundir avleiðingar, bundinskap og fyribyrging
- Mettur kostnaður: Umleið kr. 100.000 um árið í tvey ár. Er partur av undirvísingini. Útreiðslur verða til at gera tilfar um evnið og skeið fyri lærarum.
- Ábyrgdari: UMMR.
- Tíðarætlan: 2023-26. Nám ger tilfar og skipar fyri skeiðum, verkstovum og aðrari kunning.

## Neyðtelefonir og hjálpartelefonir hjá Barnabata og øðrum

Í hoyringarfundunum hoyrdi arbeiðsbólkurin fleiri søgur um fólk, sum høvdu havt tørv á hjálp, men sum ikki vistu, hvar tey skuldu venda sær. Vit hoyrdu nógv rósandi orð um Tú og Eg -ráðgevingina hjá Barnabata, men fatanin var, at hon fyrst og fremst var til børn, og at fólk ikki vistu, nær tey kundu ringja.

Arbeiðsbólkurin valdi at kalla Barnabata inn til ein eyka fund fyri burturav at tosa um telefon-ráðgeving og fáa kanna ivamál og møguleikar.

Tú og Eg -ráðgevingin hjá Barnabata er eitt ókeypis lág-gáttartilboð, sum hevur verið virkið síðani 1980 og er ætlað børnum og ungum, serliga teimum yvir 13 ár. Til ber at vera navnleysur, tá tú ringir, umframt at til ber at samskifta ella seta spurningar í online-kjatti ella telduposti. Meirilutin av teimum, sum ringja eru millum 15 og 24 ár. Ráðgevingin svarar í vanligari arbeiðstíð og so 2 tímar hvørt kvøld umframt leygar- og sunnukvøld (uttan mun til, um talan er um halgidagar). Tey royna altíð at hava tríggjar ráðgevar tøkar, so tey, sum ringja, ikki verða noydd at bíða. Millum vanligastu evnini eru happing, tunglyndi og angist, at vera við barn, og sjálvmorðstankar.

Barnabati metir, at skipanin eigur at vera tøk alt samdøgrið, og at allar hjálparlinjur eiga at verða skipaðar soleiðis, at børn og ung hava eitt nummar at ringja til alla ráðgeving og vegleiðing. Henda ætlan samsvarar væl við málsetningarnar hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum[28] og tilmælum frá Evropeiskum myndugleikum og ST. Nummarið til Tú og Eg -ráðgevingina er nú 116 111, og heimasíðan, sum er í gerð, sum fær egnan samleika á 116111.fo. Hetta er í tráð við altjóða tilmæli og málsetningar. Á nýggju heimasíðuni eru tey í holt við at útbyggja brævkassan og savnið við spurningum og svarum, sum higartil hevur verið á heimasíðuni hjá Barnabata.

Við hesum hevur Barnabati átikið sær samskipandi leiklut, har 116 111 verður atgongdin til allar tær hjálparlinjur, sum tørvur verður á. Tankin er, at tilboðini, sum nú eru, og onnur, sum koma, kunnu knýtast at hesum nummari. Tá ringt verður inn, verður telefonin svarað, mett verður um støðuna og hvønn, stillast kann til. Hetta kann t.d. vera KRIS, Beran, Sinnisbati, ADHD-felagið, Títt Rúm, Megna títt lív, heilsufrøðingar ella sálarfrøðingar. Barnabati metir, at kostnaðurin at samskipa og víðka tilboðið til at vera alt samdøgrið við nóg nógvum samskiparum, ráðgevum og sálarfrøðingum er umleið 3 milliónir krónur um árið.

Vert er at nevna, at 116 111 verður nýtt sum ein óformellur partur av almennu tilbúgvingini í Føroyum. Tað er vanligt, at upplýst verður um hesa ráðgeving, tá vanlukkur henda, har børn verða ávirkað.

Í Danmark finst eitt tilboð, sum eitur HeadSpace. Hetta tilboð hevur fingið nógva viðurkenning, og byggir á royndir í Avstralia, sum so eru tillagað til norðurlendsk viðurskifti. Talan er um eina hjálparlinju og nøkur støkk-inn tilboð kring landið. Í Føroyum hevur Sinnisbati arbeitt við ætlanum at skipa hetta tilboð. Arbeiðsbólkurin metir, at skipan og arbeiðslag í HeadSpace líkist ráðgevingini hjá Barnabata. Tí metir arbeiðsbólkurin, at ein gongd leið er, um Sinnisbati samstarvar við Barnabata um 116 111. Møguliga er hetta ikki heilt í tráð við ætlanirnar hjá Sinnisbata, men við tí avmarkaða tilfeinginum, sum vit hava í Føroyum, mugu vit royna at eggja til samstarv og samskipan fyri at fáa sum mest burtur úr. Mælt verður tí til, at kannað verður, hvussu tílíkt samstarv kann fáast at virka, og um tørvur er á samstarv við aðrar partar – serliga um ætlanin eisini er at hava eitt staðbundið tilboð, har fólk kunnu koma á gátt. Arbeiðsbólkurin metir, at Fountainhúsið helst er eitt boð um ein samstarvspart hjá Sinnisbata til at skipa eitt drop-in tilboð.

Víst er á, at vit í Føroyum mangla eina foreldralinju, har fólk, sum sita við eini avbjóðing sum foreldur, kanska ivast í sínum foreldraførleikum ella hava brúk fyri nøkrum góðum ráðum, kunnu ringja. Tá foreldur eru ørkymlað, eru ikki nógvir møguleikar, um tú ikki hevur eitt gott netverk, sum tú kanst líta á – og at venda sær til Gigni ella barnavernd kann tykjast sum eitt ov ógvusligt stig.

Barnabati hevur greitt frá, at alsamt fleiri foreldur ringja um síni børn, uppaling, sálarheilsu og vandatekin. Vøksturin hevur verið serliga stórur í Korona-tíðini. Hóast tey ongantíð vísa slíkum frá sær, so halda tey, at henda ráðgeving kann skipast betur og vera eitt fast tilboð, sum tey kunnu lýsa við. Harvið kunnu fólk kenna seg tryggari og vita, hvar tey kunnu venda sær. Barnabati hevur kannað møguleikarnar fyri at fáa útbúgvið eitt hóskandi tal av familju- og foreldraráðgevum, sum kunnu verða knýttir at hjálparlinjuni. Barnabati kann frá august 2022 bjóða vegleiðaraútbúgving, sum gevur

[28] Norden skal være det bedste sted i verden for børn og unge", fastslår Nordisk Ministerråds strategi for børn og unge. Det betyder, at Norden skal være foregangsregion i arbejdet med at sikre, at børn og unge trives, kender og er i stand til at udøve deres rettigheder og tager del i beslutninger, der vedrører dem. Børn og unge er vigtige her og nu – ikke kun i fremtiden. Kelda: Norden.org

førleika at vegleiða foreldur til at styrkja relatiónir til teirra børn, og sum førleikamennir námsfrøðilig starvsfólk í relatiónsarbeiði.

Nógv foreldur aftra seg við leita sær hjálp frá t.d. barnaverndini, tá tað snýr seg um egnan foreldraleiklut ella børn. Tey eru bangin um, hvat málið kann enda við, ella at tey verða stemplaði sum vánalig foreldur.

Barnabati upplivir eisini, at fakfólk ringja til Tú og Eg -ráðgevingina at leita sær ráð. Tey vísa ongum frá sær og vilja hjálpa eftir førimuni. Men hetta vísir, at talan ikki bara er um leikfólk, sum kenna seg ótrygg og ivast. Tí meta tey, at vit møguliga hava brúk fyri einari tænastu ella einum forum fyri tey, sum sjálvi skulu vera "tann sterki" fakpersónurin, og at førleikamenning og dagføring av førleikum ikki eigur at vera undirmett. Ein slík tænastu, har fakfólk kunnu ringja inn at sparra og leita sær ráð verður ikki skipað sum ein samdøgurtænasta, men fer helst at svara í vanligari arbeiðstíð. Barnabati bjóðar almenna námsfrøðiliga/didaktiska og sernámsfrøðiliga vegleiðing.

**Tilmæli 22**
**Víðka telefonráðgevingina 116 111, so hon svarar 24 tímar um samdøgrið og samskipa ymsu hjálparlinjurnar í Føroyum**

- Endamálið við átakinum er, at børn og ung kunnu ringja til eitt telefonnummar (116 111) og fáa hjálp alt samdøgrið. Hetta krevur nógv av samskiparum, ráðgevum og sálarfrøðingum til at svara fyrispurningum og vísa víðari til tann, sum best fær hjálpt. Játtanin fevnir um løn og førleikamenning og annað.
- Mettur kostnaður: kr. 3.000.000 árliga.
- Ábyrgdari: AMR.
- Tíðarætlan: 2022-23.

**Tilmæli 23**
**Kanna møguleikarnar at skipa eitt HeadSpace-líknandi-tilboð í Føroyum sum eitt samstarv millum Sinnisbata, Barnabata og aðrar felagsskapir/stovnar**

- Endamálið við átakinum er at styrkja og betur samskipa tilboð um hjálp til ung við sálarligum ella sosialum avbjóðingum. Um játtanin til Barnabata verður økt, eigur at bera til at veita HeadSpace-líknandi ráðgeving. Játtanin er tí til førleikamenning (skeið) og lýsingartilfar.
- Mettur kostnaður: umleið kr. 100.000 árliga.
- Ábyrgdari: AMR og HMR.
- Tíðarætlan: 2024.

**Tilmæli 24**
**Víðka telefonráðgevingina hjá Tú og Eg -ráðgevingini til at hava eina foreldraráðgeving**

- Endamálið við átakinum er, at foreldur kunnu leita sær ráð og vegleiðing um uppaling, foreldraleiklut og støðuna hjá barninum (sálarheilsu, trivnað o.a.). Til hetta krevst, at Barnabati førleikamennir og útbúgvir umleið 20 ráðgevar. Vegleiðaraútbúgvingin tekur umleið 7-9 mánaðir.
- Mettur kostnaður: kr. 300.000, sum er ein eingangsútreiðsla til at útbúgva vegleiðararnar.
- Ábyrgdari: AMR.
- Tíðarætlan: 2024.

**Tilmæli 25**
**Skipa eina faktelefon, sum kann ráðgeva fakfólki, sum hava við børn og ung at gera. Faktelefonin verður virkin í vanligari arbeiðstíð, og hevur sama telefonnummar, sum restin av ráðgevingarlinjunum, 116 111**

- Endamálið við átakinum er, at fakfólk, sum eru í iva ella ørkymlaði hava onkra staðni at venda sær við truplum spurningum og fáa sparring og ráðgeving frá øðrum skikkaðum fakfólki. Barnabati samskiftir við aðrar felagsskapir og fakpersónar.
- Mettur kostnaður: ein leys meting er kr. 100.000 árliga.
- Ábyrgdari: AMR, HMR, UMMR.
- Tíðarætlan: 2024.

## Títt Rúm (fyrr: Øll hava rætt til góð barnaár)

Fyri nøkrum árum síðani (2012) byrjaði Blái Krossur átakið “Øll hava rætt til góð barnaár.” Íblástur til, hvussu hetta skuldi skipast, kom fyrst og fremst úr Noregi. Í 2021 varð navnið broytt til “Títt Rúm”, sum er ætlað at lýsa betur, at tilboðið ikki bert vendir sær til børn, og at her er talan um eitt trygt stað at viðgera truplu royndirnar. Hóast Blái Krossur í Føroyum stendur fyri tilboðnum, so er tað ikki knýtt at ávísum viðgerðarstaði.

Títt rúm byrjaði sum ein verkætlan, men er nú vaksið so nógv, at hetta er vorðið eitt skipað tilboð. Dentur verður lagdur á at hava vælskikkað starvsfólk, sum veita einstaklingum og bólkum ráðgeving.

Orsøkin til, at farið varð undir slíkt átak, var, at í arbeiðinum við menniskjum við rústrupulleikum – serliga rúsdrekka, varð vorðið sera greitt, at rústrupulleikar ikki bara ávirka misnýtaran, men eisini raka familjuna meint. Í familjum við rústrupulleikum er vanligt, at misnýtsla, skomm og bangni fyllir nógv, og ofta kemur í staðin fyri tryggleikan, álitið og sunnar raðfestingar. Átakið mentist til eitt tilboð, har avvarðandi hjá teimum, sum hava rústrupulleikar kundu leita sær hjálp ella fáa tilboð um hetta. Serliga var dentur lagdur á, at geva børnum og ungum møguleikan at tosa um sínar upplivingar, seta orð á sínar kenslur og fáa vegleiðing og hjálp.

Títt Rúm veitir ókeypis bólka- og einstaklingasamrøður til børn, ung og vaksin í aldrinum 0-35 ár, sum hava eitt foreldur við rústrupulleikum (t.v.s. antin hava ella hava havt trupulleikar við rúsdrekka- ella rúsevnismisnýtslu). Harumframt bjóðar Títt Rúm eisini foreldra- og familjusamrøður. Fyrr vendi

tilboðið sær mest til børn, men ásannandi, at avleiðingarnar av at vaksa upp undir slíkum umstøðum seta djúp spor, sum ikki altíð eru so sjónlig, varð aldursmarkið í 2021 hækkað úr 25 árum uppí 35 ár. Hetta kann hava stóran týdning, tí nøkur børn, sum eru vaksin upp í heimum við rúsmisnýtslu, gerast ikki varug við seinárinini ella egnu avbjóðingar, fyrrenn tey sjálvi fáa børn og skulu átaka sær foreldraleiklutin.

Bólkarnir verða býttir soleiðis, at luttakararnir eru so javnir í aldri sum gjørligt. Í tíðarskeiðinum august 2020 til mars 2021 vóru 7 bólkar við um. 6-8 persónum í hvørjum bólki: 2 barnabólkar, 2 tannáringabólkar og 3 ungdómsbólkar. Men hetta var áðrenn tilboðið broytti navn og víðkaði um virksemið.

---

*Besti mátin at hjálpa børnum er at hjálpa foreldrum*

---

Tá umboð fyri arbeiðsbólkin í desember 2021 høvdu samrøðu við leiðaran fyri Títt Rúm, greiddi hon frá, at tey tá høvdu 3 kvinnur, sum vóru við barn, í viðgerð. Hetta var ikki tí, at tær sjálvar høvdu nakran rústrupulleika, men tí at tær vóru vaksnar upp í familjum við rústrupulleikum. Tær høvdu tí ikki lært við sunnum fyrimyndum, hvussu tað er at vera foreldur. Vegleiðararnir í Títt Rúm kunna tí hjálpa og fyrireika hesar kvinnur til at fáa børn og ansa teimum. Samstundis er ætlanin við hesi viðgerð at fyribyrgja føðidepressiónum og at fyrireika mammurnar til tær óvæntaðu kenslurnar, sum ofta hava røtur í teirra egna uppvøkstri og ótryggleika. Ein lyklasetningur í hesum sambandi kundi verið: “Besti mátin at hjálpa børnum er at hjálpa foreldrum.”

**Tilmæli 26**
**Endurskoða stuðulsjáttanina, sum Títt Rúm hevur á fíggjarlógini**

- Endamálið við átakinum er at kanna játtanina til Títt Rúm, so tilboðini til børn, ung, avvarðandi teirra umframt royndarskipanin til kvinnur, ið eru við barn, kunnu skipast í eini tryggari legu.
- Mettur kostnaður:
- Ábyrgdari: HMR.
- Tíðarætlan: 2024.

## Ættarliðsavbjóðingar (generational problems)

Sum eitt ískoyti til frágreiðingina um arbeiðið hjá “Títt Rúm”, heldur arbeiðsbólkurin tað vera viðkomandi at viðgerða eina avbjóðing, sum ofta ikki fær so nógva rúmd í kjakinum um rúsdrekka og rúsevni – nevniliga ættarliðsavbjóðingar.

Sama sannroynd, sum fekk Bláa Kross at skipa tilboðið Títt Rúm, kom fram á fleiri hoyringarfundum – nevniliga at rústrupulleikar ikki bara raka tann rúsaða, men øll tey, sum eru um misnýtaran – serliga familjuna.

*Um tú veksur upp í eini dysfunktionellari familju, so kann tað dysfunktionella tykjast at vera tað normala*

Fleiri hoyringarpartar greiddu frá avbjóðingum og misskiljingum, tá teir tosaðu um seinárin og ættarliðstrupulleikar, har ættarlið eftir ættarlið kunnu hava nærum somu trupulleikar. M.a. nevndi ein hoyringarpartur, at familjuviðurskiftini í onkrum familjum bóru tekin um alkoholtrupulleikar, hóast hesir ikki vóru aktuellir, men ein leivd frá undanfarna ættarliðinum. Onkur segði enntá, at hetta kanska var ein blindvinkul hjá barnaverndum. Tey søgdu seg hava sæð fleir i dømi um, at stórt arbeiði varð gjørt fyri at finna onkran læringar- ella menningartrupulleika hjá børnum, har tann mest eyðsýnda avbjóðingin var foreldraførleiki og familjuviðurskifti orsakað av rúsmisbrúki ella harðskapi í undanfarna ættarliði. Tey høvdu snøgt sagt ikki lært, hvussu tey skuldu vera foreldur og endurtóku mynstrini frá sínum egna uppvøkstri. Fyri at lýsa, hvussu hetta hekk saman, og hvussu álvarsligt tað er, søgdu nakrir hoyringarpartar m.a.: "Um tú veksur upp í eini dysfunktionellari familju, so kann tað dysfunktionella tykjast at vera tað normala."

## Sunnir felagsskapir

Ferð eftir ferð hoyra vit, at sunnir felagsskapir hava stóran týdning fyri trivnað. Hetta tykist sjálvsagt, tí flest øll menniskju hava ein tørv á sosialari samveru. Men hjá børnum og ungum hava hesi sambond alstóran týdning fyri at mennast sum menniskju og samfelagsborgarar.

Felagsskapurin er har, vit hoyra til, har vit kenna okkum vælkomin, og har vit kunnu leita okkum hjálp og stuðul.

Hjá børnum og ungum, sum hava avbjóðingar, kann tann sunni felagsskapurin – eitt ítróttarlið, ein tónleikabólkur, ein spæliklubbi, eitt ungdómshús ella ein skótapatrulja – vera eitt akker. Felagsskapurin kann vera staðið, har tey kenna seg trygg, møta vinum, fáa sunnar avbjóðingar og fáa góðar vanar.

Hinvegin eru alt ov nógv, sum ikki finna henda felagsskap nakrastaðni. Nógv av teimum, sum dragast við rústrupulleikar greiða frá, at tey sum ung kendu, at tey ikki hoyrdu til. Nógv av teimum høvdu trupulleikar heima, høvdu sálarligar avbjóðingar ella vórðu happað. Tey høvdu ongan felagsskap, har tey kendu seg væl. Tá tey so byrjaðu at drekka ella taka rúsevni, so funnu tey saman við øðrum, sum eisini rúsaðu seg, og tað gjørdist nakað, sum tey høvdu til felags. Tað var ein lætti, endiliga at passa inn onkrastaðni. Eisini nevna fleiri, at sjálvur rúsurin fyllir eitt tómrúm – hann kemur í staðin fyri tað, sum vantar, soleiðis at hann á onkran hátt nøktar tørvin á at hoyra til ella at kenna umsorgan.

Sum samfelag eiga vit tí at eggja teimum ungu at søkja teir sunnu felagsskapirnar, og gera fortreytirnar og umstøðurnar so góðar sum møguligt, fyri at hesir felagsskapir kunnu blóma. Vit eiga tí at ala fram fjølbroytt tilboð, sum eru inkluderandi og stuðlandi, og vit eiga at stuðla og bjóða hóskandi høli ella venjingarumstøður.

## Ítróttur

Fleiri ítróttarfeløg hava víst á, at um tey høvdu fleiri pengar at arbeiða við, bar betur til at skipa venjingarnar og virksemið hjá felagnum, so tey høvdu røttu venjararnar og fólkini. Sum nú er, er ofta ikki nóg mikið av peningi til at løna lyklafólkum, so virksemið verður hildið uppi av ovbyrjaðum sjálvbodnum venjarum og liðleiðarum. Við betri fígging ella betri skipanum halda tey, at tey kundu skapt betri umstøður til trivnað og megna betur at síggja og lofta teimum, sum kanska ikki hava tað gott.

Hóast hetta sjónarmið frá ítróttarfeløgum er áhugavert, og at størri stuðul heilt víst hevði munað, so er vert at nevna, at ítróttur, sum er, fær rættuliga fitt av stuðli á fíggjarlógini og part av yvirskotinum frá ítróttarvedding, ímeðan ítróttarfeløgini ofta fáa stuðul frá kommununum, privatum feløgum og einstaklingum umframt limagjøld, atgongumerki o.a. Men sjálvsagt er stórur munur á ítróttargreinum og ítróttarfeløgum, hvussu nógvan pening, tey klára at savna, og hvussu tey kunnu raðfesta virksemið.

Ein afturvendandi spurningur um pening og fígging til ítróttarfeløg er, um javnvágin millum elituna og breiddarítróttin er røtt. Og ein kritikkur, sum farnu árini er komin til sjóndar, er, at ímeðan ítróttarfeløgini fyrr vóru karmur um hugna og samveru í frítíðini, eru tey nú ofta bert er eitt stað, har tey ungu fara til venjingar í ein tíma 2 ferðir um vikuna.

Tórshavn Boksing er eitt dømi um felag, sum ikki er í samsvari við hesa modernaðu fatanina av ítrótti, men har sosiala tilvitið er sjónligt. Felagið hevur frá byrjan lagt dent á at rúma breiddini – og nøkur ung eru virkin í felagnum, hóast tey ikki íðka ítrótt. Partur av konseptinum hjá Tórshavn Boksing, sum hevur íblástur úr boksiklubbum í Danmark sum Vollsmose, er júst at lofta teimum, sum møguliga eru í vandabólkum og at geva teimum eitt stað at vera og sosiala samveru.

Tórshavn Boksing hevur samstørv við millum onnur Bláa Kross, Barnabata, Margarinfabrikkina, Lopfjølina og barnaverndina. Mentorskipan er ein partur av arbeiðinum, og nógv verður gjørt fyri at vísa teimum ungu álit og geva teimum møguleika fyri at vísa, at tey duga at taka ábyrgd og eru at líta á. Boksing og aðrir kampítróttir tykjast rigga serliga væl til nógv av hesum ungu við t.d. ADHD, tí tær krevja stórt disciplin, miðvísa venjing, og eitt serligt tamarhald á kroppi og kenslum. Harafturat hava hesar greinar eina serliga javnvág av einstaklingaavriki og liðanda.

Ítróttarfeløgini í Føroyum eru til stórt gagn, og túsundatal av børnum, ungum og vaksnum hava fingið nógv gott í beinið og góðan felagsskap. Men arbeiðsbólkurin vísir á Tórshavn Boksing sum eitt gott dømi um, hvussu ítróttarfeløg og aðrir frítíðarfelagsskapir kunnu taka ábyrgd og vísa sosialt medvit.

Nakrar kommunur eru farnar at nýta frítíðarkort til børn og ung. Fleiri av pørtunum, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við, hava víst á, at frítíðarkortið gevur ein gyltan møguleika fyri at seta krøv til ítróttarfeløg og aðrar frítíðarfelagsskapir og harvið stýra menningini í feløgunum til t.d. at brúka størri orku at arbeiða við breiddini og teimum sárbæru.

## Onnur frítíðartilboð

Alt ov ofta verður í samfelagskjakinum sett líkatekn millum skipað frítíðarvirksemi og ítrótt. Men nógv ung trívast ikki í ítróttarfeløgum ella hava ikki áhuga í ítrótti. Eitt eyðkenni við flestu ítróttargreinum og ítróttarfelagsskapum er, at har er ein kappingartáttur, sum kann vera meiri ella minni týðandi ella sjónligur og ofta knýttur at likamligum avriki. Hetta er nakað, sum ikki øll ung

trívast við. Harumframt, sum fleiri hoyringarpartar hava nevnt, hendir ofta ein broyting í áhugamálum hjá teimum ungu í pubertetinum, og tá velja nógv ítróttin frá. Tí er stórur tørvur á øðrum sambondum og felagsskapum, har tey ungu kunnu vera partur og kenna seg væl.

Fyri at undirstrika, at frítíðarvirksemi ikki er = ítrótt, kann nevnast, at millum limirnar í Føroya Ungdómsráð teljast skótasambond, dramaverkstaðið, tónleikasamtøk, politisku ungdómsfeløgini, og onnur. Hesir felagsskapir hava ein týðandi leiklut at menna og styrkja okkara ungu, og t.d. hevur skótavirksemið í umleið 100 ár givið nógvum ungum góðan førning og samfelagssinni, ímeðan tónleikurin og sjónleikurin saman við myndlistini hava ment og hjálpt nógvum ungum, sum eru meiri kreativ av lyndi. Hóast nógv batnaðir farnu árini, so eru karmarnir kring nógv av hesum kreativa virkseminum tíverri ikki so góðir, tí slíkt virksemi ofta er treytað av hóskandi hølum og útgerð. Her kann nevnast, at tónleikaumhvørvið í Føroyum í nógv ár hevur roynt at vísa á, at ov fá hóskandi venjingarhøli eru kring landið.

Hugaítrótt sum Talv og Bridge hava havt nógvar íðkarar í Føroyum í áratíggju. Men farnu árini er áhugin fyri borðspølum eisini vaksin nógv. Í flestu førum snýr tað seg um ein bólk av vinfólkum, sum seta seg saman og spæla okkurt spæl sum ein part av sosialu samveruni, men eisini meiri tíðarkrevjandi spøl, sum krevja meiri innliving – lutaleikir (á enskum: Role-playing games).

Tað er vorið vanligt, at ungdómshús og barrir hava eitt úrval av borðspølum, sum gestir kunnu spæla, men nú eru eisini t.d. Facebook-bólkar og okkurt áhugafelag stovnað, so tað gerst lættari at finna fólk at spæla saman við og hugna sær. Áhugafelagið Tabletop Føroyar hevur farna árið skipað fyri regluligum tiltøkum í Tórshavn, og hevur fingið limaskap í FUR. Tað er sannlíkt, at onnur slík átøk og feløg fara at gerast vanligari kring landið.

Á hoyringarfundi varð nevnt, at onkrir fyrrverandi rúsmisnýtarar kundu hugsað sær at hitta fólk fyri at drekka ein kaffimun og spæla okkurt borðspæl, men at tað var trupult at finna fólk til hetta, tí flestu vinfólkini enn vóru í rúsumhvørvinum. Hetta sama hevur verið nevnt frá fólki við ymsum sosialum trupulleikum og diagnosum. Tí má tað sigast vera eitt frambrot, tá tað gerst lættari hjá hesum fólkum at fáa fleiri møguleikar fyri sosialari samveru og netverkan.

Almannaverkið er fyri kortum farið undir eina royndarverkætlan, nevnd Spælival, har borðspøl og lutaleikir verða brúktir fyri at menna sosialar førleikar og empati. Sum skilst, verða lutaleikir sum D&D eisini nýttir í autismuflokkunum á miðnámi fyri styrkja sosialar- og relatiónsførleikar.

Nógv ung brúka nógv av frítíðini at spæla telduspøl – ofta nevnt gaming. Spølini og samanspælið kann vera so ymiskt, men í nøkrum av spølunum er talan um lið av spælarum, sum kappast í t.d. skjótispølum ella DOTA. Talan kann tí vera um kappingarítrótt, nevnd e-sport, har felagsskapurin líkist tí, vit síggja í øðrum liðítrótti. Men hóast nøkur ikki sita í sama rúmi og kappast, kunnu tey hava eitt sunt og innihaldsríkt sosialt lív gjøgnum online-spøl, sum t.d. í MMORPG-spølum, har spælarar ofta eru partar av klanum ella alliansum, práta saman og hava felags tiltøk online. Tí ber til at siga, at hóast nøkur børn og ung eru nógv “einsamøll” heima, kunnu tey væl hava góðan og stuðlandi vinskap og sosial sambond fyri tað.

Átrúnaðarligu samkomurnar kring landið eru sera sjónligar og gera nógv sjálvboðið arbeiði, og ofta hevur barna- og ungdómsarbeiðið høga raðfesting. Í sunnudagsskúlum, ungdómsmøtum, bíbliutímum, hugnakvøldum (opið hús) og summarlegum hava nógv ung skapt vinarbond og havt góða og trygga sosiala samveru uttan rúsdrekka og rúsevni. Eisini hava nógvar samkomur tikið væl ímóti

ungum sum eldri, ið eru komin burturúr misnýtslu og øðrum trupulleikum, eins og tær hava havt ein týðandi leiklut í integratiónini av tilflytarum.

**Tilmæli 27**
**Stuðla og skapa umstøður fyri fjølbroytt frítíðarvirksemi**

- Endamálið við tilmælinum er, at børn og ung kunnu vera partur av sunnum og gevandi felagsskapi. Tí verður mælt til, at myndugleikar eftir førimuni stuðla frítíðarvirksemi kring landið við t.d. peningaligum stuðli til útgerð og starvsfólk og at veita høli til slíkt virksemi, t.d. skúlar. Dentur eigur at verða lagdur á fjølbroytni, at skapa tryggar karmar, og at fáa breiddina við.
- Mettur kostnaður: Ymiskt. Men í nógvum førum eiga kommunur tøk høli, sum t.d. skúlar, og helst ber til í einstøkum førum at gera avtalur við privat um samstarv um hølisnýtslu.
- Ábyrgdari: Serliga kommunurnar, men játtan er eisini í løgtingsfíggjarlógini til ítrótt og ymsar felagsskapir og frítíðarvirksemi.
- Tíðarætlan: Áhaldandi.

## App at finna frítíðarvirksemi og ymisk tilboð um hjálp

Vit vita, at sunnir felagsskapir og møguleikin fyri sosialari samveru hava sera stóran týdning fyri trivnað og sálarheilsu. Men nakrir hoyringarpartar hava víst á, at tað hjá nógvum kann vera torført at fáa í lag at luttaka í frítíðarvirksemi og enntá at finna útav, hvat slag av frítíðarvirksemi finst kring landið. Hetta kemst millum annað av, at nógv ikki er skrásett á netinum, og at tað sum er skrásett, er torført at finna, um ein ikki veit ítøkiliga, hvat leitað verður eftir. Í nógvum førum krevst, at tey ungu kenna tilboðið frammanundan.

Hetta er óheppið, tá ið vit hava við ung at gera, sum hava ymiskar avbjóðingar.

Fólkaheilsuráðið er, í samband við “ABC fyri sálarheilsu”, í ferð við at skráseta alt frítíðarvirksemi í Føroyum. Hetta verður gjørt í samstarv við ÍSF og Føroya Kommunufelag. Samstundis verður eisini hugt at sambandinum millum frítíðarvirksemi og almenna heilsu.

Fólkaheilsuráðið arbeiddi í 2017 við at menna eina app, har tað bar til at finna ymiskt frítíðarvirksemi og tekna seg til hetta – ítrótt, bindiklubbar, lesiringar o.s.fr – næstan sum ein dating-app.

Menningin av hesi app gjørdist tó ov kostnaðarmikil, og arbeiðið varð steðgað.

Arbeiðsbólkurin metir at ein tílík app ella heimasíða, kundi verið ein stór hjálp – serliga hjá teimum, sum smæðin ella ikki hava so lætt við at við at finna seg til rættis í sosialum felagsskapum. Arbeiðsbólkurin heldur eisini, at tað eigur at verða kannað, um ymisk tilboð um hjálp eisini áttu at verið tøk á appini. Dømi um slík tilboð eru hjálparlinjan hjá Barnabata, Sinnisbati, Megna Títt Lív, barna- og ungdómspsykiatriin og psykiatriska skaðastovan.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at Fólkaheilsuráðið fær fígging, so arbeiðast kann víðari við at menna eina tílíka app ella í hvussu er eini heimasíðu.

**Tilmæli 28**
**Menna app ella heimasíðu, sum ger tað lættari at finna frítíðarvirksemi og ymisk hjálpitilboð um landið**

- Endamálið við átakinum er, at gera tað lættari hjá ungum at vera finna sær okkurt áhugavert frítíðarvirksemi og at finna hóskandi tilboð um hjálp fyri á tann hátt at økja um trivnaðinum.
- Mettur kostnaður: Millum kr. 500.000 og 1 millión. Men um talan bert er um eina heimasíðu, kann hetta helst gerast bíligari. Ein partur av arbeiðinum fevnir um at samskifta við ymsar partar fyri at savna neyðugu vitanina og tilfarið, og hetta kann eitt starvsfólk hjá Fólkaheilsuráðnum ella ein uttanhýsis ráðgevi gera. Hin parturin av arbeiðinum er at menna heimasíðu ella app og skipa tilfarið. Hetta eigur helst at verða boðið út á keypsportalinum hjá Fíggjarmálaráðnum. Arbeiðsbólkurin væntar, at møguleiki er fyri at fáa fígging til hetta frá onkrum almannagagnligum grunni.
- Ábyrgdari: Fólkaheilsustýrið og HMR
- Tíðarætlan: Menningin av appini ella heimasíðuni fer í gongd í 2023.

## Ungdómshús og ungdómsklubbar – eitt týdningarmikið tilboð til ungdómin

Í Danmark hevur tað í meiri enn 50 ár verið vanligt við frítíðarklubbum og sokallaðum skúlafrítíðarskipanum, og hesin tørvur er vorðin meiri sjónligur í Føroyum farnu árini.

Mistrivnaðurin millum tey ungu gerst alsamt sjónligari. Hetta sæst m.a. í stóru kanningini hjá Fólkaheilsuráðnum “Hvussu hevur tú tað?” frá 2015. Hjá teimum ungu kann tað mangan vera trupult at tosa við foreldrini, sum eisini hava ringa tíð og eru undir stórum trýsti. Tað hevur altíð verið og er enn vanligt, at nógv ung fólk (serliga tannáringar) hava trupult við at tosa opið og erliga við foreldrini.

Hesar samfelagsligu avbjóðingar hava gjørt, at tað er vanligt í flestu kommunum at bjóða frítíðarskúlatilboð til 1. og 2. flokk, og nakrar kommunur hava eisini tilboð til 3. flokk og eldri flokkar. Hetta tilboð er ein góður møguleiki hjá børnunum at vera saman við vinum og floksfelagum eftir skúlatíð í tryggum rammum.

Fleiri hava á hoyringarfundum víst á, at ov fáar kommunur hava nakað munagott tilboð til børn í 3.-6. flokk. Hetta er ein sera viðbrekin aldur, og tað kann vera álvarsligt, um hesi børn missa sosialu samveruna og mennandi felagsskap við onnur. Um tey missa sosialu tilknýtini, kann tað vera ein stór avbjóðing at fáa tey innaftur í felagsskapin, tá tey gerast eldri, og vandin er, at vit longu í hesum aldri fáa børn, sum merkja einsemi og kenna seg uttanfyri – ein trupulleiki, sum lættliga kann gerast meiri álvarsligur, tá tey røkka tannáringaárunum. Tí mælir arbeiðsbólkurin til, at skipa frítíðartilboð-/frítíðarskúlar til børn og ung í øllum aldursbólkum.

Fleiri kommunur hava valt at skipa sokallaði ungdómshús ella ungdómsklubbar, sum vanliga eru fyri ung frá 7. flokki og eldri (vanliga til 18 ára aldur). Vit hava her ikki gjørt mun á hesum báðum hugtøkum og brúka tey hvørt um annað, hóast onkur munur kann vera millum hesi tilboð. Tiltøkini í hesum klubbum eru í flestu førum nøkur kvøld um vikuna. Roynt verður at skapa tryggar, rúsfríar

karmar fyri tey ungu, har tey kunnu hugna sær saman. Ungdómshúsini ella ungdómsklubbarnir eru skipaði soleiðis, at nøkur starvsfólk eru knýtt at tilboðunum, og tí hava tey ungu onkran at venda sær til við ymsum avbjóðingum ella taka eitt gott prát við ein vaksnan, sum ikki er foreldur ella sálarfrøðingur. Hesin møguleikin fyri opnum práti hevur á hoyringarfundunum verið nevndur sum ein av stóru styrkjunum við ungdómshúsunum.

Alt eftir, hvørji starvsfólk eru knýtt at ungdómshúsunum, hevur borið til at eggja teimum ungu til at royna seg við ymsum ítrivi, har t.d. nakrir ungdómsklubbar hava fostrað eina ørgrynnu av tónleikabólkum og listafólkum. Vert er at leggja dent á, at ungdómsklubbarnir eru eitt gott frístað hjá teimum, sum ikki hava áhuga í ítrótti.

Veitslumentanin í Føroyum er nógv broytt farnu áratíggjuni. Tað er ikki longur vanligt, at ung og vaksin í øllum aldri hittast í veitslum og dansi, so ungdómurin er ikki longur partur av veitslumentanini hjá teimum vaksnu. Tí hava tey ungu undir 18 í roynd og veru ongi tilboð, har tey kunnu fara út at hugna sær og dansa og lurta eftir tónleiki. Tí verða veitslurnar hjá teimum ungu ikki líka sjónligar, og fá vaksin hava møguleika at ansa eftir teimum ungu, tá tey byrja at drekka ella taka rúsevni. Ungdómsklubbarnir tykjast hava eina jaliga ávirkan á hesa mentan, og fostra ein sterkan felagsskap. Fleiri ung hava greitt arbeiðsbólkinum frá, at tey, sum vóru virkin í ungdómshúsunum høvdu minni sannlíkindi fyri at fáa rústrupulleikar – har serliga ungdómshúsið Staðið í Vestmanna fekk nógv rósandi orð.

Tá eitt ungdómshús ella ein ungdómsklubbi skal skipast og rekast, skulu starvsfólk til hesa uppgávu. Onkur ábyrgdarpersónur skal vera, og gott er, um starvsfólkahópurin eisini fevnir um onnur enn pedagogar, men fólk við ymiskum førleikum og dygdum, sum tey ungu kunnu hava sum fyrimyndir og hava álit á. Nógv av teimum, sum arbeiða við ungdómi mæla til, at starvsfólkini í ungdómsklubbum vera vald eftir førleikum og eginleikum heldur enn útbúgving. Og ein framúr íløga í førleikamenning fyri starvsfólkini er, um tey kunnu útbúgva seg í samrøðuteknikki. Undir hesum meira frælsu og óskipaðu umstøðunum hava hesi starvsfólk møguleika at síggja og rúma teimum ungu á ein hátt, sum t.d. skúlalærarar ofta ikki hava møguleika til, og sambondini, sum tey ungu hava við starvsfólkini, eru ofta sera týdningarmikil og mennandi.

Sum nú er, eru ungdómshúsini og ungdómsklubbarnir kommunal tilboð, og eingin greið samskipan er millum økini. Hóast ymiskt óformelt samskifti og samstarv er millum tey, so kundu leiðararnir fyri hesum tilboðum hugsað sær at havt eitt felags forum, har tey kundu samstarva tættari og kjakast um felags avbjóðingar og best practice.

Starvsfólkini í ungdómshúsunum kundu hugsað sær at onkur samskipandi eind ella ábyrgdarpersónur var t.d. í Uttanríkis- og mentamálaráðið, sum kundi savna og givið teimum íblástur og ráð, og í hesi skipan hevði so ein møguleiki verið fyri at boðið starvsfólkum at fáa supervisión, tí tey uppliva nógv, sum tey kunnu hava brúk fyri at viðgera ella fáa góð ráð um. Samskipandi eindin kundi eisini staðið fyri førleikamenningartilboðum o.t. til ungdómshúsini.

Nøkur av ungdómshúsunum hava greitt frá, at børn og ung hava tørv á at fáa betri kunning og upplæring um ymisk viðurskifti, sum eru viðkomandi fyri tey. Tey ungu eru í støðugari menning og broyting, og tí er tørvur á at leggja dent á lívsmeistran og at handfara ymsar avbjóðingar. Gott hevði tí verið, um ungdómshúsini kundu gagnnýtt tilboð og tilfar hjá SSP-samstarvinum og øðrum

viðkomandi pørtum, so sum Barnabata. Barnabati hevur eina mentorskipan, og mælt verður til, at gagnnýta hesa skipan og styrkja samstarvið um hana.

**Tilmæli 29**
**Økt játtan til ungdómshúsini**

- Endamálið við tilmælinum er, at ungdómshúsini kunnu hava longri opið og fáa fleiri starvsfólk
- Mettur kostnaður: Veldst um, hvussu kommunurnar raðfesta hetta, og hvussu umfatandi, tilboðini verða.
- Ábyrgdari: Kommunurnar.
- Tíðarætlan: 2023 og frameftir.

**Tilmæli 30**
**Víðka tilboðini um frítíðarskúlar, frítíðarklubbar og ungdómshús, so til ber at fevna um øll børn og ung í skúlaaldri**

- Endamálið við tilmælinum er at bjóða børnum eitt mennandi og sosialt frítíðartilboð í tryggum kørmum.
- Mettur kostnaður: Veldst um, hvussu kommunurnar raðfesta hetta, og hvussu umfatandi, tilboðini verða.
- Ábyrgdari: Kommunurnar.
- Tíðarætlan: 2023 og frameftir.

**Tilmæli 31**
**Kanna, um ein samskipandi eind kann verða skipað í UMMR til virksemið í ungdómshúsum og ungdómsklubbum**

- Endamálið við átakinum er at økja um dygdina á arbeiðinum í ungdómstilboðunum og røkka og hjálpa fleiri sárbærum ungum. Samskipandi eindin kann skapa eitt forum fyri starvsfólkunum í ungdómshúsum og -klubbum at savnast og geva hvørjum øðrum íblástur. Eisini kann eindin standa fyri førleikamenning, geva ráð og supervisón til starvsfólkini og skipa fyri starvsfólkaumbýti millum tilboðini. Mettur kostnaður: Umleið kr. 1.000.000 til m.a. starvsfólkakostnað, ráðgevarar, skeiðshald og ferðing.
- Ábyrgdari: Kommunufelagið saman við UMMR/Nám.
- Tíðarætlan: 2023.

**Tilmæli 32**
**Styrkja samstørv millum ungdómshús og aðrar partar – serliga SSP, Barnabata og Gigni**

- Endamálið við tilmælinum er at tryggja, at børn og ung fáa kunning, undirvísing og stuðul, sum hjálpa teimum at handfara broytingar og avbjóðingar í ungdómsárunum. Við mentor-skipanini ber betur til at tryggja, at tey mest viðbreknu ungu megna betur at stýra millum skerini og koma aftur á beint, um tey eru í truplum korum.
- Mettur kostnaður: Sjálvt átakið kostar einki. Men krevur helst eyka tilfeingi frá SSP, Barnabata og øðrum.
- Ábyrgdari: Kommunurnar.
- Tíðarætlan: 2023-24.

## Eftirskúlatilboð til ung við ADHD

ADHD-felagið og onnur hava á hoyringarfundum víst á, at persónar við ADHD ofta hava tað trupult, og ungdómstíðin kann vera serliga hørð. Tey ungu kenna seg ofta øðrvísi og hava lítið sjálvsvirði. Samstundis er hesin bólkur í øktum vanda fyri at fara at misnýta rúsevni, sum fleiri hoyringarpartar eisini hava gjørt vart við. Hetta er samstundis tað sama sum danska ADHD-felagið ger vart við.[29] Vandin økist, um unglingin ikki fær nøktandi hjálp og stuðul í mun til ADHD avbjóðingina.

Hjá nógvum við ADHD hevur skúlagongdin verið trupul og merkt av útskeldan og happing. Framhaldandi skúlagongd og útbúgving kunnu tí ofta vera ræettiliga avbjóðandi, tí stór krøv verða sett um sjálvbjargni, um at duga at leggja síni viðurskifti til rættis og um at hugsavna seg. Vandi er tí fyri, at hesi ungu koma at standa uttan fyri bæði í sosialum og fakligum felagsskapum.

Ung við ADHD hava tí tørv á stuðli og fyriskipan fyri at kunna taka eina útbúgving. Donsk tøl vísa, at ung við ADHD hava tað truplari enn onnur at gera seg lidnan við eina útbúgving. Ein avleiðing av hesum er, at vaksin við ADHD vanliga hava styttri útbúgvingar og lægri inntøku enn teirra javnaldrar.

Tørvur er á einum undirvísingartilboði við tryggum kørmum og einum greiðum bygnaði, har starvsfólkini hava vitan og førleikar til at arbeiða við næmingum, sum hava ADHD. Eitt tilboð, har møguligt er at arbeiða við motivatión og at geva teimum ungu amboð til at fáa ein betri og meira skipaðan gerandisdag. Eitt eftirskúlatilboð, ið er serliga rættað til ung við ADHD, hevði tí gjørt stóran mun.

Spurningurin er, um tað er rætt at gera eitt sjálvstøðugt eftirskúlatilboð til ung við ADHD, tá ið hugsað verður um, at tað føroyska samfelagið er so lítið. Heldur eigur eitt tílíkt tilboð at leggjast saman við einum verandi eftirskúlatilboði. Arbeiðsbólkurin hevur tosað við eftirskúlan á Tvøroyri, og leiðsla og stýrið taka undir við, at tað eigur at verða kannað, um ein tílíkur leistur ber til.

Hetta krevur tó, at nøktandi tilfeingi og orka verður játtað til tilboðið, og at starvsfólkini, sum skulu arbeiða við hesum næmingum, hava vitan og førleikar til at arbeiða við ungum, sum hava ADHD. Neyðugt er eisini, at eftirskúlin á Tvøroyri sleppur at halda fram at menna sín samleika, og at tilboðið til ung við ADHD verður eitt tilboð, sum kemur afturat verandi tilboði.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at eitt eftirskúlatilboð verður skipað á Tvøroyri til ungfólk, ið hava ADHD, og at skúlatilboðið í fyrstu syftu kann taka ímóti 8 næmingum. Neyðugt er, at tilboðið verður væl fyrireikað, og at nøktandi fígging verður fingin til vega, áðrenn tilboðið kann bjóðast út.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at tað verður møguligt at bjóða eitt 11. ár á eftirskúlanum, sum hesin málbólkur ofta hevur tørv á.

**Tilmæli 33**
**Eftirskúlatilboð til ungfólk við ADHD**

- Endamálið við átakinum er at skapa eitt tilboð, sum kann vera við til at geva ungum við ADHD amboð til fáa ein góðan gerandisdag og eggja og stuðla teimum til at fara undir víðari útbúgving.
- Mettur kostnaður: umleið kr. 1 millión.
- Ábyrgdari: UMMR.
- Tíðarætlan: Fyrireikingar byrja í 2022, og miðað verður eftir, at tilboðið skal verða klárt at seta í verk til skúlaárið 2024-25.

## Foreldraleiklutur og foreldrasamstarv

Hesin parturin snýr seg um foreldraleiklutin og ymisk evni, sum knýta seg at hesum lyklaførleika. Harumframt kemur arbeiðsbólkurin við nøkrum tilmælum hesum viðvíkjandi.

Fleiri hoyringarpartar hava á fundi tikið fram avbjóðingar við foreldraleiklutinum, arbeiðsbólkurin hevur hoyrt um avbjóðingar og trupulleikar úr nógvum ymiskum sjónarhornum.

Yvirskipað ber til at siga, at foreldraleikluturin er nógv broyttur seinastu 50 árini, samstundis sum familjulívið, arbeiðslívið og frítíðarlívið er vorðið meira torgreitt og samansett. Samfelagsligu normarnir broytast støðugt, nýggjar avbjóðingar stinga seg upp, og krøvini til børn og vaksin eru stór og vaksa. Tí kann í nógvum førum vera torført hjá familjunum at vita, hvussu tey skulu handfara tær avbjóðingar, sum børn og foreldur uppliva, og nær neyðugt er at leita sær hjálp.

Umstøðurnar eru samstundis sera ymiskar frá familju til familju, og tí er ongin einføld loysn.

Høvuðsábyrgdin fyri uppaling og umsorgan liggur hjá foreldrunum, men samstundis hava vit øll sum samfelag eina ábyrgd fyri børnunum og teimum ungu í hesum landi.

Eitt afturvendandi evni á hoyringarfundum var samstarvið við foreldur – serliga í sambandi við skúla, dagstovn og frítíðarítriv. Fleiri ferðir er nevnt, at tað er neyðugt, at foreldrini stuðla upp um arbeiðið,

sum verður gjørt í skúla og dagstovn og at tá ið trupulleikar íkoma, mugu foreldrini vera við, um nakað munagott skal gerast.

Trivnaðurin hjá næmingunum hongur tó í stóran mun eisini saman við mentan, siðvenju, virðum og viðtøkum hjá hvørjum einstøkum skúla eins og sambandið millum lærarar og hvønn einstakan næming og foreldur teirra[30]. Roland og Galloway (2002) vísa á, at eitt rættiliga sterkt samband er ímillum, hvussu lærararnir leiða flokkin, sosiala bygnaðin í flokkinum og happing[31]. Foreldrini hava samábyrgd fyri, hvussu teirra børn eru í skúlanum, og eiga at takast við í arbeiðinum fyri at fremja trivnað og felagsskap millum børnini.

Bæði fólkaskúlalógin[32] og dagstovnalógini[33] hava ásetingar um, at uppgávurnar skulu gerast í samstarv við foreldrini.

Tað er tó skúlin, sum er tann serkøni parturin, sum má taka leiðsluna og bjóða foreldrunum inn í felagsskapin um grundleggjandi virði og ætlanir á trivnaðarøkinum[34]. Líknandi støða er á dagstovnaøkinum.

Á hoyringarfundum eru nevnd dømi um, at skúlar hava tikið foreldrini við í arbeiðið við avbjóðingum við t.d. rúsevnum og trivnaði – við góðum úrslitum.

Um skúlarnir, frítíðarskúlar, ítróttarfeløg og onnur megna at skapa eitt umhvørvi, har foreldrini eiga ein leiklut, og álit og virðing er millum partarnar, verður ein gróðrarbotnur fyri trivnaði lagdur, og umstøðurnar fyri at arbeiða við sosialum- og menningarspurningum gerast munandi betri.

Í tilmæli 8 mælir arbeiðsbólkurin til, at regluligar trivnaðarkanningar verða gjørdar í skúla og dagstovnum, og í tilmæli 9 verður mælt til, at skeið verða fyriskipað fyri lærarum og námsfrøðingum um at varnast og fyribyrgja happing. Í tilmæli 11, verður mælt til at víðka Tiltøk í Tøkum Tíma til at fevna um alt landið, og í tilmæli 12 verður mælt til, at fakfólk fáa undirvísing í hóskandi samrøðu- og samskiftisamboðum. Arbeiðsbólkurin metir, at øll hesi tilmæli kunnu vera gagnlig fyri samstarvið millum lærarar/námsfrøðingar og foreldur.

Eitt annað evni sum hevur fylt nógv á hoyringarfundunum er, tá ið familjur hava avbjóðingar, antin við mistrivnaði ella menning barnsins, ella tí foreldrini sjálvi hava avbjóðingar ella vanta neyðugar førleikar. Flestu foreldur vísa umsorgan og duga og megna sín foreldraleiklut, men tað vísir seg, at nøkur foreldur hava tørv á hjálp og stuðli, um tey skulu vera røttu fyrimyndirnar fyri síni børn.

Í hesum førum hava hoyringarpartar víst á, at hóast vit hava sera nógvar ymiskar skipanir og tilboð, so kann tað vera trupult at skilja ímillum hesi og fáa røttu hjálpina, umframt at nógv orka fer til samskiftið við og millum skipanir. Samstundis arbeiða skipanirnar ofta ikki saman ella vita ikki av hvørjari aðrari, og hetta kann hava við sær, at tað tekur langa tíð at fáa hjálp. Og trupulleikarnir kunnu lættliga gerast størri og álvarsligari í hesi bíðitíð.

Stóra talið av skipanum, tænastum og tilboðum er ein avbjóðing fyri bæði myndugleikar og borgarar. Yvirhøvur kann nøgdin av skipanum og tilboðum vera ein forðing fyri holistiskari málsviðgerð

[30] Nina Hein – Forældreansvar og forældreinddragelse i folkeskolen (eXbus – exploring bullying in Schools)
[31] "Ibid"
[32] § 2 í løgtingslóg um fólkaskúlan
[33] § 2 í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt
[34] "Ibid"

(heildarviðgerð) og økja um vandan fyri, at fólk detta ímillum skipanir og ikki fáa ta hjálp, teimum tørvar. Tíverri er støðan eisini tann, at einstaklingurin/foreldrið verður noyddur til sjálvur at halda skil á nógvum viðurskiftum – t.d. at kanna, hvørji rættindi, tey hava, at halda skil á avtalum og skjølum og senda inn røttu skjøl til avrokningar, um tey skulu hava endurgjald. Hetta kann vera trupult og tyngjandi, um orkan ella førleikin ikki er til tað.




*Tilboð og myndugleikar at halda skil á, tá tørvur er á hjálp. Myndin er ætlað at lýsa, hvussu trupult tað er at halda skil á og finna røttu skipanina. Myndin er ikki heilt rætt, tí nakrar tilvísingar eru ikki rættar, og myndin vísir ikki øll tilboðini og skipanirnar, vit hava í Føroyum.*

## Familjuhús

Á hoyringarfundunum hava ymiskir partar skotið upp, at eitt slag av "familjuhúsi" varð skipað, har fleiri myndugleikar, skipanir og tilboð vóru umboðað. Hildið verður, at "Tann góða tilgongdin" kundi verið nýtt sum íblástur. Somuleiðis er "Nordic 0-24" -verkætlanin[35] nevnd, har dentur verður lagdur á eina holistiska tilgongd og samstarv tvørtur um geirar, og har fokus verður flutt frá myndugleikum og ábyrgdarviðurskiftum og til tað, sum tað snýr seg um – nevniliga familjuna og barnið. Nógvir fakmyndugleikar og skipanir hava eisini nevnt, at tað hevði verið gott, um borgarin í einum tílíkum familjuhúsi einans hevði samband við ein málsviðgera, sum hevði neyðugu vitanina og sum kannaði, hvørji tilboð vóru best egnaði til hvør einstakt barn ella familju.

[35] Samstarvsverkætlan hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum um útsett børn og ung, har Noreg, Svøríki, Danmark, Finland, Ísland, Føroyar, Grønland og Áland luttóku, og sum endaði í mars 2021

Sum skilst, hava nógvir ymiskir partar í samfelagnum havt ynski um eitt slíkt familjuhús í nógv ár, og ymiskar granskingarverkætlanir hava mælt til hetta, men arbeiðsbólkurin dugir ikki at síggja nakra ábending um, at nakað fyrireikingar- ella kanningararbeiði er framt í fyrisitingini hesum viðvíkjandi. Slíkar skipanir eru í nøkrum av okkara grannalondum, har serliga Skotska skipanin (Getting it right for every child) fær góð skoðsmál.

Arbeiðsbólkurin metir, at ein slík skipan hevði verið ein góð hjálp hjá familjum, sum hava ymiskar og samansettar avbjóðingar. Skipanin kann viðvirka til, at hjálpin gerst meira málrættað til tann einstaka, at bíðitíðin gerst styttri, og at familjan/barnið kann koma í rætta fokus. Arbeiðsbólkurin metir at myndugleikar, skipanir og tilboð sum, Gigni, Sernám, barnapsykiatriin, Psykiatriski depilin, Almannaverkið, Dugni, barnaverndin, Lopfjølin, Barnabati, Títt Rúm og onnur týðandi tilboð kundu so ella so vera knýtt at hesum "familjuhúsi".

Vit eiga at kanna, um skipanin kundi verið gjørd á slíkan hátt, at málsviðgerðar við ymiskum fakførleikum vórðu knýttir at familjuhúsinum, og at *ein* teirra so fær høvuðsábyrgd í málunum og samskiftinum hjá hvørjum viðskiftafólki.

**Tilmæli 34**
**Seta ein arbeiðsbólk at kanna, um tað ber til at skipa eitt "familjuhús" sum virkar tvørtur um geirar**

- Endamálið við átakinum er at gera skipanirnar einfaldari og betur atkomuligar fyri barnafamiljur, sum hava ymiskar avbjóðingar.
- Mettur kostnaður: Sjálvt kanningararbeiði kostar einki uttan ta arbeiðsorku, sum krevst til ein arbeiðsbólk. Eitt familjuhús fer tó at hava kostnað við sær, men ikki nógv í starvsfólkakostnaði, tí talan er um eina flyting og umraðfesting av starvsfólkum. Vinningurin við samstarvi tvørtur um geirar og fakmørk, og at borgarin fær skjótari og betri hjálp, verður væntandi so góður, at talan verður um eina langtíðarsparing fyri samfelagið (m.a. lægri langtíðarkostnaður til sjúkrameldingar, uppihaldspengar og serskipanir).
- Ábyrgdari: AMR saman við HMR, UMMR og Kommunufelagnum.
- Tíðarætlan: Seta ein arbeiðsbólk í januar 2023, sum skal verða liðugur við arbeiðið í september 2025.

## Familjudepilin

Familjudepilin veitir dag- og samdøgursviðgerð til familjur, sum eru í einari støðu, ið krevur serligan stuðul. Depilin er partur av Almannaverkinum og húsast í bygninginum hjá Føroya Barnaheimi í Tórshavn.

Familjudepilin hevur pláss fyri 2 familjum. Tað eru barnaverndartænasturnar kring landið, sum ávísa familjur til depilin og Høvuðsbarnaverndarnevndin sum tekur endaliga avgerð.

Familjurnar hava hvør sína íbúð. Atgongd er til felags køk, stovu, samtalurúm og spælirúm, sum verða brúkt til viðgerð og til hugna.

Arbeiðið í deplinum leggur dent á eygleiðing av familjunum. Harafturat eru samtalur, samspælsvenjingar, refleksión o.a. Foreldrini eru antin til arbeiðis sum vanligt ella hava frí, meðan uppihaldið er, og hava sjálvi ábyrgd av húsligum arbeiði og sínum fíggjarligu viðurskiftum.

Familjudepilin er eitt amboð hjá barnaverndunum, sum verður nýtt til at hjálpa familjum til m.a. at styrkja og menna foreldraførleikan.

Nakrir hoyringarpartar við innliti í skipanina halda, at tað hevði verið betri um Familjudepilin ikki húsaðist á Barnaheiminum, men heldur lá fyri seg sjálvan.

Tær tænasturnar, sum familjudepilin veitir, kundu møguliga verið víðkaðar. Um kannað varð, hvussu familjudepilin virkar, og um tilboðið hjá Familjudeplinum kundi víðkast, so kundi tilboðið fevnt um aðrar familjur enn tær, sum longu eru partur av barnaverndarøkinum.

Familjudepilin kundi í so máta eisini virkað sum ein mentorskipan til foreldur, sum verða mett at hava ein tørv, sum ein skipan við mentorum kundi bøtt um, t.d. hjálp, stuðul og upplæring í heiminum.

Sum dømi kann nevnast, at Blái Krossur í Noregi hevur eitt, sum tey kalla "Barnas Stasjon", har møguleiki er hjá børnum og foreldrum at koma til samrøður og vegleiðing hjá serkønum starvsfólki. Tey bjóða ymisk bólkatilboð til børn og foreldur alt árið, har arbeitt verður við at styrkja foreldraførleikarnar, og skipað verður fyri fjølbroyttum frítíðarvirksemi sum túrum, har familjurnar fáa ymiskar upplivingar. Hugsað verður, at ein føroyskur familjudepil eisini kundi skipað fyri ymiskum skeiðum um foreldraleiklutin.

Fleiri serkønir hoyringarpartar hava greitt frá, at nógv av teimum, sum ikki hava nøktandi foreldraførleika, sjálvi koma úr familjum við avbjóðingum og tí ikki hava havt góðar fyrimyndir fyri, hvussu tað er at vera foreldur. Tey hava tí brúk fyri at læra, hvussu tey eru góð foreldur. Nærri er greitt frá hesum á síðu 70-71.

Viðhvørt kunnu smærri átøk, sum hjálp í heiminum og mentorskipan vera rætta hjálpin og nóg mikið. Onkrar kommunur kunnu við hvørt veita praktiska hjálp, har onkur kemur inn í heimið at taka sær av ymsum praktiskum fyri m.a. at stuðla familjuni, so at meira orka er til børnini og dagliga virksemið. Onkur hoyringarpartur hevur nevnt hetta "mammuhjálp". Arbeiðsbólkurin mælir til, at kannað verður, um hetta kann tryggjast sum eitt tilboð í øllum landinum, og um hetta kann skipast soleiðis, at praktiska hjálpin kann samantvinnast við upplæring og ráðgeving (mentoring). Hvørt kommunurnar hvør sær skulu standa fyri einum tílíkum tilboði, ella um hetta eigur at vera eitt tilboð, sum landið bjóðar, hevur arbeiðsbólkurin onga støðu til.

Mælt verður til at kanna, hvussu Familjudepilin virkar, og um virksemið og tilboðið kann víðkast við íblástri úr eitt nú "Barnas Stasjon" og Títt Rúm umframt at hava eitt skipað tilboð um mentorskipan og praktiska hjálp og ráðgeving í heiminum.

**Tilmæli 35**
**Kanna, hvussu familjudepilin virkar, og um virksemið kann víðkast**

- Endamálið við átakinum er at kanna, um tilboðini til familjur sum hava avbjóðingar við foreldraførleikanum kunnu víðkast og betrast.
- Mettur kostnaður:
- Ábyrgdari: AMR og Kommunufelagið (barnaverndartænasturnar).
- Tíðarætlan: 2025.

**Tilmæli 36**
**Kanna, hvussu praktisk hjálp í heiminum (onkuntíð nevnt mammuhjálp) kann verða eitt tilboð um alt landið**

- Endamálið við átakinum er, at avlasting við hjálp í heiminum, sum t.d. við húsligum arbeiði og matgerð, kann verða eitt tilboð allastaðni í landinum.
- Mettur kostnaður:
- Ábyrgdari: Kommunufelagið.
- Tíðarætlan: 2023/24.

## Tvørgeiraligt samstarv

Tá ið samfelagið í størri og størri mun verður býtt sundur í serøki, og kravið um serkunnleika veksur, gerst torførari at viðgera samansettar og torgreiddar trupulleikar og at síggja menniskjað sum eina heild og ikki einans sum fráskildar trupulleikar ella diagnosur.

Tað var tí ikki óvæntað, at sera nógvir av hoyringarpørtunum bóru fram ynski um meiri og betri samstarv tvørtur um geirar og fakøki – og eina meira holistiska tilgongd (heildartilgongd).

Hetta er serliga galdandi í sambandi við ymiskar diagnosir, mistrivnað, sálarligar avbjóðingar og rúsevnismisnýtslu.

“Tann Góða Tilgongdin” varð nevnd sum eitt gott dømi um samstarv tvørtur um geirar.

Men ferð eftir ferð hevur arbeiðsbólkurin eisini fingið at vita á hoyringarfundum, hvussu trupult tað er at finna runt í ymsum skipanum og tilboðum. Vit hava nógvar hjálparskipanir og tilboð av ymsum slagi og hetta er ein serliga stórur trupulleiki hjá fólkum, sum eru illa fyri av ymsum orsøkum, tí tað er møtumikið og torskilt og kann tí verða ein forðing fyri, at tey fáa ta hjálp, sum tey hava tørv á.

Í Føroyum eru nógvar skipanir og stovnar, sum eftir førimuni gera sítt til at hjálpa teimum, sum hava avbjóðingar. Men sum ein hoyringarpartur greiddi frá, so er hetta ikki altíð nóg mikið:

*“Talan er um gott og týdningarmikið arbeiði. Øll gera sítt besta, øll ynskja at hjálpa. Men tað er so fragmenterað tað heila. Tað er ov nógv tilboð, ið eru ov smá. Skil meg rætt; tey eru øll góð. Hinvegin hevði kanska verið gott, um tey partvís løgdu meir saman.*

Hugsaða dømið, sum greitt varð frá, var hetta: Ein ungur persónur er uppvaksin saman við mammu við rústrupulleikum, og harðligi pápin er deyður. Hann hevur ikki megnað at fáa fólkaskúlaprógv og roykir nógv hash. Nógv vilja fegin hjálpa: Psykiatriski depilin, DAT-ung, Títt rúm, KRIS, Barnabati, Frælsi, Sernám, Fountainhúsið, Dugni, Almannaverkið, Megna Títt Lív, Berin og onnur – og tey fáa øll hjálpt. Men samstarvið teirra millum (og hvør ger hvat og nær) er slettis ikki nóg gott.

Fleiri hava víst á, at nógv detta millum skipanir, meðan trupulleikarnir gerast størri og meiri álvarsligir. Tí metir arbeiðsbólkurin, at samstarv tvørtur um geirar og fakmørk er alneyðugt.

Frágreiðingin "Når noen må ta regien" stuðlar undir hesa fatan.

**Tilmæli 37**
**Gera yvirlit yvir almennum og alment fíggjaðum/stuðlaðum tænastum og tilboðum, sum eru á ymsu økjunum. Saman við avvarðandi pørtunum og áhugabólkum /-felagsskapum tryggja, at hesi yvirlit eru røtt og tøk hjá pørtunum**

- Endamálið við átakinum er at hjálpa myndugleikum, læknum, borgarum, áhugapørtum (t.d. MEGD, Sinnisbati, Barnabati), borgarum og øðrum at kunna skilja og ráðgeva um, hvørji tilboð og hvørjar tænastur eru til taks á t.d. heilsu-, almanna og mentanarøkinum.
- Mettur kostnaður: Arbeiðið fevnir um at kanna og lýsa økini, og framleiða listar og frágreiðingar. Talan verður helst um fitt av hoyringum og samskifti fyri at lýsa økini. Kostnaðurin verður arbeiðsorkan at gera hetta arbeiðið.
- Ábyrgdari: Fólkaheilsustýrið saman við HMR, AMR og UMMR.
- Tíðarætlan: 2025.




## Psykiatriskar diagnosur, útgreining, viðgerð og bíðirøðir

Nógvir hoyringarpartar hava víst á, at bíðitíðin at verða útgreinaður fyri eitt nú ADHD, autismu og onnur menningarórógv framvegis er alt ov long. Samstundis kann ganga long tíð, upp í fleiri ár, frá tí at varhugi er um, at okkurt er galið, til persónurin verður sendur víðari til útgreinan.

Hetta er ein stórur trupulleiki uppá nógvar mátar, tí tað kann vera trupult at fáa neyðugu hjálpina við innlæring, lívsmeistran ella at sissa ymiskt órógv – og tað økir um mistrivnaðin, samstundis sum vandin fyri rúsevnismisnýtslu økist. Hettar er serliga viðkomandi, tá ið talan er um ADHD.

Ein uppaftur størri trupulleiki, sum fleiri hoyringarpartar vísa á, er, at tá ið fólk fáa eina diagnosu ella fáa staðfest ein tørv, so finst ofta einki tilboð um viðgerð ella sernámsfrøðiliga hjálp.

Hetta kann kennast sum eitt svik og kann hava stórar avleiðingar við sær, tí trupulleikarnir sleppa at vaksa seg uppaftur størri, meðan lívsumstøðurnar gerast verri. Vandi er tá fyri, at rúsevni vera nýtt til sjálvmedisinering, m.a. tí rúsevnini kunnu geva ein ávísan frið.

Sissandi virknaðurin heldur tó ikki fram, og skaðiligu árinini kunnu gerast stór og álvarslig.

Onkur hoyringarpartur hevur víst á, at Psykiatriski depilin nýtir nógva orku uppá at útgreina, og tá er kanska ikki so nógv tíð til at veita viðgerð. Tí hava tey skotið upp, at Sernám, Gigni og rúsviðgerðarstovnar kundu verið ment til at at gera útgreiningar av t.d. ADHD, autismu og menningarórógvi.

Hetta er eisini í tráð við, at Barnapsykiatriin og Psykiatriski depilin hava víst á, at vit eiga at konsentrera fakligheitina.

Um útgreiningin var løgd til aðrar stovnar, samstundis sum hesir vórðu uppstigaðir, so kundu Psykiatriski depilin og Barnapsykiatriin í størri mun brúkt avmarkaðu orkuna til viðgerð.

Arbeiðsbólkurin mælir til at ein arbeiðsbólkur verður settur við umboðum fyri Heilsumálaráðið, Almannamálaráðið og Mentamálaráðið, sum kann kanna ábyrgdarbýtið millum nevndu stovnar. Eisini kann arbeiðsbólkurin kanna, um útgreinan kann skipast øðrvísi, og hvussu tilboðið um viðgerð og sernámsfrøðiliga hjálp kann økjast. Umboð fyri Psykiatriska Depilin, Sernám, Gigni, Barnavernd og rúsviðgerðarstovnar, brúkarar eiga at luttaka í hesum arbeiði..

**Tilmæli 38**
**Kanna, hvussu bíðitíðin til útgreinan, viðgerð og sernámsfrøðiliga hjálp kann styttast**

- Endamálið við átakinum er at finna loysnir fyri, hvussu útgreining og viðgerð kann skipast og veitast.
- Mettur kostnaður: Sjálvt endurskoðanararbeiðið kostar í sjálvum sær einki, men starvsfólkaorka má setast av til slíka endurskoðan. Møguligar loysnir og tillagingar kunnu hava kostnað við sær.
- Ábyrgdari: HMR saman við viðkomandi pørtum.
- Tíðarætlan: 2023.

## Bráðfeingis sálarfrøðilig móttøka

Á hoyringarfundum hoyrdi arbeiðsbólkurin søgur og hjartasuff um ung fólk, sum høvdu verið illa fyri sálarliga, og vóru í kreppustøðu. Men fyri nógv av hesum, var eingin skjót hjálp – um talan ikki var um fólk, sum vóru í sjálvmorðsvanda. Tá var byrðan ofta stór hjá avvarðandi ella vinfólkum, sum ikki høvdu førleika, amboð ella heilivág at hjálpa.

Á fíggjarlógini fyri 2022 eru settar 2 milliónir krónur av til psykiatriska økið í fíggjarlógini fyri 2022. Ætlanin er at seta eina skipan í gongd við bráðfeingis sálarfrøðiligari móttøku, soleiðis at persónar ið hava ein bráðfeingis tørv á sálarfrøðiligari viðgerð, kunnu sleppa skjótt framat.

## Samskipan og samstarv um diagnosur og viðgerð

Arbeiðsbólkurin hevur á fleiri fundum fingið at vita, at myndugleikar, stovnar, skúlar, viðgerðartilboð og onnur ikki altíð fáa neyðugu kunningina, tá eitthvørt er áfatt. Serliga ørkymlandi er at hoyra, at

nøkur børn og ung fáa diagnosur sum t.d. eina sálarsjúku, autismu ella ADHD, men foreldrini kenna seg slept upp á fjall, tí tey ikki vita, hvørja hjálp tey kunnu fáa, og hvørji tilboð eru.

Arbeiðsbólkurin hevur aðrastaðni í hesi heildarætlan greitt frá, at ein vegleiðing eigur at verða skrivað, soleiðis at tað kann vera greiðari, nær og undir hvørjum umstøðum, tað er loyvt at lata víðari upplýsingar til aðrar myndugleikar og stovnar.

Fyri at foreldur/avvarðandi, børn, ung og borgarar sum heild kunnu fáa røttu vegleiðingina og hjálpina krevst, at stovnar, myndugleikar og onnur vita, hvørjir møguleikar eru. Tí eigur at verða skipað soleiðis fyri, at slíkir upplýsingar eru tøkir og lættir at finna. Hugsast kann, at fakfólk fáa kunning og frálæru í, hvussu tey kunnu kunna rætt um møguleikarnar, m.a. eisini, at fáa til vega neyðugu vitanina og eru greið um, hvørjir upplýsingar eru viðkomandi fyri tann einstaka brúkaran. Her verður serliga hugsað um, at vitanarbýtið millum t.d. Psykiatriska depilin, Sernám, skúla og foreldur/avvarðandi eigur at verða styrkt.

Á fundum við hoyringarpartar varð nevnt, at eitt gott stig hevði verið, um eitt samstarv varð skipað millum Sernám, Psykiatriska depilin og Almannaverkið, Gigni og skúlamyndugleikar. Hetta samstarvið kundi so tikið støði í einstaka borgaranum/brúkaranum og so mett um, hvørji tilboð vórðu mest viðkomandi fyri hann, og hvussu hesi skulu samskipast.

**Tilmæli 39**
**At styrkja vitanarstøðið og kunningina frá myndugleikum um møguliga hjálp og vegleiðing í.s.v. diagnosur**

- Endamálið við átakinum er at forða fyri, at fólk (serliga foreldur og avvarðandi) kenna seg slept upp á fjall og ikki vita, hvar tey skulu venda sær at fáa neyðugan stuðul og hjálp. Ein arbeiðsbólkur eigur at verða settur við umboðum úr UMMR, HMR og AMR, møguliga saman við avvarðandi stovnum (Sernám, Almannaverkið, Gigni, Psykiatriski depilin) at gera listar við og vegleiðingar um tey ymisku tilboðini, sum kunnu vera viðkomandi, og gera metingar og vegleiðingar um, nær hóskandi er at kunna um hesi.
- Mettur kostnaður: Hetta eigur at kunna tryggjast við einfaldari og bíligari førleikamenning og kunning til starvsfólkini.
- Ábyrgdari: UMMR í samstarvi við HMR og AMR og stovnar, sum luttaka í Tí góðu tilgongdini..
- Tíðarætlan: Seta arbeiðsbólk sum skjótast. Undirvísingar- og kunningartilfar liðugt seint í 2022, so starvsfólk kunnu fáa hóskandi kunning og upplæring í 2023.

**Tilmæli 40**
**At skipa eitt tvørfakligt og tvørgeiraligt samstarv, fyri at styrkja samstarvið og samskipanina av tilboðum til fólk við diagnosum og avvarðandi teirra**

- Endamálið við átakinum er finna best møguligu loysn og tilboð til hvønn einstaka persón, sum fær eina diagnosu, og at samskipa ábyrgdina millum myndugleikarnar. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at fólk ikki detta ímillum skipanir ella ikki vita, hvørja hjálp, tey hava tørv á og rætt til. Serligt fokus eigur at vera á at tryggja, at ung fólk, sum hava t.d. menningarórógv, fáa neyðugu vegleiðingina og hjálpina at megna dagligdagin og fáa eitt virkið lív sum vaksin.
- Mettur kostnaður: Krevur, at viðkomandi starvsfólk seta neyðugu tíðina av til fundir/samskifti um brúkararnar. Hetta kann tí hava ávísa ávirkan á arbeiðsorkuna. Men samstundis kann eisini roknast við, at greið samskipan um tilboðini hevur við sær sparda arbeiðsorku aðrastaðni.
- Ábyrgdari: Samstarv millum AMR, HMR, UMMR og stovnar undir hesum ráðum. AMR kundi havt leiðsluna, serliga um vit ímynda okkum, at sosialráðgevar hjá AV verða toghaldarar. Alternativt kundi UMMR skipað arbeiðið, um toghaldarar verða á Sernámi.
- Tíðarætlan: Seta arbeiðsbólk sum skjótast. Kunnu gera pilotroyndir nærum beinanvegin fyri at kanna, hvussu hetta riggar.

## Dupultdiagnosur og rúsevnisviðgerð

Fleiri hoyringarpartar hava víst á, at persónar, sum hava sálarligar trupulleikar og misnýta rúsevni, detta í millum skipanir. Psykiatriski depilin sigur, at tað ikki ber til at útgreina fólk, sum eru rúsaði, tí tað er trupult at skilja ímillum og meta um sálarligu trupulleikarnar og ávirkanina av rúsevnunum. Samstundis kunnu ella vilja rúsviðgerðarstovnarnir ikki seta tey í viðgerð, tí tey eru ov illa fyri sálarliga.

Hetta er ein stórur trupulleiki, sum ikki gerst minni av, at sálarligir trupulleikar ofta hanga saman við rúsmisnýtslu – antin sum ein avleiðing av misnýtsluni ella sum verandi trupulleikar, sum verða sjálvmedisineraðir.

Bæði Psykiatriski depilin, viðgerðarstovnarnir og aðrir lyklapartar vísa stóran vilja at finna eina loysn uppá hendan trupulleikan.

Arbeiðsbólkurin mælir tí til, at ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Heilsumálaráðnum, Psykiatriska deplinum og umboð fyri viðgerðarstovnarnar verður settur, at kanna, hvussu vit kunnu skipa hóskandi viðgerðartilboð til hesar persónar í Føroyum. Aðrir partar eiga at verða knýttir at arbeiðinum eftir tørvi.

**Tilmæli 41**
**At finna ein leist, so eitt viðgerðartilboð kann skipast til persónar við dupultdiagnosum**

- Endamálið við átakinum er at veita persónum við dupultdiagnosum viðgerð og forða fyri, at teir detta ímillum skipanir. Tí eigur ein arbeiðsbólkur at verða settur, sum kann eyðmerkja trupulleikarnar og finna loysnir fyri at betra um samstarv og samskifti – og møguliga skipa nýtt tilboð.
- Mettur kostnaður: Sjálvt kanningararbeiðið kostar í sjálvum sær einki, men møguligar loysnir fara at hava kostnað við sær. Ítøkiligi kostnaðurin veldst um leistin, sum verður valdur, og hvussu tilboðini verða skipaði.
- Ábyrgdari: HMR.
- Tíðarætlan: Arbeiðsbólkur verður settur í 2023.

## Skipa eitt PSP-samstarv

PSP stendur fyri Politi, Sosialir myndugleikar og Psykiatri.[36] Nógv, sum misnýta rúsevni, hava samstundis sálarligar og sosialar avbjóðingar. Hesir borgarar eru í vanda fyri at detta ímillum skipanir og tí ikki fáa ta hjálp, sum tey hava fyri neyðini.

Ætlanin við hesum samstarvi er at samskipa tað fyribyrgjandi arbeiðið betur millum politi, sosialar myndugleikar og psykiatri fyri betur at lofta og hjálpa hesum bólki. Tá tosað verður um fyribyrging í PSP-høpi, verður serliga hugsað um arbeiðið við útsettum og viðbreknum borgarum, t.v.s. fólk við sálarligum og sosialum trupulleikum. Fyribyrgingin snýr seg her m.a. um at forða fyri, at borgarar detta ímillum skipanir, at avmarka trupulleikar og forða fyri, at støðan versnar.

Ein týdningarmikil táttur í hesum samstarvi er samskipan av ætlanum í ítøkiligum málum, har myndugleikarnir avtala, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av at seta ymisku partarnar av ætlanini í verk, og hvussu málini skulu fylgjast upp.

Eitt PSP-samstarv kann samstundis fremja vitanarbýti og varpa ljós á aðrar samstarvsmøguleikar millum hesar myndugleikar.

Tey mál, sum kunnu ætlast at vera tikin upp í PSP-samstarvinum, eru mál, har myndugleikin ikki metir seg kunna loysa uppgávuna einsamallur, og har tað er neyðugt, at borgarin fær hjálp. Í hesum førum er ofta talan um borgarar, sum hava fjøltáttaðar trupulleikar og ikki sjálvir megna at at søkja sær hjálp fyri at betra um støðuna.

Heimild er í § 148 í rættargangslógini fyri, at politiið kann lata upplýsingar til aðrar myndugleikar í sambandi við eitt PSP-samstarv.

Mælt verður til at avtala, um samstarv verður gjørd millum Almannaverkið, Psykiatriska depilin og politiið. Tað eigur at umhugsast, hvørt Kriminalforsorgin og Megna Títt Lív eisini eiga at vera partar

[36] PSP: Et tværsektorielt samarbejde mellem politi, sociale myndigheder og psykiatri – inspiration til organiseringen https://dkr.dk/media/7060/psp_pjece.pdf

av samstarvinum – har Megna Títt Lív verður fastur partur av samstarvinum, og Kriminalforsorgin verður tikin við, tá tørvur er á tí.

Í Danmark hava tey umframt PSP-samstarv eisini eitt KSP-samstarv, sum er eitt samstarv millum Kriminalforsorg, Sosialar myndugleikar og Politi. Í Føroyum tykist tað meiri skynsamt, um PSP-samstarvið varð víðkað til eisini at fevna um kriminalforsorgina.

Mælt verður eisini til, at PSP-samstarvið verður skipað í tveimum stigum, har talan verður um eitt leiðslustig og eitt verkstig. Limirnir í leiðslubólkinum eiga at vera Landfútin, stjórin fyri Almannaverkið, aðalstjóranir í Heilsumálaráðnum og Almannamálaráðnum og møguliga eisini leiðarin fyri Kriminalforsorgina.

Leiðslubólkurin setir mál og skipar karmarnar fyri PSP-samstarvið og kjølfestir skipanina. Leiðslubólkurin eigur at hittast árliga, tá ið PSP-samstarvið er komið í gongd.

Veruliga arbeiðið í PSP-samstarvinum verður í høvuðsheitum framt í verkbólkinum. Tað er í verkbólkinum, at mál vera viðgjørd, og har avgjørt verður, hvørji tilboð skulu veitast, soleiðis at borgarin fær neyðuga hjálp. Verkbólkurin samskipar eisini arbeiðið við aðrar neyðugar myndugleikar og stovnar, tá neyðugt er at inndraga hesar.

Í verkbólkinum eiga umboð fyri politi, psykiatri, Almannaverkið, Megna Títt Lív og Kriminalforsorgini at sita. Um neyðugt, kunnu umboð fyri aðrir myndugleikar og tilboð luttaka, t.d. Dugni og Fountain Hús. Fyri hvønn myndugleika eiga at vera 1 til 2 umboð. Verkbólkurin eigur at hittast mánaðarliga ella oftari eftir tørvi.

**Tilmæli 42**
**Stovna PSP-samstarv**

- Endamálið við nýggja samstarvinum er betur at lofta borgarum, sum annars høvdu dottið ímillum skipanir og ikki fingið neyðugu hjálpina. Harumframt kann væntast, at vitanarbýtið og samstarvið kann fyribyrgja misskiljingum og skeivum niðurstøðum.
- Mettur kostnaður: Væntað verður ikki, at nakar serligur kostnaður av hesum. Ein partur, t.d. Almannaverkið kundið havt sekretariatsfunktión, ella kann ein møguligur samskipari fyri SSP+ taka sær av hesum. Hetta má kannast í fyrireikingararbeiðinum, soleiðis at tað er greitt, áðrenn fíggjarlógin 2023 verður latin Løgtinginum.
- Ábyrgd: AMR saman við HMR, Politi, Kriminalforsorg.
- Tíðarætlan: Fyrireikingararbeiði og avtala millum avvarðandi myndugleikar verða gjørd í 2022, umframt setan av leiðslubólki og verkbólki. Seta á stovn 1. januar 2023.

## Skipa eitt SSP+-samstarv

Politiið hevur víst á, at tørvur er á einum skipaðum samstarvi fyri ung í aldrinum 18-24 ár, nevnt SSP+, har fyribyrging og myndugleikasamskipan við atliti til henda aldursbólk er høvuðsmálið. Hetta kann lýsast sum eitt framhald av tí vanliga SSP-samstarvinum, av tí at royndirnar vísa, at summi ung

í aldursbólkinum 18-24 ár antin longu eru kend í SSP høpi ella hava sama tørv á stuðulstiltøkum o.a. sum børn/ung, sum eru fevnd av SSP-samstarvinum. Hetta kann til dømis vera við atliti at trupulleikum við rúsevnum og óhepnari ella kriminellari atferð.

Fleiri av hesi ungu hava onga útbúgving ella royndir frá arbeiðsmarknaðinum, og ofta hava tey heldur ikki nøktandi bústaðarviðurskifti.

Ætlanin við samstarvinum er at stuðla og hjálpa teimum ungu aftur á beint við at hjálpa teimum ígongd við eina hóskandi útbúgving, at gerast ein virkin partur av arbeiðslívinum og annars veita teimum tann stuðul og hjálp, tey hava fyri neyðini fyri at fáa eitt gott og virkið vaksnamannalív.

SSP+ samstarvið virkar á tann hátt, at málsviðgerar og ymiskir vegleiðarar samstarva um at gera eina virkisætlan saman við tí unga. Tey ungu kunnu sjálvi venda sær til SSP+ samstarvið, men hugsað er eisini, at eitt ávíst uppsøkjandi arbeiði verður gjørt fyri at finna ung, sum ikki megna sjálvi at biðja um hjálp.

Heimild er í § 148 í rættargangslógini fyri, at politiið kann lata upplýsingar til aðrar myndugleikar í sambandi við eitt SSP+ samstarv.

Í Danmark fevnir SSP + samstarvið millum annað um arbeiðsávísing, sosialar myndugleikar, útbúgvingarvegleiðing og Kriminalforsorg.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at eitt tílíkt samstarv eisini verður skipað í Føroyum við íblástri úr Danmark, sum hevur skipanir, sum líkjast okkara. Í Føroyum kundi samstarvið fevnt um politiið, Almannaverkið, ALS, Dugna, Megna Títt Lív og Kriminalforsorgina.

Mælt verður til, at samstarvið verður skipað á sama hátt sum PSP-samstarvið. Leiðslubólkurin kann vera tann sami fyri bæði samstørvini, ímeðan verkbólkurin kann víðkast við umboðum fyri ALS og Dugna í sambandi við SSP+ samstarvið. Verkbólkurin eigur at hittast mánaðarliga ella oftari eftir tørvi.

**Tilmæli 43**
**Stovna SSP+ samstarv**

- Endamálið við nýggja samstarvinum er at stuðla og hjálpa ungum, sum eru í vanda fyri at fara at misnýta rúsevni eins og ungum sum eru á veg út í kriminalitet, soleiðis at tey kunnu fáa eitt gott og virkið vaksnamannalív.
- Mettur kostnaður: Spurningurin er, um arbeiðið í SSP+ verður av slíkum slagi, at tørvur verður á at hava ein samskipara í starvi. Um so er, kundi samskiparin arbeitt ein part av tíðini við PSP.
- Ábyrgd: AMR, Politiið og Kriminalforsorgini. Hetta má kannast í fyrireikingararbeiðinum, soleiðis at tað er greitt, áðrenn fíggjarlógin 2023 verður latin Løgtinginum. Um ein samskipari verður settur, kann roknast við einum kostnaði, sum er umleið kr. 500.000.
- Tíðarætlan: Fyrireikingararbeiði og avtala millum avvarðandi myndugleikar verða gjørdt í 2022, umframt setan av verkbólki. Leiðslubólkurin verður tann sami sum fyri PSP-samstarvið. Seta á stovn 1. januar 2023.

## Faldara til myndugleikar um nær upplýsingar kunnu gevast víðari

Fleiri hoyringarpartar hava víst á, at tað ger teirra arbeiði torførari, at tey ikki vita nær og um tey kunnu geva upplýsingar víðari. Tagnarskyldan verður ofta sædd sum ein trupulleiki, sum forðar fyri samstarvi og samskipan. Trupulleikin sæst, tá ið ætlanin er at deila upplýsingar millum tveir ella fleiri føroyskar myndugleikar, og tá ið ynski er at deila upplýsingar millum ríkismyndugleikar og føroyskar myndugleikar og skipanir.

Hetta sæst m.a. týðiliga, tá talan er um viðkvom ung, sum t.d. hava rústrupulleikar, sálarligar trupulleikar og sosialar trupulleikar. Her kann tað vera torført at vita, nær og í hvønn mun upplýsingar kunnu latast millum t.d. ymisk hjálpartilboð, heilsufaklig starvsfólk og politi. Vandin er, at varsemisreglur gera, at starvsfólk ikki fáa týðandi kunning ella viðkomandi vitan soleiðis, at tey ikki kunnu veita røttu hjálpina.

Bæði Dátuverndarlógin og Rættargangslógin geva tó myndugleikum ávísa heimild at deila upplýsingar við aðrar myndugleikar, tá ið tað neyðugt til tess at røkja týðandi samfelagsáhugamál.
Fyri at gera myndugleikum greitt, nær upplýsingar kunnu latast øðrum pørtum, mælir arbeiðsbólkurin til, at ein faldari verður framleiddur, sum við dømum greiður frá, nær myndugleikar kunnu deila upplýsingar. Tá ið ein tílíkur faldari er gjørdur, mælir arbeiðsbólkurin somuleiðis til, at skipað verður fyri upplýsandi tiltøkum, sum taka støði í faldaranum.

**Tilmæli 44**
**Gera faldara og upplýsingartiltak um nær myndugleikar kunnu deila upplýsingar**

- Endamálið við átakinum er at kunna myndugleikar um nær upplýsingar kunnu deilast.
- Mettur kostnaður: Umleið kr. 30.000 til uppsetan og prent av faldara.
- Ábyrgdari: Løgmansskrivstovan (LMS) saman við politinum og Dátueftirlitinum.
- Tíðarætlan: Faldarin verður klárur á várið 2023.

# Kapittul 7: Viðgerð og eftirviðgerð

## Viðgerðartilboð fyri rúsdrekka- ella rúsevnismisnýtslu

Talið á yngri persónum, sum hava verið/eru í viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu hevur víst at tørvur er á viðgerðartilboðum ætlað til henda aldursbólkin.

Spurningurin um viðgerðartilboð til ung hevur tíðum verið umrøddur. Á hoyringarfundum í sambandi við arbeiðið við Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur Føroya (20215) greiddu ávikavist Blákrossheimið, Heilbrigdi og Frelsunarherurin frá, at tey hildu ikki, at táverandi viðgerðartilboð til ung vóru nøktandi. Tey mæltu øll til at skipa serstøk viðgerðartilboð, sum eru ætlað ungum.

Fleiri av hoyringarpørtunum í arbeiðinum við hesi rúsevnisheildarætlan hava víst á, at tað er týdningarmikið at hava viðgerðartilboð, sum eru ætla ungum, sum hava rúsdrekka- ella rúsevnis-misnýtslu. Hoyringarpartarnir eru samdir um, at tað er týdningarmikið, at viðgerðartilboðini verða veitt so tíðliga sum gjørligt, so tað ber til at fara undir viðgerðina, áðrenn skaðarnir eru vorðnir ov umfatandi. Verður viðgerðin ikki veitt tíðliga, er vandi fyri, at misnýtslan er vorðin so stór, at viðgerðin verður óneyðuga drúgv og kostnaðarmikil – umframt øktu avleiðingarnar fyri bæði persónin sjálvan og avvarðandi hjá viðkomandi.

Í kjalarvørrinum av, at tað seinnu árini er víst á tørvin á serligum viðgerðartilboðum ætlaðum ungum, eru fleiri tilboð komin, sum ávikavist eru ætlað ungum, sum hava tørv á viðgerð fyri misnýtslu umframt børnum og ungum, sum vaksa upp í heimum við trupulleikum vegna rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu. Talan er bæði um tilboð, har ung kunnu koma í ambulanta viðgerð og tilboð um at verða innskriva á eitt viðgerðarstað í døgnviðgerð.

Í Føroyum eru trý viðgerðarstøð, sum veita viðgerð fyri misnýtslu: Blákrossheimið/Blái Krossur Føroya, Heilbrigdi og Frælsi. Virksemið hjá viðgerðarstovnunum er fíggjað við játtan á fíggjarlógini. Viðgerðarháttaløgini og viðgerðartilboðini hjá viðgerðarstøðunum eru ymisk. Í niðanfyristandandi broti verða viðgerðartilboðini hjá viðgerðarstøðunum lýst, og at enda verða lýst tey viðurskifti, sum viðgerðarstøðini í felag hava víst á.

### Blákrossheimið / Blái Krossur Føroya

Blái Krossur Føroya stovnaði í 1984 viðgerðarstaðið Blákrossheimið, og í 2014 varð nýtt viðgerðarheim tikið í nýtslu á Nesi. Virksemið byggir á kristiligt grundarlag og hevur til endamáls at vera viðgerðarstað fyri rúsevnismisnýtarar. Viðgerðin á Blákrossheiminum er skipað sum heildarviðgerð, og inniheldur henda avrúsing, dag- ella samdøgursviðgerð og eftirviðgerð. Harumframt hevur Blákrossheimið, sum liður í viðgerðini, tilboð um ambulanta viðgerð og familjuviðgerð. Hátturin, sum Blákrossheimið nýtir, er sosialpedagogisk og sálarfrøðilig viðgerð, og verður t.d. egstyrkjandi-, ACT- og kognitiv viðgerð nýtt. Blákrossheimið hevur í fleiri ár arbeitt við heildarviðgerð, soleiðis at skilja, at fólk, eftir at tey hava verið í viðgerð, arbeiða víðari í skipaðum bólkum í eftirviðgerð.

Blái Krossur Føroya hevur harumframt viðgerðartilboð, sum eru ætla børnum og ungum, sum hava rúsevnistrupulleikar umframt børnum og ungum, sum vaksa upp í heimum við rúsevnistrupulleikum.

Tilboðini eru "DAT ung" og "Títt rúm". Tilboðini fevna um bæði einstakligasamrøður og bólkaviðgerð. Dentur verður lagdur á, at øll skulu kunna taka av hesum tilboðum, og tey skulu verða lætt atkomulig. Av somu orsøk eru tilboðini ókeypis, og læknaávísing verður ikki kravd fyri at luttaka.

Í arbeiðinum hjá Bláa Krossi verður dentur lagdur á:

- Varandi broyting / positiva hugsan um, at broyting er gjørlig
- Motiverandi samrøður, har rúsviðgeri og persónurin við bundni av rúsevnum arbeiða saman
- Uppliving av samanhangi, ið byggir á eina positiva hugsan um, hví ein er frískur

## DAT-ung

Afturat vanliga avrúsingartilboðunum, hevur Blái Krossur eisini aðrar skipanir, ið venda sær til serligar málbólkar ella nýta øðrvísi viðgerðarhættir. DAT ung er viðgerð fyri ung millum 15 og 18 ár, sum hava rúsnýtsluórógv. DAT er "dialektisk atferðarterapi", og er ein viðurkendur, vísindaliga undirbygdur sálarfrøðiligur viðgerðarháttur. Viðgerðin í DAT ung fevnir um førleikavenjing í bólki saman við øðrum ungum og staksamtalur. Í DAT ung verður dentur eisini lagdur á, at familjan gerst partur av viðgerðini. Tilboðið hjá DAT-ung er ambulant, og tey hava einki døgntilboð. Á hoyringarfundinum kunnaðu tey um, at tey kundu hugsað sær at havt størri toymi við t.d. pedagogum og øðrum. Ung koma í samband við DAT-ung og Bláa Kross umvegis onnur. Tað er sjáldan, at ung sjálvi venda sær til DAT-ung. Tað er oftast barnaverndartænasturnar og foreldur, sum gera tað vegna tey ungu. Hagtølini hjá Bláa Krossi vísa, at tað serliga er hash, sum tey ungu eru bundin av, og eitt sindur av øðrum rúsevnum. Rúsdrekka fyllir ikki nógv í hesum arbeiði, og verður tað oftast drukkið í veitsluhøpi. Hørðu rúsevnini standa sjáldan einsamøll.

Niðanfyri sæst talið á ungum, sum hava sett seg í samband við DAT-ung í 2018-2020:

| 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|
| 23 | 46 | 37 |

## Heilbrigdi á Velbastað

Heilbrigidi á Velbastað hevur virkað síðani 1986. Viðgerðin er skipað eftir Minnesota-frymlinum, og viðgjørt verður eftir 12 stigum. Heilbrigdið veitir avrúsan, ambulanta viðgerð, eftirviðgerð og familjuviðgerð. Hóast Heilbrigdi í høvuðsheitum veitir viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, verður viðgerð eftir Minnesota-frymlinum eisini veitt fyri rúsevnismisnýtslu og blandingsmisnýtslu. Viðgerðin hjá Heilbrigdi fevnir um hesar tríggjar høvuðspartar:

- Avrúsing og forviðgerð
- Viðgerð, ið hevur til endamáls at læra persónin við bundni av rúsevnum betri at kenna seg sjálvan, og læra at liva uttan rúsevni ein dag í senn
- Eftirviðgerð, ið hevur til endamáls at læra persónin við bundni av rúsevnum at luttaka á AA-fundum og í andaligum felagsskapum

## Viðgerðarstovnurin Frælsi á Eiði

Viðgerðarstovnurin Frælsi er eitt viðgerðartilboð til ung í aldrinum 18-24 ár, sum eru bundin av rúsdrekka- og rúsevnum. Frælsi byrjaði virksemi sítt í 2017 í hølum á Eiði. Pláss er fyri átta fólkum í avvenjing í senn. Frelsunarherurin stendur fyri virkseminum á viðgerðarstovninum Frælsi, og samstarvar við Rúsumsorgan Frelsurnarhersins í Noregi.

Viðgerðin á Frælsi byggir ikki á eitt ávíst skipað ástøði, men fer fram í tøttum samstarvi við norsk og føroysk fakfólk. Longdin á viðgerðartíðini tekur støði í rústrupulleikunum hjá hvørjum einstøkum. Eftir lokna viðgerð fer tann ungi í eina sokallaða "útslúsing", har Frælsi roynir at fáa tann unga aftur í skúla, undir útbúgving ella líknandi. Danska kriminalforsorgin hevur góðkent Frælsi sum eitt stað, har til ber at sita dóm, og í 2018 sótu fýra ung fólk ein part av teirra dómi á stovninum.

## Hagtøl fyri viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu

Ein fyritreyt fyri at kunna veita røttu viðgerðartilboðini til ung, sum hava rúsevnistrupulleikar er, at neyvur kunnleiki er til, hvør viðgerðartørvurin er. Tey trý viðgerðarstøðini: Blákrossheimið/Blái Krossur Føroya, Heilbrigdi og Frælsi skráseta í egnum hagtalsgrunnum, hvussu nógv hava verið í viðgerð hjá teimum. Av tí, at hagtalsgrunnarnir eru ymiskir, ber ikki til at samanbera hagtølini hjá teimum trimum viðgerðarstøðunum. Ein avleiðing av hesum er, at vitanargrundarlagið um rúsdrekka- og rúsevnis vanar og misnýtslu hjá ungum er ógvuliga avmarkað, eins og viðgerðartørvurin, úrslit av viðgerð o.s.fr. Tí ber illa til at fáa eina heildarmynd av støðuni. Henda støða er ikki haldgóð, og tí eigur dentur at verða lagdur á, at fáa hetta neyðuga vitanargrundarlagið til vega.

Kapittul 10 í hesi heildarætlan er ein serstakur partur um hagtøl, gransking og vitanargrundarlag við tilmælum um, hvussu betrast kann um støðuna á økinum.

Í myndunum á næstu síðu sæst, hvussu nógv ung hava verið í viðgerð á ávikavist Blákrossheiminum og Frælsi.




*Talva 5. Aldursbýtið á teimum, sum hava verið í viðgerð.*

**VIÐGERÐ - BÝTT EFTIR ALDRI**

Talva 5 vísir býtið millum ymiskar aldursbólkar. Tey flestu, sum leitaðu sær hjálp hjá okkum fyri bundni í 2020, eru í aldrinum 30-59 ár.

Aldursbólkurin 30-59 ár umboðar í 2020 uml. 55% av øllum brúkarunum samanborið við 62% í 2019 og 69% í 2018. Broytingin stavar frá øktum tali av ungum í *DAT ung* viðgerðini.

Í 2019 og 2020 vísir eina øking í yngsta aldursbólkinum samanborið við undanfarnu árini.

Miðalaldurin á øllum, sum vóru í viðgerð í 2020, var 43 ár samanborið við 45 ár í 2019. Sí útgreining av aldursbýtinum í talvu 5.

**Hagtøl fyri árini Frælsi hevur verið virkið**



## Ymiskir trupulleikar og fjøltáttaður viðgerðartørvur – samstarv millum stovnar og skipanir

Tey trý viðgerðarstøðini kunnaðu um, at ung, sum koma í viðgerð, koma úr øllum landinum og sosialum løgum. Tað vanliga er, at tey hava eina blandingsmisnýtslu, t.v.s. at tey misnýta fleiri evnir t.d. rúsevnir, tablettir og rúsdrekka.

Viðgerðarstøðini greiddu frá, at orsøkirnar til rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu millum ung eru samansettar, fjøltáttaðar og torgreiddar. Tí er neyðugt, at hava fjøltáttaði viðgerðartilboð, sum hóska seg til viðgerðartørvin hjá tí einstaka. Øll viðgerðarstøðini samstarva við aðrar viðkomandi samstarvsfelagar t.d. psykiatriska depilin, Megna títt lív, Gigni, Tú og eg ráðgevingina og SSP. Fleiri av hoyringarpørtunum halda, at viðgerðarstøðini samstarva ikki nóg væl sínámillum, og at hetta er stórt spell, tí við samstarvi millum viðkomandi partar og millum viðgerðarstøðini kann størri samvirkanarárin (synergieffekt) fáast.

Viðgerðarstøðini vísa á, at viðgerðartilboð eiga at verða sædd í eini heild. T.v.s., viðgerðartilboð eisini eiga at verða veitt til familjuna hjá persóninum, sum fer í viðgerð. Við at veita tilboð til familjuna, ber til at røkka betri úrslitum, enn um tilboðini bert verða veitt tí persóninum, sum fer í viðgerð.

Viðgerðarstøðini umrøddu kynsbýtið á teimum, sum søkja sær viðgerð. Í Títt rúm eru tað flestar gentur í ungdómsbólkum. Dreingirnir biðja ikki um hjálp í sama mun. Heilbrigdið sær sama mynstur. Av ungum yngri enn 18 ár, sum eru í viðgerð, eru 70% gentur; meðan 70% av teimum eldru, sum eru í viðgerð eru menn. Á Frælsinum er kynsbýtið øvugt. Har eru flestu av teimum, sum eru í viðgerð, menn.

Á hoyringarfundinum kunnaðu viðgerðarstøðini um, at flestu av teimum ungu, sum søkja sær viðgerð í sambandi við rústrupulleikar, ikki eru partur av øðrum skipaðum felagsskapum, t.d. ítrótti, skótum ella samkomum. Fleiri av teimum hava góð skapandi evnir innan ymsar listagreinar t.d. tónleik, men tey hava ikki nakran felagsskap har tey kunnu røkja síni áhugamál og sínar listarligu gávur. Tí er tað fyri nógv sera gagnligt, at viðgerðarstovnarnir ofta geva møguleika fyri at brúkararnir sleppa at royna síni kreativu evni, og við hvørt verður hetta brúkt í sjálvari viðgerðini. Aðrastaðni í heildarætlanini eru tilmæli um ávegishús, skipaði bústaðarviðurskifti og mentorskipanir. Um hesi verða fylgt, ber væl til at skapa stimbrandi sosial umhvørvi fyri tey, sum hava verið í rúsevnisviðgerð.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað er týdningarmikið at gagnnýta og menna tað tilfeingið, sum longu finst á økinum. Arbeiðsbólkurin tekur undir við sjónarmiðnum um størri samstarv millum viðkomandi partar, tí á henda hátt ber til at fáa størri samvirkanarárin. Somuleiðis heldur arbeiðsbólkurin, at møguleikin fyri størri samstarvi millum viðgerðarstovnarnar eigur at verða kannaður. Mælt verður tí til, at Heilsumálaráðið saman við viðkomandi pørtum fer undir arbeiðið at kanna, hvussu samstarv millum stovnarnar kann skipast.

## Tilhaldsstað fyri ung við rúsevnistrupulleikum

Hoyringspartar hava kunnað um, at fleiri av teimum ungu, sum hava rústrupulleikar liva undir sera truplum korum og hava eina harða lívsførslu. Hjá hesum ungu eru bústaðarviðurskifti ein stórur trupulleiki, og umstøðurnar hjá teimum eru ofta ótryggar. Nógv av teimum búgva í vánaligum

leigumálum; meðan onnur ikki hava egnan bústað og tí noyðast at búgva hjá vinfólki í styttri ella longri tíð.

Fleiri hoyringarpartar, t.d. Almannaverkið, Megna Títt Lív, Føroyskir Brotsfrøðingar og Blái Krossur halda, at tørvur er á einum staði, har ung við rúsevnistrupulleikum kunnu búgva trygt, hóast tey nýta rúsevni. Við at skipa ein tilhaldsstað fyri hesi ungu, kunnu tey fáa eitt frístað frá ótryggleikanum og sleppa úr ymiskum ósunnum sambondum, har eitt nú vandin fyri neyðtøku kann vera stórur.

Eitt tilhaldsstað fyri ung eigur at vera lætt atkomiligt, og tí hevði verið best, um tað lá mitt í Havnini. Tað er týdningarmikið, at tilhaldsstaðið rúmar ungum við rúsevnismisnýtslu uttan ov nógvar treytir og forðingar. Samstundis kundu tey ungu fingið hjálp og varisliga verið eggjað til at farið í viðgerð.

Eitt tílíkt tilhaldsstað eigur at hava pláss fyri 8 til 10 ungum, og viðgerðarstovnarnir saman við Megna Títt Lív kunnu hava dagliga raksturin um hendi. Ansni og Politiið kunnu fara framvið nakrar ferðir um náttina. Tilhaldsstaðið eigur bert at hava tað mest neyðuga innbúgvið, so tað er lætt at reingera. Um viðgerðarstovnarnir eru saman um raksturin og manning, er kanska lættari at finna út av, hvat viðgerðartilboð egnar seg best til hvønn einstaka brúkaran, um hann fer í viðgerð.

Hóast búfólk á einum slíkum tilhaldsstað kanska ikki høvdu búð fast á staðnum, men kanska í tíðarskeiðum búðu hjá vinfólkum ella familju, so høvdu tey kunna havt eitt tilknýti, eitt trygt fyribilsstað og havt skrásettan bústað har. Á henda hátt hevði borið til hjá teimum at t.d. móttikið brøv, pakkar og boð har.

Spurningurin um Herbergið kann brúkast sum eitt tilhaldsstað fyri ung við rúsevnismisnýtslu hevur verið umrøddur. Arbeiðsbólkurin heldur ikki, at tað er skilagott, tí Herbergið er ætlað einum øðrum málbólki, sum er í eini aðrari lívsstøðu. Hartil kemur, at Herbergið er fult.

Arbeiðsbólkurin tekur undir við hugskotinum um eitt tilhaldsstað og mælir til, at ein fyrireikingarbólkur verður settur at kanna, hvussu eitt slíkt tilboð kann skipast. Arbeiðsbólkurin mælir til, at ung, sum hava verið ella eru í viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu verða partur av tilgongdini, tá ið hetta hetta arbeiðið verður fyrireikað. Í fyrireikingarbólkinum kundu verið umboð fyri Heilsumálaráðið, Almannamálaráðið, Megna Títt Lív, Bláa Krossi, Heilbrigdi og Frælsi.

**Tilmæli 45**
**At skipa eitt tilhaldsstað fyri ung við rúsevnistrupulleikum**

- Endamálið við átakinum er at útvega umgum við rúsevnistrupulleikum tryggar umstøður á einum staði, , har tey verða møtt við virðing og áliti, og tey varisliga verða eggjað til at fara í viðgerð.
- Mettur kostnaður: 1-5 milliónir krónur ella meiri. Hetta veldst alt um, hvussu tað hepnast at fáa hóskandi høli, og um vælvild og samstarv frá kommunum og øðrum pørtum. Raksturin verður serliga til at hava fólk knýtt at húsunum umframt møguliga leigu, trygging o.tíl.
- Ábyrgdari: AMR saman við HMR.
- Tíðarætlan: Ein arbeiðs-/fyrireikingarbólkur verður settur at kanna møguleikarnar í 2023, so tilboðið kann lata upp, tá hóskandi høli er funnið.

## Viðgerðarstað sum liggur burturfrá

Tá ið tosað hevur verið um ung, sum longu misnýta rúsevni á hoyringarfundunum, hava partar við serligum innliti í henda trupulleika víst á, at stórur tørvur er á einum viðgerðarstaði, sum liggur burturfrá, helst á onkrari útoyggj ella í fjarskotnari bygd.

Ein høvuðsorsøk til, at tørvur er á slíkum viðgerðarstaði, er, at núverðandi stovnar ikki kunnu veita ungum, sum hava djúptøknar og samansettar rústrupulleikar nøktandi hjálp. Her verður m.a. hugsað um nakrar av brúkarunum hjá MTL, sum umframt rústrupulleikar, eisini ofta hava álvarsligar sálarligar ella sosialar trupulleikar. [37]

Ein onnur grundgeving er, at hjá teimum, sum misnýta rúsevni, er netverkið og "vinaskarin" ofta knýtt at rúsumhvørvinum. Um ikki ein ávís frástøða ella eitt brot frá hesum umhvørvi kann fáast í lag, kann tað vera trupult at sleppa úr misnýtsluni.

Eitt slíkt viðgerðarstað er serliga hugsað til tað fyrsta skeiðið, tá ið persónurin millum annað verður avrúsaður og fyrstu tíðina av viðgerðini.

Best hevði verið, um núverandi viðgerðarstovnar kundu samstarva um eitt tílíkt stað, samstundis sum lækni, sálarfrøðingur og onnur viðkomandi starvsfólk vóru knýtt at. Tá støðan er stabiliserað, kann tann einstaki brúkarin fara í viðgerð á tí stovni, sum hóskar best til júst hansara/hennara støðu.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at hesin møguleikin verður kannaður nærri.

**Tilmæli 46**
**Kanna, um til ber at skipa eitt viðgerðarstað burturfrá**

- Endamálið við átakinum er at gera fyrsta skeiðið, tá ið persónurin millum annað verður avrúsaður, lættari hjá teimum, sum hava serligan tørv á at sleppa burturúr ella burturfrá vanliga umhvørvinum. Eisini er slíkt viðgerðarstað ætlað at hjálpa teimum, sum hava so djúptøknar trupulleikar, at tey ikki rúmast á vanligum viðgerðarstaði.
- Mettur kostnaður: Sjálvt kanningararbeiði hevur ongan serligan kostnað við sær, men arbeiðsorka má setast av. Hvat eitt tílíkt viðgerðarstað kemur at kosta, valdast millum annað av, hvar tað verður staðsett, og hvørji høli eru neyðug/tøk. Afturat høliskostnaði má roknast við rakstarkostnaði.
- Ábyrgdari: HMR.
- Tíðarætlan: Byrja kanningararbeiði í 2023.

## Ávegishús (Halfway house), Mentorskipan og bústaðartilboð

Ein persónur, sum hevur verið bundin at rúsevnum, hevur ofta tey flestu av sínum vinarbondum í einum felagskapi, sum er tengdur at rúsevnisumhvørvinum. Hjá hesum persónum kann tað vera sera trupult at sleppa úr rúsevnisumhvørvinum og finna nýggjar vinir (og harafturat er føroyska samfelagið

[37] Sí eisini brotið um dupultdiagnosur á síðu xx

er lutfalsliga lítið). Nógv hava heldur ikki útbúgving ella arbeiði, og hava tí trupult við at koma á arbeiðsmarknaðin og fáa eitt virkið lív.

Rúsevnisviðgerð tekur ofta áleið 6 vikur. Í hesum tíðarskeiði hevur persónurin atgongd til fleiri fakfólk, sum royna at hjálpa, og harafturat verður hann/hon partur av einum felagsskapi, har øll hava sum mál at verða rúsfríur. Tá viðgerðin er endað, kann tað verða trupult at fara út aftur í samfelagið og klára at halda seg rúsfrían – serliga, um netverkið og vinarbondini enn eru í einum umhvørvi, har rúsevni eru vanlig.

Eitt ávegishús er eitt tilboð til hesar persónar, har roynt verður at gera skiftið út í samfelagið aftur lættari og veita teimum hjálp og stuðul at fóta sær, so fyrrverandi misnýtarar verða betur førir fyri at liva uttan rúsevni. Harafturat er eitt ávegishús ein lyklapartur av metodisku tilgongdini hjá Bláa Krossi og Heilbrigdinum.

Eitt ávegishús kundi samstarva við Dugna og Fountainhúsið, og kundi á henda hátt hjálpt brúkarunum at fara í holt við eina útbúgving ella at finna eitt hóskandi arbeiði. Somuleiðis kundi eitt tílíkt tilboð samstarva við Megna Títt Lív, Almannaverkið, Psykiatriska depilin og Kriminalforsorgina um at geva hesum persónum bestu fortreytir fyri einum rúsfríum lívi.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað ikki er skynsamt, at hava fleiri ávegishús í Føroyum, men mælir heldur til at allir viðgerðarstovnarnir samstarva um eitt ávegishús og raksturin av hesum.

Skilagott hevði eisini verið, at fingið í lag eina skipaða mentorskipan fyri persónar, sum hava verið í rúsviðgerð. Hetta hava fleiri hoyringarpartar peikað á sum ein veikleika í núverandi viðgerð. Ein tílík mentorskipan kundi stuðla persónum í at finna nýggj vinarløg uttan fyri rúsumhvørvið og annars veitt menniskjansligan og kensluligan stuðul. Ein tílík mentorskipan kundi verið knýtt at og samskipað av ávegishúsinum.

Fleiri hoyringarpartar, sum arbeiða við persónum, sum eru bundnir at rúsevnum, hava eisini víst á, at bústaðarstøðan er ein stórur trupulleiki fyri persónar, sum eru komnir úr rúsevnisbundinskapi.

Tað er ein stór eyka byrða hjá fólki, sum frammanundan hava nógv at hugsa um og dragast við, um tey ikki megna at finna nakað at búgva í. Hetta skapar ótryggleika, og økir tí um vandan fyri aftur at verða freistaður at taka rúsevni.

Arbeiðsbólkurin heldur, at okkurt slag av vardum íbúðum, har stuðul og mentorskipan verður knýtt at, hevði givið hesum bólki eitt betri útgangsstøði at skapa sær eitt gott, virki og rúsfrítt lív.

Arbeiðsbólkurin mælir til at ein mentorskipan verður stovnað, sum so kann hava tilknýti til eitt komandi ávegishús. Somuleiðis mælir arbeiðsbólkurin til, at kannað verður, um til ber at gera okkurt slag av vardum íbúðum til fólk, sum hava verið í rúsviðgerð.

**Tilmæli 47**
**Ávegishús (Halfway house) verður skipað í samstarvi millum viðgerðarstovnarnar**

- Endamálið við átakinum er at gera vegin út í samfelagið lættari at ganga fyri persónar, sum hava verið í rúsviðgerð og at minka um vandan fyri, at tey aftur verða bundin av rúsevnum.
- Mettur kostnaður: Veldst um, hvussu hetta kann samskipast við onnur tilboð hjá t.d. Almannaverkinum. Kostnaðurin veldst eisini um, hvørji høli, landið, kommunur og felagsskapir hava, sum kunnu brúkast til slíkt endamál.
- Ábyrgdari: HMR saman við AMR og viðgerðarstovnunum.
- Tíðarætlan: Kanningar- og fyrireikingararbeiðið verður sett í gongd í 2024.

**Tilmæli 48**
**Mentorskipan**

- Endamálið við átakinum er, at gera eina mentorskipan, sum kann stuðla teimum, sum eru komin úr rúsmisnýtslu í at skapa sær nýggj netverk, sambond og vinarbond og eitt rúsfrítt lív.
- Mettur kostnaður: Eingin meting er av tørvinum, so tí kann vera trupult at staðfesta, hvussu nógvum ráðgevum/mentorum, tørvur er á.
- Ábyrgdari: AMR, saman við Megna títt lív, Fountainhúsinum og Almannaverkinum.
- Tíðarætlan: Byrja kanningararbeiðið í 2022.

**Tilmæli 49**
**Bústaðartilboð til persónar, sum hava verið í rúsevnisviðgerð**

- Endamálið við átakinum er at skapa tryggar karmar um persónin, og á tann hátt minka um vandan fyri at hann aftur fer at misnýta rúsevni
- Mettur kostnaður: Veldst um, hvussu hetta kann samskipast við onnur tilboð hjá t.d. Almannaverkinum. Kostnaðurin veldst eisini um, hvørji høli, landið, kommunur og felagsskapir hava, sum kunnu brúkast til slíkt endamál. Bústaðir kann vera ein lyklaleikari í hesum átaki.
- Ábyrgdari: AMR.
- Tíðarætlan: Bústaðartrot er, so hetta er ein stór avbjóðing. Um tilvísingarrætturin hjá AMR í Bústøðum verður brúktur, kann hetta tilboð helst byrja í 2025.

## Ritalinkafé / heilivágsútflýggjanarskipan

Fleiri av hoyringarpørtunum umrøddu avbjóðingar við heilivágsnýtslu, har tey serliga løgdu dent á ADHD heilivág sum Ritalin. Fyri fólk við ADHD hevur ritalin ein sissandi virknað, sum ger, at tey lættari kunnu halda fokus og hugsavna seg. Fyri fólk, sum ikki hava ADHD, er Ritalin eitt skjótt virkandi stimbrandi evni, sum kann minna um kokain.

Hesir hoyringspartarnir greiddu frá, at hátturin, sum m.a. ADHD-heilivágur verður útflýggjaður, kann verða ein trupulleiki fyri nøkur ung, sum hava tørv á hesum heilivági. Tey søgdu, at tað ikki er óvanligt, at fólk, sum hava ADHD, verða løgd undir trýst, tí onnur, sum ikki hava ADHD, vilja hava burtur av ella keypa teirra heilivág (t.d. Ritalin) við tí endamáli at rúsa seg. Rúsin fáa tey antin við at taka heilivágin, sniffa ella sproyta seg við Ritalin.

Nógv ung við ADHD siga, at tey royna at krógva, at tey hava ADHD, fyri at sleppa undan trýsti og óhepnum støðum. Hetta ger teirra støðu truplari. Onkur hevur eisini greitt frá, at um fólk síggja, at tey fáa Ritalin á apotekinum, so vera tey løgd undir trýst til at selja burturav.

*Útflýggjan á apotekum*

Nakrir hoyringarpartar kundu hugsað sær at var minni sjónligt, hvønn heilivág tann einstaki kundin fær, og tað m.a. átti at borið betur til at fingið smærri nøgdir í senn á apotekinum. Hetta er tí, at á apotekinum er heilivágsútflýggjanin ofta rættiliga sjónlig, og onkuntíð kann onkur, tú kennir, standa nærhendis, tá tú ert á har. Hetta er serliga óheppið hjá teimum, sum t.d. fáa Ritalin ella annan heilivág, sum kann hava áhuga hjá misnýtarum. Tí mæltu tey til at fáa í lag eina skipan, har heilivágurin verður útflýggjaður á ein hátt, sum er minni sjónligur fyri øðrum kundum.

*Ritalinkafé*

Ritalinkaféir verða nevndar sum ein møgulig loysn hjá teimum, sum kunnu koma undir trýst ella sjálvi hava trupult við at umsita tann heilivágin, sum tey hava fingið. Ein Ritalinkafé er eitt stað, har fólk kunnu fara at fáa smærri nøgdir av heilivági. Við at fáa smærri nøgdir á henda hátt, slepst undan at eiga størri nøgdir heima. Sum oftast verður tosað um Ritalin og líknandi ADHD-heilivág, men skipanin kann eisini brúkast til m.a. heilivág fyri angist ella metadon. Ein slík skipan kundi eisini hjálpt fólki, sum hava trupult við at umsita og taka røttu nøgdirnar av øðrum heilivági – eins og tað kundi verið viðkomandi, tá talan er um annan heilivág, sum hevur høgt søluvirði, t.d. heilivág fyri ymiskt sálarligt órógv. Ein fyrimunur við slíkum kaféum er, at tað eisini ber til at fylgja við, um heilivágurin verður tikin rætt. Um nakrir borgarar altíð skulu fáa útflýggjað sín heilivág á eini Ritalinkafé, so mugu slík tilboð vera atkomulig allastaðni, har hetta kann vera viðkomandi.

Við støði í tí, sum hoyringarpartarnir hava ført fram um m.a. ritalinmisnýtslu og uppskotum um at tálma hesum, heldur arbeiðsbólkurin, at farið eigur verið undir at kanna, hvussu hesin trupulleiki kann loysast, uttan at loysnin verður ov inntrívandi í dagligdagin. Hetta arbeiðið eigur at verða gjørt í samstarvi við viðkomandi partar.

**Tilmæli 50**
**Finna eina loysn viðv. trupulleikanum við útflýggjan og goymslu av Ritalin og øðrum heilivági**

- Endamálið við átakinum er, saman við viðkomandi pørtum, at finna loysnir og mannagongdir viðvíkjandi útflýggjan av ADHD-heilivági og møguliga øðrum heilivági, sum hevur søluvirði ella kann vera trupul at umsita.
- Mettur kostnaður: Kanningararbeiði hevur ongan serligan kostnað við sær, men arbeiðsorka má setast av. Tað ber í løtuni ikki til at siga, hvør kostnaðurin annars verður av at skipa slíkt tilboð.
- Ábyrgdari: Heilsumálaráðið saman við viðkomandi pørtum.
- Tíðarætlan: 2022.

# Kapittul 8: Eftirlit

## Eftirlit við viðgerðarstovnum

### Lóggáva um viðgerðarstovnar og góðkenningar

Í álitinum um Rúsevnis- og rúsdrekkapolitikk Føroya (2015) varð víst á, at tørvur var á regluverki, sum ásetti krøv o.a. til rúsevnisviðgerðarstovnarnar. Tað var hildið at vera óheppið, at einki lógarverk var, sum skipaði viðurskiftini á viðgerðarstovnunum. Tann 1. januar 2020 varð Løgtingslóg um virksemi á stovnum, ið veita rúsviðgerð sett í gildi. Lógin ásetur m.a.:

- At persónar ið hava tørv á samdøgursviðgerð, kunnu fáa ókeypis tilboð um slíka viðgerð
- Fyri at veita viðgerð, skal ein viðgerðarstovnur hava góðkenning frá Heilsutrygd
- Treytir verða settar til teir fakligu førleikarnar hjá viðgerðarstarvsfólkunum
- Viðgerð við heilivági kann bert gevast av lækna
- Áðrenn ein persónur kann innskrivast á ein viðgerðarstovn, skal hesin fyrst visiterast av vakthavandi serlækna

Tann 29. mai 2020 kom kunngerðin um góðkenning av stovnum, ið veita rúsviðgerð í gildi. Við støði í kunngerðini varð farið undir tilgongdina at góðkenna viðgerðarstovnarnar. Allir tríggir viðgerðarstovnarnir hava fingið góðkenning, og varð hetta avgreitt í fyrru helvt av januar.

Sambært nýggju lóggávuni og kunngerðini frá 2020 er góðkenningin til stovnarnar galdandi í 5 ár, og kann takast aftur, um stovnarnir ikki longur lúka góðkenningarkrøvini ella onkur átaluverd viðurskifti eru.

Á hoyringarfundum varð nevnt í fleiri umførum, at virksemið hjá viðgerðarstovnum var ov illa skipað, og at Heilsumálaráðið, sum varðar av játtanini, átti at sett krøv og hildið eftirlit við stovnunum. Arbeiðsbólkurin metir, at við nýggju lóggávuni og kunngerð og góðkenningini av viðgerðarstovnunum hevur Heilsumálaráðið tikið røttu stigini til at tryggja eitt nøktandi støði og fyribyrgja trupulleikum.

## Marknaeftirlit

Bæði politi og tollvald gera nógv fyri at steðga innflutninginum av ólógligum rúsevnum. Tó metir politiið, at myndugleikarnir bert steðga einum lítlum parti av innflutninginum. TAKS hevur seinastu árini roynt at uppraðfest eftirlitsarbeiðið fyri at steðga ella minka um nøgdirnar av rúsevnum, sum verða innflutt. Hetta er serliga gjørt við at seta fleiri tollarar í starv, umframt við at skipa eftirlitsarbeiðið betur og gera tað meira tíðarhóskandi.

Tíverri er útgerðin, sum TAKS hevur til at hava eftirlit við rúsevnum, ikki tíðarhóskandi, og trupult er at keypa nýggja útgerð innanfyri núverandi játtanina hjá TAKS.

Eitt, sum TAKS hevur nevnt, sum veruliga kundi styrkt eftirlitsarbeiðið, er at leggja størri dent á profilering – at kanna ymisk mynstur fyri betur at velja út fólk og farm til kanningar. Hetta kundi verið við til at steðga eini størri nøgd av rúsevnum við markið.

Til hetta arbeiðið er neyðugt við starvsfólki við røttu førleikunum umframt eini profileringskipan, t.v.s. eini KT-skipan at skipa upplýsingar hjá TAKS um ferðafólk og frakt. Hetta hevði lætt munandi um eftirlitsarbeiðið og gjørt eftirlitið meira beinrakið.

Skipanirnar hjá TAKS eru føroyskar, og tí er trupult at brúka somu skipanir, sum í grannalondunum. Tað er tí helst neyðugt at menna eina føroyska skipan.

Vørur og útgerð, sum verða innflutt til Føroya koma oftast í bingjum. Og hesar bingjur, sum eru nógvar í tali, verða eisini nýttar til at innflyta rúsevni. Arbeiðið at kanna bingjurnar kundi verið betri og munadyggari, um TAKS fekk fleiri og nýggjari bingjuskannarar. Afturat hesum hevði onnur útgerð sum fiburskop og Trunac-handskannarar styrkt eftirlitið.

Rúsevni koma eisini við ferðamannaskipum, sum Norrønu, og við flogførum.

Eftirlitshølið hjá TAKS á økinum, har Norrøna leggur at, er sera trongt, og ynskiligt hevði verið við betri plássi. Á vegnum er onki pláss til at seta bilar, sum bíða eftir tollavgreiðslu ella eftirliti, og sum kajøkið er skipað í dag, ber hetta ikki til.

Plásstrot er eisini, har ferðafólkini ganga í land av Norrønu. Hølini eru ikki tíðarhóskandi og eru ikki gjørd til tað ferðafólkatrýst, sum er í dag, og sum kann roknast við í framtíðini. Tí er neyðugt at fáa betri pláss at avgreiða fólk, sum koma til tollavgreiðslu og til at taka ferðafólk og viðføri inn til eftirlit. Her kundi verið gjørt eitt eftirlitshøli aftanfyri, soleiðis at fólk, sum skulu til eftirlit ikki eru sjónlig fyri óviðkomandi. Hesi viðurskifti leggja trýst á starvsfólkini at avgreiða tollingina.

Á flogvøllinum er eftirlitshølið hjá TAKS somuleiðis ov litið til at avgreiða ferðafólk, sum koma at tollavgreiða vøru. Eftirlitsøkið vendir skeivt, soleiðis at ferðafólk og viðføri, sum verð tikin út til eftirlit eru sjónlig fyri onnur ferðafólk, sum ganga framvið. Hetta er ikki virðiligt, hvørki fyri ferðafólkið, sum verður tikið út til eftirlit, ella fyri tollararnar, sum skulu útinna eftirlitið.

TAKS hevur gjørt vart við, at tað er týdningarmikið, at myndugleikarnir kunnu deila upplýsingar, so teir fáa arbeitt meiri effektivt. Í hesum áliti verður aðrastaðni mælt til, at Løgmansskrivstovan (saman við Dátueftirlitinum og Politi) ger vegleiðingar um, hvussu upplýsingar kunnu latast øðrum myndugleikum. Men møguliga er neyðugt at gera onkrar broytingar í heimildum ella lóggávu at lata upplýsingar í.s.v. tollarbeiði, t.d. millum myndugleikar og lond.

**Tilmæli 51**
**Nýggj Profileringsskipan til TAKS**

- Endamálið er at menna eina føroyska profileringsskipan, sum kann samskifta við aðrar skipanir hjá TAKS. Profileringsskipanin skal gera marknaðareftirlitið hjá TAKS munadyggari og meira beinrakið.
- Mettur kostnaður: kr. 3.000.000.
- Ábyrgdari: Fíggjarmálaráðið (FMR).
- Tíðarætlan: greina hvat skipanin skal gera, umframt kravfestingar í 2022. Útbjóða menningar-arbeiðið til føroyskar KT-veitarar í 2023.

**Tilmæli 52**
**Dagføring av skannarum hjá TAKS**

- Endamálið er at fáa 4 nýggjar, meira tíðarhóskandi og effektivar 2D skannarar.
- Mettur kostnaður: kr. 1.600.000 (uml. 400.000 pr. skannara). Fyrsti skannarin varð keyptur í 2021 og játtan er til ein í 2022. Tí verður mælt til, at hendan játtanin heldur fram í 2023 og 2024.
- Ábyrgdari: FMR.
- Tíðarætlan: 2021-2024.

**Tilmæli 53**
**Onnur neyðug útgerð til TAKS**

- Endamálið er at útvega aðra neyðuga útgerð til TAKS, so sum handskannarar og fipurskop.
- Mettur kostnaður: kr. 400.000.
- Ábyrgdari: FMR.
- Tíðarætlan: So skjótt til ber og eftir tørvi.

**Tilmæli 54**
**Nýtt eftirlitshøli til TAKS á økinum har Norrøna leggur at og tilhoyrandi bingjuskannara**

- Endamálið er at fáa betri og meira tíðarhóskandi eftirlitshøli til TAKS, soleiðis at eftirlitið kann gerast meira effektivt og meira virðiligt. Í somu atløgu, at økið verður gjørt klárt til Norrønu, eigur ein bingjuskannari at verða keyptur og settur upp.
- Mettur kostnaður: Arbeiðsbólkurin hevur ikki fingið upplýst nakran kostnað av nýggjum eftirlitshøli. Ein bingjuskannari kostar umleið kr. 2 milliónir.
- Ábyrgdari: FMR, Tórshavnar Havn, Smyril Line.
- Tíðarætlan: Nýggj avgreiðsluhøll og nýtt havnarøki verður í næstum gjørt til Norrønu. Neyðugt er at tryggja, at tørvurin hjá TAKS verður tikin við í ætlanunum.

**Tilmæli 55**
**Dagføring av eftirlitshølum hjá TAKS á flogvøllinum**

- Endamálið er at fáa betri pláss at fremja eftirlit og gera eftirlitið meira virðiligt fyri ferðafólk og tollarar.
- Mettur kostnaður: Arbeiðsbólkurin hevur ikki fingið nakra kostnaðarmeting.
- Ábyrgdari: FMR saman við Vága Floghavn.
- Tíðarætlan: So skjótt til ber. Eigur at verða tikið við í langtíðarætlanirnar hjá Vága Floghavn fyri flogvallarøkið og terminal.

# Kapittul 9: Revsifulnaður

Revsifulnaður snýr seg um, hvussu ein dømd revsing verður sett í verk, og hvørjar reglur eru galdandi fyri íverksetanina av revsingini. Uppskot til nýggja revsifulnaðarlóg fyri Føroyar er júst løgd fyri tingið. Í lógaruppskotinum er ein serlig áseting, sum heimilar royndarskipanum við alternativari siting og størri møguleikum fyri frígongd til útbúgving og arbeiði.

Hetta má metast sum eitt stórt frambrot í Føroyum, um hugsað verður um forsøguna og fyrirtreytirnar hjá teimum, sum verða dømd revsing. Tað er ein sannroynd, at nógv av teimum, sum verða dømd, hava havt trupul kor og nógvar avbjóðingar. M.a. er farnu árini vorið greitt, at ein sera greiður samanhangur er millum ADHD og kriminalitet – serliga tá tað snýr seg um brot á rúsevnislóggávu. Og nógvir myndugleikar, politikarar og felagsskapir hava rópt varskó um, at vit eiga at gera meiri fyri at veita viðgerð og hjálp til fangar við ADHD og øðrum atferðartrupulleikum. Vit kunnu tí vóna og vænta, at útlitini fyri rehabilitering verða betraði.

## Fongsulsviðurskifti

Fongsulsviðurskiftini í Føroyum hava síðstu árini verið fyri stórum atfinningum. Víst hevur verið á, at føroyingar, sum eru dømdir at sita í meira enn hálvt annað ár, noyðast at sita revsingina í Danmark. Hetta er m.a. vegna vantandi arbeiðis- og útbúgvingarmøguleikar í Føroyum. Eisini vera fongsulsviðurskiftini í arrestini í Mjørkadali ikki mett nøktandi, tí Mjørkadalur hvørki er bygt sum fongsul ella arrest, og tað ber ikki til at skipa viðurskiftini soleiðis, at fangar kunnu sita fyri seg og varðhaldsfangar fyri seg. Varðhaldsfangar sita undir strangari treytum, ímeðan revsimálið verður kannað. Av tí at tað ikki ber til í Mjørkadali at gera mun á fangunum, noyðast vanligir fangar at sita undir strangari treytum og meiri avbyrgdir enn neyðugt.

Løgmaður hevur gjørt greitt, at trupulleikarnir einans kunnu loysast til fulnar við at byggja eitt nýtt fongsul í Føroyum.

Samstundis sum vit senda nógvar fangar til Danmarkar, kann staðfestast, at nøgdin av rúsevnum í Føroyum er vaksandi, og at útbreiðslan ikki er avmarkað til einkultar bólkar. Hóast eingi beinleiðis prógv eru fyri hesum, ber til at spyrja, um ein samanhangur kann vera millum øktu mongdina av rúsevnum í Føroyum og alsamt harðari rúsumhvørvi øðrumegin, og hinumegin, at føroyskir fangar noyðast at sita revsingina í Danmark, um talan er um longri fongsulsdómar.

Nakrir av hoyringarpørtunum, sum t.d. Megna Títt Lív, hava nevnt, at fongsulsumhvørvið í Danmark er sera hart, og at føroyskir fangar lætt kunnu koma undir stórt trýst í hesum umhvørvinum, m.a. tí at nógvir fangar í Danmark eru partur av meiri ella minnið skipaðum bólkum, sum fáast við álvarsligan kriminalitet og harðskap. Amnesty Føroyar hevur eisini víst á líknandi trupulleikar.

Ein rættiliga stórur partur av føroysku fangunum, sum sita revsing (bæði í Føroyum og í Danmark), sita inni fyri narkotikabrotsverk ella brotsverk, sum kunnu setast í samband við rúsevnismisnýtslu.

Ein arbeiðsbólkur við føroyskum og donskum embætisfólki varð settur at kanna, hvussu bøtast kann um fongsulsviðurskiftini í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin at bøta um fongsulsviðurskifti kom í 2021 til hesar niðurstøður:

- Um føroyingar sum meginregla skulu sita longri dómar í Føroyum er neyðugt antin at gera eina grundleggjandi umbygging av hølunum í Mjørkadali ella at byggja eitt nýtt fongsul.
- Neyðugt er at skapa betri og meiri fjølbroyttar arbeiðis- og útbúgvingarmøguleikar fyri føroyskar fangar. Hetta hongur í ein ávísan mun saman við hølisviðurskiftunum. Onkrar av hesum betringum kunnu fremjast undir verandi kørmum.
- Samstarvið millum danskar og føroyskar myndugleikar eigur at verða styrkt í sambandi við, at føroyskir fangar verða leyslatnir í Danmark. Í flestu førum vera føroyskir myndugleikar ikki kunnaðir um hetta. Føroyskir fangar, sum verða leyslatnir úr Danmark fáa tí ikki ta hjálp, teimum tørvar, tá ið teir koma heim. Tí eiga vit sum skjótast at fáa í lag formligar avtalur millum donsku kriminalforsorgina og Almannaverkið, soleiðis at hesir fangar fáa nøktandi hjálp, tá ið teir verða leyslatnir úr donskum fongslum. Hetta er besta trygdin fyri at teir ikki fremja brotsverk framyvir. Kriminalforsorgin í Føroyum hevur longu gott samstarv við Almannaverkið og við ymiskar felagsskapir um fangar, sum verða leyslatnir í Føroyum.
- Føroyskir fangar eiga at fáa møguleika fyri alternativa siting í seinasta parti av revsingini á sama hátt sum danskir fangar. Hetta kann t.d. vera í vistarhaldi uttan fyri fongslið, har til ber at hjálpa fanganum út aftur í samfelagið og geva betri fyritreytir fyri at finna seg til rættis og fáa eitt kriminalitetsfrítt lív. Í uppskotinum til revsifulnaðarlóg fyri Føroyar er heimild fyri slíkari skipan.

Nógv brotsverk í Føroyum hava samband við rúsevnismisnýtslu. Tá ið føroyskir fangar sita dóm í Danmark, økist møguleikin fyri, at nakrir teirra fáa sambond við bólkar, sum hava áhuga í at selja rúsevni til Føroyar. Hetta kann samstundis vera viðvirkandi til, at kriminella umhvørvið verður harðari og meiri skipað í Føroyum.

Á hesum grundarlagi verður mælt til, at arbeitt verður víðari við at fáa nýtt fongsul í Føroyum, soleiðis at føroyingar, sum avgerandi meginregla, kunnu sita revsing í Føroyum óansæð longdina á fongsulsrevsingini.

Mælt verður eisini til, at arbeitt verður víðari við ymsum øðrum møguleikum, sum kunnu koma í staðin fyri vanligan fongsulsdóm. Her verður serliga hugsað um møguleika fyri viðgerðardómi og møguleika fyri at sleppa í rúsviðgerð við stuttum skotbrái, tá ið motivatiónin er har. Eisini verður hugsað um ymsa viðgerð og venjing í vreiðishandfaring, impulsstýring, hugsavnan umframt størri frælsi undir eftirliti í.s.v. t.d. útbúgving og førleikamenning. Tilboð eigur at vera um at skipa seinasta partin av revsingini á ein hátt, sum kann hjálpa fanganum útaftur í samfelagið, eitt sokallað ávegishús.

Mælt verður til at styrkja samstørvini millum Kriminalforsorgina (í Føroyum og serliga Danmark) og føroyskar myndugleikar og stovnar. Hetta soleiðis at føroyskir fangar bæði í Føroyum og Danmark kunnu fáa hóskandi tilboð um viðgerð, útbúgving og arbeiði. Men eisini so, at føroyskir fangar, sum verða leyslatnir í Danmark, verða loftaðir og fáa røttu tilboðini, sum kunnu hjálpa teimum at gerast virknir borgarar.

# Kapittul 10: Vitanargrundarlag – hagtøl, kanningar,skráseting og gransking

Ein fyritreyt fyri vitan um eitt øki er m.a., at dygdargóð hagtøl eru til taks og granskingargrundaðar kanningar eru gjørdar. Vitan um økið er ein fyritreyt fyri at kunna lýsa støðuna, tær avbjóðingar, sum standa fyri framman, kunna leggja til rættis og fremja fyribyrgjandi tiltøk í verki. Henda vitan umframt kanningar og hagtøl er eisini neyðug fyri at kunna eftirmeta virknaðin av tiltøkunum, lýsa gongdina yvir tíð og samanbera við onnur lond. Kanningar og hagtøl eru somuleiðis ein fyritreyt fyri at fáa vitan um medisinsku, sosialu og samfelagsligu avleiðingarnar av rúsevnismisnýtsluni. Finst eitt slíkt vitanargrundarlag ikki, er tað sum at stýra í blindum. Tá tað snýr seg um rúsevnisøkið í Føroyum finnast bert fá hagtøl og kanningar. Fáu kanningarnar og veika hagtalsgrundarlagið hava við sær ta óhepnu avleiðing, at vitanargrundarlagið um rúsevnisøkið sum heild er sera avmarkað. Hoyringarpartarnir hava eisini nevnt henda trupulleika.

Trotið á føroyskum hagtølum hevur við sær, at donsk hagtøl ofta verða nýtt, tá viðurskifti í Føroyum verða umrødd. Men av tí, at viðurskiftini í londunum báðum í mongum førum eru ógvuliga ymisk, kann tað geva eina misvísandi mynd av støðuni í Føroyum um donsk hagtøl verða nýtt. Sum dømi um hetta kunnu nevnast mongu ESPAD kanningarnar (European School Survey Project on Alcohol and Other Drugs)[38], sum eru gjørdar seinnu árini. Í hesum kanningum síggjast hagtøl úr Føroyum og Danmark umframt eini røð av øðrum londum. Um Føroyar ikki vóru við í hesum kanningum, og donsk hagtøl vóru nýtt at meta um støðuna í Føroyum, so hevði hetta í fleiri førum víst eina skeiva mynd av støðuni í Føroyum. ESPAD kanningarnar eru eitt gott dømi um, hvussu týdningarmikið tað er at hava føroysk hagtøl, tá talan er um føroysk viðurskifti.

Tað er ikki bert innan rúsevnisøkið, at tað er trot á hagtølum. Mongu álitini seinastu árini, granskarar og onnur hava víst á vantandi hagtøl á teirra økið umframt tørvin og týdningin á munadyggum hagtølum. Málið um vantandi hagtøl er seinast viðgjørt í Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum 2022–2028 (Heilsumálaráðið, 2021). Sum ein avleiðing av hesum verður tí í ætlanini um Fólkaheilsustýrið mælt til, "… at Fólkaheilsustýrið fær til uppgávu at skipa hagtøl á heilsuøkinum, gera lýsingar og greiningar av heilsustøðuni hjá íbúgvum í Føroyum; at gera, viðgera og menna hagtøl innan heilsuøkið."

Eitt av virkisøkjunum hjá komandi Fólkaheilsustýrinum er at standa á odda fyri at savna vitan um heilsu og trivna. Arbeiðsbólkurin heldur tí, at uppgávurnar við hagtølum og granskingargrundaðum kanningum samsvara væl við virkisøkið hjá Fólkaheilsustýrinum, og tí eiga hesar uppgávurnar at verða lagdar til Fólkaheilsustýrið, sum verður sett á stovn í 2022.

Tað eigur at vera ein uppgáva hjá Fólkaheilsustýrinum at savna og skipa tey hagtøl, sum longu finnast á rúsevnisøkinum, og gera neyðugar kanningar, sum lýsa viðurskifti við atliti til rúsevnisøkið. Hagtølini skulu skipast á ein slíkan hátt, at tað ber til at fylgja gongdini á økinum og samanbera hana við gongdina í øðrum londum. Slíkt hagtalsligt grundarlag kann fáast til vega við at gera somu kanningar í Føroyum, sum gjørdar verða í øðrum londum, og kann eisini brúkast til íblástur, í sam-

---

[38] ESPAD kanningin er ein altjóða spurnarkanning, sum verður gjørd 4. hvørt ár millum næmingar í 9. flokki. Spurnarkanningin hevur verið gjørd síðani 1994. Á vári 2019 varð ESPAD kanningin gjørd í 35 evropeiskum londum.

bandi við kanningar um føroysk viðurskifti. Vitan um rúsevnisøkið og tey viðurskifti, sum ávirka hetta økið, eru neyðug fyri at skilja verandi støðu umframt brúka sum grundarlag undir møguligum politiskum avgerðum á økinum.

Fólkaheilsustýrið eigur at standa fyri at gera kanningar við jøvnum millumbilum, so møguligar broytingar í støðuni kunnu staðfestast og tulkast, og møgulig átøk setast í verk. Serliga umráðandi eru kanningarnar fyri at kunna meta um, hvørt framd átøk hava nakra broyting við sær, og um tey røkka ætlaðu málunum. Eisini eru kanningarnar týðandi fyri at kunna staðfesta óheppin lyndi (tendensir) í nýtslumynstrum og harvið kunna gera inntriv skjótt og miðvíst.

## Skráseting

Grundarlagið undir øllum eftirfarandi hagtølum eru neyvar og álítandi skrásetingar. Tað er soleiðis umráðandi, at eingin ivi er um, hvat tað er, sum verður skrásett, nær og undir hvørjum umstøðum.

### Avbjóðingar í sambandi við skráseting

Ein trupulleiki, tá skrásetingar skulu gerast um til hagtøl, er, at sama skráseting kann koma fyri fleiri staðni og soleiðis skeikla myndina, sum hagtølini skulu vísa. Um ætlanin t.d. er at gera hagtøl um, hvussu nógvir einstaklingar hava fingið viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu í einum ári, so er týðandi, at hvør einstakur persónur bert verður taldur við einaferð. Her kann ein trupulleiki verða, at sami persónur er skrásettur fleiri ferðir í sama ári og kanska á fleiri ymiskum viðgerðarstøðum; um hvør skráseting í hagtølunum verður tald sum ein nýggjur einstaklingur, førir hetta við sær, at hagtølini fyri, hvussu nógvir einstaklingar hava fingið viðgerð í einum ári, verður ov høgt.

Ein máti at fyribyrgja nevnda trupulleika er at eyðmerkja hvønn einstakling sær, t.d. við p-talinum, og so bara hyggja at, hvussu nógv einstøk p-tøl eru skrásett í árinum. Í hvussu so er tveir trupulleikar knýta seg afturat hesum háttalagnum. Fyri tað fyrsta er vitanin um, at ein persónur hevur ella hevur havt rúsevnistrupulleikar, roknað sum serliga viðkvom, og eigur tí at vera handfarin við størsta varsemi og undir strangari tagnarskyldu.

Í øðrum lagi kann tað møguliga gerast ein forðan fyri, at fólk leita sær hjálp fyri rúsevnismisnýtslu, um tey vita, at tey skulu lata eyðmerkiligar upplýsingar um seg sjálvan og sína misnýtslu til ein sentralan datagrunn.

Arbeiðsbólkurin heldur, at farið eigur at verða undir at viðgera spurningin, hvussu trupulleikin kann loysast, soleiðis at tað bæði ber til at fáa eftirfarandi hagtøl og varðveita trúnaðin og harvið álitið hjá borgaranum á skipanina.

### Passiv skráseting

Tað finnast tvinni sløg av skráseting. Annað slagið er tann skrásetingin, sum fer fram, tá borgarin kemur í samband við myndugleikar ella viðgerðarstøð. Her kann talan vera um kommunulækna, skaðastovu, sjúkrahúsdeild, privat viðgerðarstað, løgreglu, barnavernd ella aðrar sosialar myndugleikar. Hvørt samband verður skrásett, og einstaki myndugleikin ella viðgerðarstaðið kann

síðani gera hagtøl yvir sítt virksemi. T.d. kann barnaverndin gera hagtøl fyri, hvussu ofta rúsevnismisnýtsla var orsøk til eitt barnaverndarmál eitt ávíst ár, ella løgreglan kann gera hagtøl yvir, hvussu nógvar handtøkur í einum ávísum ári vóru grundaðar á rúsevnistengdar orsøkir. Hetta slagið av skráseting verður nevnt passiv skráseting. Trupulleikin við hesum er, at hon, sum útgangsstøði, ikki kann brúkast til at siga nakað um ítøkiligu støðuna í samfelagnum, og hesi hagtøl siga bara, hvat er skrásett, og mugu tí tulkast. Annar trupulleiki við passivari skráseting er, at ikki øll, sum t.d. fremja harðskap, meðan tey eru rúsevnisávirkað, koma í samband við løgregluna. Hesir tilburðir, sum ikki vera skrásettir, men sum við stórari vissu koma fyri, verða nevndir skuggatøl.

## Aktiv skráseting

Er ynskiligt at vita meira um skuggatølini, er ikki nóg mikið at dúva uppá passiva skráseting. Tá er neyðugt við aktivari skráseting, har farið verður út í samfelagið at tosa við fólk og spyrja tey, hvat tey vita um støðuna hjá sær sjálvum og øðrum. Út frá hesum ber til at gera eina meira eftirfarandi meting av, hvussu støðan er, hóast talan er um viðurskifti, sum ikki høvdu verið passivt skrásett.

## Fíggjarligar avleiðingar

Stóra trotið á hagtølum á rúsevnisøkinum hevur við sær, at tørvur verður á bæði starvsfólkaorku og fíggjarligari orku til at útvega, skipa og viðgera hagtøl á hesum øki. Tað er trupult at meta um, hvør kostnaðurin verður av hesum.

Kostnaðurin av hesum má tó haldast upp í móti avleiðingunum av, at slík hagtøl ikki finnast. Tí uttan hagtøl og kanningar ber ikki til at siga, hvønn virknað og hvørjar avleiðingar fyriskipanir og tiltøk hava ella, um tey eru fíggjarliga skynsom.

**Tilmæli 56**
**Betri vitanargrundarlag**

- Endamálið við átakinum er at fáa betri vitanargrundarlag til vega. Mælt verður til, at uppgávurnar viðvíkjandi hagtølum, skráseting og kanningum verður løgd til komandi Fólkaheilsustýrið.
- Mettur kostnaður: Tað er trupult at meta um, hvør kostnaðurin verður. Í longdini kann talan bæði vera um øktan játtanartørv ella sparingar/effektiviseringar.
- Ábyrgdari: Fólkaheilsustýrinum.
- Tíðarætlan: Mælt verður til, at farið verður undir hetta arbeiðið í 2025.

## Gransking

Heildarætlanin leggur sum áður nevnt høvuðsdentin á fyribyrging í øllum liðum. Víst hevur eisini verið á, at rúsevnismisnýtsla hongur tætt saman við mistrivnaði, happing, sálarliga óheilsu og umsorganarsvik.

Tað eru sostatt fjøltáttaðar, torgreiddar og víðfevndar orsøkir til, at summi ung velja at rúsa seg við m.a. rúsevnum. Av somu orsøk er eisini tørvur á fjøltáttaðum átøkum til tess at kunna loysa ella minka um hesar trupulleikar.

Kanningar í eitt nú Noregi vísa á, at virknaðurin av tílíkum átøkum, hongur neyvt saman við, hvør trupulleikin er, ið skal loysast, og høpið (kontekst), sum trupulleikin skal loysast í. Um vit skulu finna bestu loysnina til samansettar og torgreiddar trupulleikar, so er neyðugt at granska í, hvørji átøk rigga best í tí høpi, har tey vera sett í verk, og hvørjar trupulleikar, átakið er ætlað at loysa.

Yvirhøvur kundu vit havt meira gransking á hesum økinum í Føroyum, og staðfestast má, at um vit skulu finna góðar og munadyggar loysnir, sum hóska í okkara samfelag, so er neyðugt, at størri dentur verður lagdur á gransking á hesum øki.

Arbeiðsbólkurin mælir tí meira alment til, at størri dentur verður lagdur á gransking og at fígging verður settur av til tílíka gransking, so vit í størri mun kunnu tryggja, at okkara avgerðir, tilboð og viðgerð er granskingargrundað og í tráð við veruligu úrslitini.

### Granskingarverkætlan um leiklutin hjá myndugleikum í málum viðvíkjandi ungum, við samansettum og víðfevndum trupulleikum

Í teimum førum har fleiri myndugleikar umframt barnavernd eru í málum um børn og ung við víðfevndum trupulleikum, er vandin stórur fyri, at málini kunnu fara av sporinum, og at feilir vera gjørdir. Um tílík mál í størri mun vórðu eftirmett, hevði verið lættari at sæð ítøkiliga, hvat kundi verið gjørt øðrvísi, og hvussu hjálpin hevði kunna gjørt størri mun.

Onkur hoyringarpartur hevur nevnt, at tað er lætt at finna fleiri mál, sum eru farin av sporinum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at áleið 10 tílík mál verða vald út og eftirmett. Samstundis kundu hesi mál verið samanborin við mál, sum mett verður at vera væl úr hondum greidd. Tað hevur týdning, at mett verður um, hvørjar trupulleikar ætlanin var at loysa við átøkunum, sum vóru sett í verk, og at samanhangurin, sum tey vóru sett í verk í, eisini verður viðgjørdur. Mælt verður til, at eftirmetingin verður framd sum ein granskingarætlan, sum Almannamálaráðið hevur ábyrgdina fyri – møguliga saman við Fróðskaparsetri Føroya.

Til ber at søkja um stuðul til tílíkar verkætlanir frá m.a. Norðurlendska Samstarvsráðnum fyri Kriminologi (Nordic Research Council for Criminology NSfK), sum letur stuðul eina ferð árliga til norðurlendskar granskingarverkætlarnir, sum kunnu vera áhugaverdar í brotsfrøðiligum samanhangi. Stuðul kann m.a. verða latin til at gjalda løn til granskaran, sum hevur ábyrgd av verkætlanini og til aðrar starvsfólkaútreiðslur í sambandi við verkætlanina. Stuðulin kann eisini fáast til at rinda útreiðslurnar til at fáa granskingartilfar til vega og viðgera tað umframt til týðing av tilfari.

**Tilmæli 57**
**Fremja granskingarverkætlan at kanna feilir í viðgerð av málum, har fleiri myndugleikar umframt barnavernd hava havt ein leiklut. Hetta fyri at kunna betra um mannagongdir og fyribyrgja feilum**

- Endamálið við átakinum er at kanna, hvørjir feilir verða gjørdir í truplum málum um børn og ung, hvussu feilir kunnu fyribyrgjast, hvat riggar í hvørjum einstøkum føri, og hvussu vit best hjálpa børnum og ungum við víðfevndum trupulleikum.
- Mettur kostnaður: Væntað verður, at stuðul fæst til flestu útreiðslurnar frá granskingar-grunnum.
- Ábyrgdari: Fróðskaparsetrið, UMMR og AMR.
- Tíðarætlan: Arbeiðssetningur fyri granskingarætlanina verður orðaður í seinasta lagi í juni 2022. Síðan verður granskari settur, og tíðar- og kostnaðarætlan gjørd. Søkjast má um stuðul frá NSfK, áðrenn verkætlanin kann fara í gongd. Umsóknarfreistin í 2021 var 26. november, so arbeiðast má fram ímóti, at umsóknin er klár áleið 1. oktober 2022, fyri at hon kann fara í gongd í 2023.

## Dátugrunnur um trivnað og menning

Barnabati skrásetir allar áheitanir til 116 111[39] (Tú og Eg ráðgevingin) á slíkan hátt, at dáturnar kunnu brúkast í granskingarhøpi. Endamálið er millum annað, at vitanin, sum verður varðveitt eftir samrøður við børn og ung, gevur eina so umboðandi mynd av støðuni, trivnaðinum og avbjóðingum sum møguligt.

Slíkar mannagongdir verða eisini nýttar í okkara grannalondum í sambandi við ráðgeving umvegis 116111. Sostatt eru dáturnar sambærligar í møguligum granskingarhøpi.

Tað serstaka við innsavnaðu vitanini er, at hon umboðar sjónarmið, trivnað, kor og menning hjá føroyskum børnum og ungum. Dáturnar, sum verða goymdar verða anonymiseraðar og skrásettar í trá við Dátuverndarlógina.

Barnabati nýtir ICDP[40] tilgongdin í sínum arbeiði og ráðgeving. ICDP kann nýtast til at gerast varugur við virkistarn og mistrivna hjá børnum og ungum og til at styrkja foreldraførleikan.

Barnabati ætlar at fáa fígging til hetta øki úr ymsum grunnum, sum stuðla gransking.

Arbeiðsbólkurin metir, at føroyska samfelagið hevði fingið tilgongd til virðismikla vitan, um ein tílíkur dátugrunnur varð mentur og mælir til at fígging verður fingin til vega til starvsfólkakostnaðin at røkja hagtalsliga arbeiðið og at stuðla og vegleiða granskarum, sum brúka dátugrunnin.

[39] Skrásetingin fer fram í trá við Dátuverndarlógina
[40] International Child Development Programme

**Tilmæli 58**
**Menning og víðlíkahald av dátugrunn, sum kann nýtast til vísindaliga gransking av trivnaði, umstøðum, korum og menning hjá føroyskum børnum og ungum**

- Endamálið við átakinum er, at gera vitan um trivnað, umstøður, kor og menning hjá føroyskum børnum og ungum atkomuliga, so møguligt er at granska í hesum.
- Mettur kostnaður: Verkætlanin verður fíggjað við stuðli úr grunnum. Mælt verður til, at stuðulsjáttanin til Barnabata á fíggjarlógini verður tillagað, so peningur er til at reka dátugrunnin og umsita hagtalsarbeiðið.
- Ábyrgdari: AMR.
- Tíðarætlan: Arbeiðsbólkurin mælir til, at fígging verður játtað í 2023 og framyvir.

# Kapittul 11: Niðurstøða, íverksetan og eftirmeting

## Niðurstøða

Í heildarætlanini kemur arbeiðsbólkurin við 58 tilmælum um átøk á hesum átaksøkjum:

- Fyribyrging
- Viðgerð og eftirviðgerð
- Eftirlit
- Revsifulnaður
- Vitanargrundarlag – hagtøl, kanningar, skráseting og gransking

Tilmælini eru í størstan mun úrslit av tí, sum arbeiðsbólkurin hevur fingið at vita í samskifti og samrøðu við áleið 75 ymiskir hoyringarpartar.

Nøkur evni hava verið afturvendandi á nógvum hoyringarfundum. Men so at siga allir hoyringarpartar hava lagt dent á trivnað og sunnar felagsskapir. Fleiri hoyringarpartar greiddu frá, at eitt barn ið trívist og er partur av einum sunnum felagsskapi, er í nógv minni vanda fyri at fara at misnýta rúsevni.

Tí er alneyðugt at hava amboð og arbeiðshættir, sum gera okkum betur før fyri at varnast mistrivnað tíðliga. Tað er somuleiðis týdningarmikið, at fakbólkar skilja hvønn annan og kunnu samskifta tvørtur um fakmørk, um vit skulu finna røttu loysnirnar í hvørjum einstøkum føri.

Arbeiðsbólkurin mælir í tilmælum sínum til at hugsa fyribyrging breitt og í øllum liðum. Við hesum verður dentur lagdur á at seta inn tíðliga. Arbeiðsbólkurin heldur, at tað hevur stóran týdning, at vit gera okkum greitt, hvat fyribyrging er, og hugsa fyribyrging rætt. Tað munar ov lítið, um vit einans hugsa um fyribyrging, tá skaðin er hendur. Fyri veruliga at fyribyrgja, mugu vit duga at varnast trupulleikar so tíðliga, sum møguligt – og enntá arbeiða við møguligum trupulleikum, áðrenn teir gerast sjónligir, so vit eru fyrireikað. Tí leggur arbeiðsbólkurin í sínum tilmælum stóran dent á trivnað, barna- og ungdómsarbeiði og fólkaskúlan.

Í sambandi við arbeiðið við heildarætlanini er arbeiðsbólkurin vorðin varugur við, at vit hava nógvar skipanir og nógv tilboð í Føroyum, sum eru ætlað at hjálpa børnum, ungum og familjum teirra, tá ið á stendur. Onkur hoyringarpartur nevndi, at øll vilja veita hjálp, men ov lítil samanhangur er í, og samstarvið ímillum ymsu tilboðini og skipanirnar er ikki nóg gott. Fleiri hoyringarpartar hava eisini víst á, at ov lítið samstarv er tvørtur um geirar og fakmørk við tí úrsliti, at nógv detta ímillum skipanir ella bíða alt ov leingi eftir at fáa eitt tilboð um hjálp. Hugsað verður ov nógv í brotum, heldur enn í samanhangum. Um føroyska samfelagið skal tryggja sær, at børn og ung fáa røttu hjálpina rættstundis, mugu vit duga betur at seta menniskjað í miðdepilin og hugsa heildarloysnir. Tilgongdin má vera meira holistisk.

Heildarætlanin hevur tí fleiri tilmæli um samstarv tvørtur um geirar og fakmørk, um at endurskoða ymiskar skipanir, umframt tilmæli um at menna førleikar, arbeiðshættir og amboð til m.a. at varnast

mistrivnað tíðliga og gransking av leiklutinum hjá myndugleikum í málum viðvíkjandi ungum við samansettum og víðfevndum trupulleikum.

Yvirhøvur vónar arbeiðsbólkurin, at tilmælini um at endurskoða verandi skipanir og tilmælini um størri fokus á samstarv tvørtur um geirar verða høgt raðfest. Nógvir hoyringarpartar hava við dømum greitt frá um børn og ung, sum eru dottin ímillum skipanir og ikki hava fingið ta hjálp teimum tørvar. Nógv hevur eisini verið skrivað í miðlunum um langar bíðitíðir fyri at vera útgreinaður fyri menningarórógv ella sálarsjúku, og tørvandi hjálp aftaná. Hetta er ein trupulleiki, sum flestu hoyringarpartar eru samdir um, er alneyðugt at fáa loyst beinanvegin. Føroyska samfelagið kann ikki góðtaka, at børn og ung ikki fáa nøktandi hjálp. Arbeiðsbólkurin metir, at samstarv tvørtur um geirar kann verða ein týðandi partur av loysnini.

Heildarætlanin hevur eisini fleiri tilmæli, sum stuðla undir møguleikan hjá børnum og ungum at luttaka í sunnum felagsskapum. Júst hetta at luttaka í sunnum felagsskapum, gevur børnum og ungum styrki og mótstøðuføri. Hetta vísa fleiri hoyringarpartar á, og gransking stuðlar eisini undir hetta.

Eitt annað øki, sum arbeiðsbólkurin heldur er týdningarmikið at raðfesta høgt, er, at veita persónum við rústrupulleikum dygdargóð tilboð um viðgerð og eftirviðgerð. Tørvurin veksur støðugt, og tí er neyðugt at uppraðfesta hetta økið. Hetta er eitt av teimum fáu økjunum, har arbeiðsbólkurin mælir til nýggjar skipanir. Ung, sum misnýta rúsevni, hava ofta samansettar, djúptøknar og torgreiddar trupulleikar, sum verandi skipanir hava tungt við at lofta. Hetta er orsøkin til, at arbeiðsbólkurin mælir til eitt tilhaldsstað fyri ung við rúsmisnýtslu, eitt viðgerðarstað burturfrá til tey við tyngstu trupulleikunum og eitt ávegishús (halfway house) at hjálpa teimum at fáa nýggj netverk og at fóta sær aftur eftir avrúsingina.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki so nógv tilmæli, sum eru ætlað at minka um nøgdina av rúsevnum í Føroyum. Tey tilmæli, sum eru um hetta, snúgva seg um at geva TAKS betri amboð og umstøður til at finna rúsevni. Politiið og føroyskir brotsfrøðingar meta t.d. ikki, at harðari revsing fer at hava við sær, at nøgdin av rúsevnum minkar, og at steðga innflutninginum fullkomuliga ber neyvan til. Heldur leggja tey dent á týdningin at minka um eftirspurningin við at fyribyrgja og rehabilitera. Hetta meta tey er best gongda leið, tí um eftirspurningurin minkar, so hevur tað ávirkan á útboð og innflutning.

Ein av stóru avbjóðingunum í arbeiðinum at orða hesa heildarætlan eru vantandi hagtøl og kanningar um økið. Vitan um økið er neyðug fyri at kunna lýsa ávikavist verandi støðu og tær avbjóðingar, sum standa fyri framman, eins og fyri at kunna leggja til rættis og fremja fyribyrgjandi tiltøk. Harumframt er týdningarmikið við hagtølum, og at vísindaligar eftirmetingar av átøkum og viðgerðartilboðum verða settar í verk. Við støði í hesum mælir arbeiðsbólkurin til, at størri dentur verður lagdur á hagtals- og granskingararbeiði og á fleiri kanningar og eftirmetingar. Tí um vit ikki vita, um tað, vit gera, gevur úrslit, so vita vit heldur ikki, um vit brúka okkara avmarkaða tilfeingi rætt.

---

*Um vit ikki savna hagtøl og viðgera tey, um vit ikki gera kanningar og greina tær, um vit ikki eftirmeta, hvussu okkara tilboð og átøk muna – so arbeiða og stýra vit í blindum.*

---

## Íverksetan og eftirmeting

Tað er neyðugt at hava ein leist fyri, hvussu heildarætlanin skal setast í verk. Heildarætlanin viðger eitt ógvuliga álvarsligt og týðandi øki, sum kann hava stórar persónligar og samfelagsligar avleiðingar. Økið hevur hægstu politisku raðfesting, og tí metir arbeiðsbólkurin, at ein ætlan eigur at gerast fyri, hvussu tilmælini kunnu setast í verk, og hvussu forðingar fáast av vegnum ávegis.

Í heildarætlanini hevur verið roynt at víst á, at um hond ikki verður tikin um trivnaðin hjá barninum og tí unga, so er vandi fyri, at hetta kann føra til nógvar avbjóðingar og trupulleikar seinni í lívinum – og rúsevnistrupulleikar gerast tá meiri sannlíkir. Tað er sera týdningarmikið at seta tíðliga inn, tí gongur ov long tíð, so vísir gransking, at tað verður ringt at fáa tann unga aftur á beint, so hann fær eitt virkið og gott vaksnamannalív.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at ein skipan verður gjørd fyri, hvussu heildarætlanin verður sett í verk og framd.

Mælt verður til, at Løgmansskrivstovan hevur samskipandi leiklutin og eftirlit við, at heildarætlanin verður framd í tráð við politiska viljan, hesi tilmæli og tíðarætlanina.

Løgmaður og avvarðandi landsstýrisfólk hava høvuðsábyrgd av, at tilmælini verða sett verk. Mælt verður til at seta ein stýrisbólk, sum hittist í minsta lagi tvær ferðir árliga fyri at gera eina ætlan fyri arbeiðið, millum annað um hvussu tilmælini verða framd, og at fylgja við gongdini. Løgmansstjórin og avvarðandi aðalstjórar eiga at vera í hesum stýrisbólki.

Mælt verður til at seta ein verkbólk, sum er mannaður við umboðum fyri tey fýra avvarðandi stjórnarráðini. Verkbólkurin fær so ábyrgd av, at tilmælini verða sett í verk í samsvari við avgerðirnar hjá stýrisbólkinum, ger avtalur við partarnar og tryggjar, at neyðuga fíggingin er fingin til vega. Í hesum liggur eisini, at bólkurin lýsir og metir um snávingarsteinar og avbjóðingar og hvussu tryggjast kann, at tilmælini kunnu setast í verk. Bólkurin skal eisini tryggja tvørgeiraliga samstarvið og fyrireika frágreiðingar til fundirnar hjá stýrisbólkinum.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at heildarætlanin verður eftirmett, tá ið 4 ár eru liðin (í 2026). Tí fer arbeiðsbólkurin í næstum at lata løgmanni eitt skjal, sum kann nýtast í sambandi við eftirmetingararbeiðið. Eftirmetingarskjalið fer m.a. at lýsa nakrar varðar og ætlað úrslit, og hvussu tey kunnu mátast.

Tórshavn hin 18. mars 2022

Gudrun Mortansdóttir Nolsøe
Løgmansskrivstovan

Jenny Lydersen
Uttanríkis- og mentamálaráðið

Katrin Gaard
Heilsumálaráðið

Barbara Álvsdóttir Thomsen
Almannamálaráðið

Leivur Langgaard
Løgmansskrivstovan

# Bókmentalisti


ADHD – felagið. *Hvat er ADHD.* Tikið niður 7. mars 2022 frá https://adhd.fo/hvat-er-adhd/

ADHD – foreningen. *Skoleliv med ADHD.* Tikið niður 7. mars 2022 frá https://adhd.dk/livet-med-adhd/skoleliv-med-adhd/

ADHD – foreningen. *Efterskoleophold når den unge har ADHD.* Tikið niður 7. mars 2022 frá https://adhd.dk/livet-med-adhd/skole-og-uddannelse/efterskoleophold/

Almannamálaráðið. (2018). *Átak: "Megna títt lív" - Tilmæli um tilboð til ung við víðfevndum sálarligum ella sosialum trupulleikum og álvarsligum trupulleikum av rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu.*

Almannamálaráðið, Mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið, Autismufelagið. *Tann góða tilgongdin hjá foreldrum at børnum við autismu – vegleiðing til foreldur.*

Almannamálaráðið, Mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Kommunufelagið, Autismufelagið. (2014). *Tilmæli um at skipa eina góða tilgongd hjá familjum við barni við autismu.*

Almannamálaráðið. (2011, feb). *Endurskoðan av barnverndarlógini.*

Anvik C.H. & Waldahl R.H. (2016, mars). *Når noen må ta regien - Om unge med psykiske helseproblemer:utfordringer, tiltak og samhandling på Island, Færøyene og i Norge.* Nordlandsforskning/Unga in i Norden/Norden

Blå Kors barnas stasjon. *Helhetlig støtte til familier.* Tikið niður 7. mars 2022 frá https://www.blakors.no/barnas-stasjon/

Ege, P. (2004) *Stofmisbrug og Afhængighed hos Unge og Voksne.* København: Hans Reitzels Forlag.

Fauske, H., Kvaran, I., Lichtwark, W. (2017). *Hjelpetiltak i barnevernet.* FONTENE forskning 2/2017 (s. 45-58)

Fólkaheilsuráðið. (2015) *Fólkaheilsukanningin: Hvussu hevur tú tað?*

Hansen, I.L.S., Jensen, R.S., Hansen, H.C. (2020:21). *Mind the gap, Nordic 0–24 collaboration on improved services to vulnerable children and young people, Final report from the process evaluation.* Fafo-report

Heilsumálaráðið (2021). *Ætlan fyri Fólkaheilsustýri í Føroyum 2022 – 2028.*

Heilsumálaráðið. (2015, juli) *Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur Føroya.*

Helsedirektoratet (2018, feb) *Kunnskapsgrunnlag – Metoder for tidlig identifisering av risiko hos barn og unge* (IS.NR-2696)

Joensen, A.D. (2016, nov). *Royndarverkætlanin TÍTT – Tiltøk í Tøkum Tíma – Ein støðulýsing á heysti. 2016* SSP

Joensen, C. & á Lakjuni, T (2021). *Sálarheilsukanning á miðnámsskúlum.*

Joensen, J.K. (2018, nov). *Kriminalitetur – eitt ungdómsfyribrigdi, Ein lýsing av ungdómskriminaliteti í Føroyum*

av Kák, K., Biskupstø, O., Olsen, E. (2019). *Happing í fólkaskúlanum – ein spurnakanning.* Fróðskaparsetur Føroya

Løgtingið. (2022, feb). *Svar uppá á § 52a fyrispurning nr. 52-131/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu um langar bíðitíð í barna- og ungdómspsykiatriini til Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismanni í heilsumálum.*

Løgtingið. (2021, mars). *Svar upp á §52a fyrispurning nr. 52-113/2020 frá Rósu Samuelsen, løgtingskvinnu, um hjálp til børn og ung við psykiatriskum diagnosum til Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.*

Miðskarð, J. (2021, 21. apríl). *Mínir kæru landsmenn: Latum okkum taka okkum saman í stundini!* Lesarin.fo

Plesner, M. (2020). *Behovet for tværprofessionelt samarbejde og helhedssyn er blevet tydeligere.* EMU.dk

Plesner, M. (2020). *Barnets Stemme er kommet for at blive* EMU.dk

Plesner, M. (2020). *Her er børnene selv med til at finde løsninger* EMU.dk

PSP: Et tværsektorielt samarbejde mellem politi, sociale myndigheder og psykiatri – inspiration til organiseringen. Tikið niður frá: https://dkr.dk/media/7060/psp_pjece.pdf

Samuelsen, R. (2021, 19. apríl). *Ein heildarloysn má finnast til børn og ung við psykiatriskum diagnosum* in.fo

Scottish Government (2022). *Getting it right for every child (GIRFEC), principles and values* Tikið niður 6. mars 2022 frá: https://www.gov.scot/policies/girfec/principles-and-values/

Socialstyrelsen, https://socialstyrelsen.dk/unge/eftervaern

Toftegaard, A. (2021 juni/juli) *Fólkaskúlin er fyri øll - eitt neyðarróp frá børnum við serligum tørvi* (greinarøð í 3 pørtum) Norðlýsi (nordlysi.fo)

Uttanríkis- og mentamálaráðið. (2021, nov). *Ung við sálarligum og/ella sosialum avbjóðingum og útbúgving*

Vága Kommuna. (2021). *Betri og størri ungdómskonsept – Tilmæli um Børn og Ung í Vága kommunu*

Zophoniasson, B. (2018). *Lof mér að falla (Lad mig falde)* (Filmur)

# Fylgiskjøl

- Fylgiskjal 1: Sálarheilsukanning á miðnámsskúlum í desember 2020 og 2021, Joensen, C. og á Lakjuni, T.

- Fylgiskjal 2: Arbeiðsorkan hjá Sernám býtt uppá arbeiðsbólkar

- Fylgiskjal 3: Lógargrundarlag fyri Lopfjølina

# Fylgiskjal 1: Sálarheilsukanning á miðnámsskúlum (Joensen C. & á Lakjuni T. 2021)

Í desember 2020 og januar 2021 gjørdu Christian Joensen og Terji á Lakjuni eina kanning millum næmingar á størstu miðnámsskúlunum. Í hesum skjalið kallað 2021-kanningin. Í fyrsta umfari var ætlanin at fáa úrslit, sum kundu samanberast við sálarheilsukanning hjá Skaale, S.O. & Davidsen, A.H. (2017). Men kanningin varð víðkað til eisini at fevna um likamsheilsu, skermnýtslu, rúsdrekka og rúsevnir.

Tilsamans 1316 næmingar luttóku í 2021-kanningini, svarandi til 66% av næmingunum á Glasi, Kambsdali og Tekniska Skúla í Klaksvík. Til samanberingar kann nevnast at 1295 næmingar luttóku í 2017-kanningini.

Sálarheilsutalið hjá miðnámsnæmingum er lækkað frá 2017 til 2021.

Sálarheilsutalið korrelerar við variablarnar kyn, íðkan og svøvn. Aðrar korrelatiónir eru eisini møguligar, men óvissan er so stór, at tað kann ikki sigast við vissu. T.d. er ábendingar um at tey, sum hava nýtt rúsevni innanfyri seinasta ½ árið, hava eina lutfalsliga ringa sálarheilsu.

Kanningin vísir m.a. at 26% av næmingunum hava roynt rúsevnir, nýtslan er størst hjá teimum 18 og 19 ára gomlu.

310 næmingar upplýsa hvat slag tey hava roynt. 61% av teimum, nevna bert hash, kannabis ella marihuana. 29% hava eisini roynt onnur rúsevnir.

Kanningin er ikki endurtikin, tí ber illa til at staðfesta nakra broyting. Tó er gjørd ein roynd, við at spyrja um aldur við fyrsta rúsevnisrús. Kanningin kann ikki staðfesta ein vøkstur í seinastuni.

# 1. Broytingar frá 2017 til 2021

Sálarheilsa hjá Miðnámsnæmingum er minkað við 3,9 stigum. Tað eru serliga genturnar sum fáa lægri sálarheilsutal, talið minkar við 4,8 stigum, í meðan talið hjá dreingjunum minkar við 2,7 stigum. Tað kunnu vera nógvar ymiskar orsøkir til hendan mun. Ein munur í umstøðunum millum kanningarnar er korna.

2017 Skaale og Davidsen




Broytingar frá 2017 til 2021






# 2. Sálarheilsa í mun til ymiskar variablar

## Kyn og aldur

Sálarheilsan er tengd at kyni. Konufólk í øllum aldursbólkum fáa eitt lægri sálarheilsutal enn mann-fólkini.

Aldur hevur ikki týdning. Í fyrstu atløgu sá út til at samband var millum aldur og sálarheilsu, men tað vísir seg, at kynsbýtið er ein confounding faktor[41]. Ynsktu næmingarnir hava lutfalsliga fleiri konufólk enn elstu árgangirnir.




## Íðkan

Myndin niðanfyri vísir at o.u. 150 næmingar íðka 0 tímar um vikuna og o.u. 100 næmingar íkða 10 tímar um vikuna.




[41] Dømi: Hagfrøðiliga er ein korrelatión í millum drunkivanlukkur og sølu av ísi. Hetta merkir ikki at keyp av ísi økir um vandan at drukna, tí *árstíðin* er ein *confounding faktor*. Árstíðin er ein faktor, sum bæði ávirkar sølu av ísi og talið av druknivanlukkum.

Um sálarheilsutalið hjá øllum 1316 næmingarnir verður plottað í eina krossskipan, í mun til hvussu nógvar tímar um vikuna tey íðka, so gevur tað myndina niðanfyri. Besta linjan ígjøgnum punktini er y = 0,17x + 44, har $R^2$ = 5,0 %. Populertvísundaliga kann man siga, at tað er 5% samanhangur millum sálarheilsu og íðkan. Ella at íðkan er ein av 20 faktorum, sum ávirka sálarheilsuna.




Á myndini niðanfyri er tann forklárandi variabulin býttur í 5 líka stórar bólkar, og miðal sálarheilsa verður avmyndað fyri hvønn bólk. Her sæst ein greiður samanhangur millum íðkan og sálarheilsu.



**Svøvnur**

Um svøvnur fær somu viðgerð sum íðkan, sæst eisini ein samanhangur millum søvn og sálarheilsu.




**Rúsdrekka og sigarettir**

Vit kunnu ikki staðfesta eina eina korrelatión í millum sálarheilsutal og rúsdrekka ella sigarettir.

**Rúsevnir**

Talvan niðanfyri vísir hvat næmingar svaraðu til spurningin um hvussu langt tað er síðan teir royndu rúsevnir. Miðal sálarheilsa fyri bólkin er rokna út, umframt spjaðing og 95%-konfidensinterval.

Minsti bólkurin hevur bert 36 næmingar, tað gevur eina stóra óvissu. Miðal sálarheilsa hjá hesum bólki er 41,9 ± 4,2, sum er eitt tal millum 37,8 og 46,1.

| | **n** | **miðal sálarheilsa** | **spjaðing** | **95% konf. interval ±** |
|---|---|---|---|---|
| ikki roynt | 970 | 47,2 | 8,8 | 0,6 |
| meira enn ár | 182 | 47,8 | 9,9 | 1,4 |
| innan ár | 59 | 48,0 | 10,8 | 2,8 |
| innan ½ ár | 69 | 44,2 | 8,7 | 2,1 |
| innan vikuna | 36 | 41,9 | 12,7 | 4,2 |

Samanumtikið kunnu vit siga at talvan vísir eina ábending, men óvissan er stór


Sálarheilsa í mun til rúsevnisnýtslu
52
50
48
46
44
42
40
47,2
47,8
48,0
44,2
41,9
ikki roynt
meira enn ár
innan ár
innan ½ ár
innan vikuna
tíðaskeið síðan seinasta rús

# 3. Rúsevnir

**Spurningur 28: Hevur nakar nakrantíð bjóða tær rúsevni (stoffir)?**

“Ja”: 736 (56%) og “Nei”: 580 (44%). Býtt á aldursbólkar sóu svarini soleiðis út:




**Spurningur 29: Hevur tú nakrantíð nýtt rúsevni (stoffir)?**

Tilsamans 26% svaraðu “ja” til hendan spurningin. Býtt á aldursbólkar sóu svarini soleiðis út:

| | Ja | | Nei | |
|---|---|---|---|---|
| 16- | 4 | 5% | 77 | 95% |
| 17 | 47 | 15% | 272 | 85% |
| 18 | 107 | 28% | 276 | 72% |
| 19 | 66 | 27% | 176 | 73% |
| 20+ | 124 | 43% | 167 | 57% |
| | 348 | 26% | 968 | 74% |



**Spurningur 31: Nær varst tú seinast ávirkað/ávirkaður av rúsevnum (stoffum)?**

Býtt á aldursbólkar, sóu svarini soleiðis út:

| | 16 | 17 | 18 | 19 | 20 | n | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ikki svarað | 77 | 273 | 276 | 177 | 167 | 970 | 74% |
| Longri enn 1 ár síðani | 1 | 14 | 49 | 28 | 90 | 182 | 14% |
| Innan síðsta árið | 1 | 9 | 19 | 16 | 14 | 59 | 4% |
| Innan síðsta ½ árið | 1 | 15 | 24 | 13 | 16 | 69 | 5% |
| Innan síðstu vikuna | 1 | 8 | 15 | 8 | 4 | 36 | 3% |




Myndin omanfyri vísir, at 90 av teimum, sum eru 20+ eru steðga við at nýta rúsevnir. Myndin niðanfyri vísir hvussu nógv hava nýtt rúsevnir innan síðsta árið. Har sæst at nýtslan toppar við 18-19 ár fyri síðan at minkað aftur. Tó ber ikki til at siga um tey, sum nú eru 20 ár, høvdu eina størri nýtslu tá tey vóru 18 ár.




**Spurningur 30: Hvussu gamal/gomul var tú, tá tú fyrstu ferð royndi rúsevnir (stoffir)?**

Svarini frá hesum spurningi eru bólkað í aldursbólkarnar 16-, 17, 18, 19, 20+ og talt upp fyri ymisku aldrarnar.

| | 16 - | 17 | 18 | 19 | 20+ |
|---|---|---|---|---|---|
| 13 | | 2 | 1 | 3 | 2 |
| 14 | 1 | 2 | 4 | 1 | 4 |
| 15 | | 13 | 18 | 5 | 6 |
| 16 | 3 | 19 | 32 | 12 | 21 |
| 17 | | 12 | 43 | 19 | 23 |
| 18 | | | 10 | 22 | 25 |
| 19 | | | | 4 | 14 |
| 20+ | | | | | 13 |
| ikki svarað | 77 | 271 | 275 | 176 | 183 |

Svarini eru síðan gjørd upp í eitt kumulativt frekvensbýti

| | 16 - | 17 | 18 | 19 | 20+ |
|---|---|---|---|---|---|
| 13 | 0% | 1% | 0% | 1% | 1% |
| 14 | 1% | 1% | 1% | 2% | 2% |
| 15 | 1% | 5% | 6% | 4% | 4% |
| 16 | 5% | 11% | 14% | 9% | 11% |
| 17 | | 15% | 26% | 17% | 19% |
| 18 | | | 28% | 26% | 28% |
| 19 | | | | 27% | 33% |
| 20+ | | | | | 37% |




Talið av svarum í hvøljum bólki er sera lítið, tí er óvissan stór. Tó er nakað sum bendir á, at gongdin fyri ymisku árgangirnar er eins.

Aldursbólkurin 16 ár hevur havt ein vøkstur av debutantum seinasta árið, men tað høvdu hinir aldursbólkarnir eisini, tá tey vóru 16 ár. Myndin vísir at eldru árgangirnir "flatar út". Við hesi kanning ber ikki til at staðfesta ein serligan vøkstur "seinasta árið".

**Spurningur 32. Hvørji rúsevni (stoffir) hevur tú roynt (skriva tað/tey niðanfyri)?**

310 næmingar (24%) svaraðu uppá hendan spurningin. Svarini eru pettað sundur í tilsamans 590 rúsevnisorð. Talan er um 122 ymisk orð, har av nógv eru synonym.

Fílan 'rúsevnisorð uppteljing.xls' vísir uppteljing av svarunum. Niðanfyri eru partar av úrslitunum.

215 av 310 skrivaðu bert eitt rúsevnisorð. Av hesum eru 188 hash, kannabis ella marihuana. T.v.s. 61% av teimum sum hava roynt rúsevnir, hava bert roynt hash-líknandi stoffir.

Í talvuni niðanfyri eru orðini eru tald upp í nakrar yvirskipaðar bólkar

| Sløvandi | Opioid | Stimbrandi | Hallusinerandi | Óbólkað |
|---|---|---|---|---|
| 291 | 15 | 184 | 85 | 15 |

Talvan niðanfyri vísir partar av talvu, sum eru í excel-fíluni.:

| Bólkur | tal | Ymiskir formar og stavimátar fyri sama rúsevni | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| *Sløvandi* | 247 | hash | hasj | hash ( ikki stoffir) | hash (...) |
| 291 | 17 | kanabis | kannabis | canabis | cannabis |
| 93% | 7 | marijuana | marijuana (shh) | marijuanna | mariguana |
| | 5 | weed | weed (...) | weed bro | smoked weed |
| | 4 | devil’s lettuce | devils lettuce | the devils lettuce | satans grass |
| | 4 | lattergas | nitrous oxide | nitrus | ethanol |
| | 4 | benzos | xanax | diazepam | |
| | ... | | | | |
| | | | | | |
| *Opioid* | 3 | heroin | | | |
| 15 | 5 | morfin | morphin | | |
| 5% | 1 | codeine | | | |
| | 5 | oxy | oxycodone | oxycontin | suboxon |
| | 1 | tramadol | | | |
| | | | | | |
| *Stimbrandi* | 65 | ritalin | rita | ritalin. | ritaline |
| 184 | 53 | mdma | mdmay | ecstacy | ecstasy |
| 59% | 39 | kokain | cocain | cocaine | cokain |
| | 24 | Amf | amf. | amfetamin | amfetamin (speed) |
| | 2 | meth | krystal | | |
| | 1 | Pcp | | | |
| | | | | | |
| *Hallusinerandi* | 30 | soppar | svampar | svampar(ikki stoffir) | svampir |
| 85 | 29 | Lsd | lsa | acid | |
| 27% | 12 | 2 | 2cb | 2c-b | 2-cb |
| | 9 | Keta | ketamin | hensta doyvandi | |
| | 5 | Dmt | changa | | |

## Fylgiskjal 2: Arbeiðsorkan hjá Sernámi býtt uppá arbeiðsbólkar

**Talva yvir, hvussu arbeiðsorkan hjá Sernámi er býtt millum ymiskar fakbólkar**

| **Fakbólkar** | **Ársverk** | **Undir skúlaaldur** | **Í skúlaaldri** | **Ársverk undir skúlaaldur** | **Ársverk, í skúlaaldri** |
|---|---|---|---|---|---|
| Sernámsfr. ráðgevar | 8,05 | 39% | 61% | 3,1 | 4,9 |
| Sálarfrøðingar | 7,20 | 24% | 76% | 1,7 | 5,5 |
| Taliráðgevar | 6,94 | 72% | 28% | 5,0 | 1,9 |
| Rørsla | 1,32 | 72% | 28% | 1,0 | 0,4 |
| Sjónráðgevi | 0,25 | 50% | 50% | 0,1 | 0,1 |
| Orðblindaráðgevi | 0,25 | 0% | 100% | 0,0 | 0,3 |
| **Samlað** | **24,01** | **46%** | **54%** | **10,9** | **13,1** |
| Sersamskifti | 0,89 | | | | |
| Miðnám sálarfrøði | 2,25 | | | | |
| Sálarfrøðingar og ráðgevar tilsamans | **27, 15** | | | | |

## Fylgiskjal 3: Lopfjølin – ábyrgd, visitatión og lógargrundarlag

Tað eru Uttanríkis- og mentamálaráðið og Tórshavnar kommuna, sum í høvuðsheitum fíggja Lopfjølina, har tímajáttanin fer av játtanini til sjúkra- og heimaundirvísing, sum Undirvísingarstýrið umsitur.

Tilboðið er ætlað til í mesta lagi 12 næmingar. Tveir lærarar og tveir námsfrøðingar starvast á Lopfjølini, og harumframt eru Barnaverndartænastan, heimaskúlin hjá næminginum, Sernám og visitatiónsnevndin knýtt at virkseminum.

Í visitatiónsnevndini eru leiðsluumboðið fyri skúlan á Fløtum, sum er formaður, samskiparin fyri Margarinfabrikkina, eitt umboð fyri Barnaverndartænastuna og eitt umboð fyri Sernám. Skúlin á Fløtum hevur vegna skúlarnar í Tórshavnar kommunu námsfrøðiligu og umsitingarligu ábyrgdina av skúlatilboðnum.

Upptøka til Lopfjølina fylgir ásetingunum í kunngerð nr. 24 frá 19. mars í 2019 – Kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð. Ávísing til Lopfjølina er treytað av, at mett verður, at tað er gagnligt fyri næmingin at fáa undirvísing í Lopfjølini í styttri ella longri tíðarskeið.